| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>17. desember 2020 | Blað nr.: 1231 |
| | | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 17. desember 2020 **Kl**. 16:30
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 294/20-331/20

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen

**LUTTÓKU EISINI:**
Bogi Jacobsen
Jóan Petur Hentze
Eyðfríð Jacobsen
Eyðna Justinussen
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>17. desember 2020 | Blað nr.: 1232<br><br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 294/20 | 20/00205-1 | Mál beind í nevndir 2020 | 1234 |
| 295/20 | 20/01519-2 | Møguligt keyp av grundstykkið burtur av matr.nr. 43a, Velbastaður. | 1236 |
| 296/20 | 20/04548-2 | Matr.nr. 135nn, Hoyvík. Møguligt afturkeyp. | 1239 |
| 297/20 | 17/03546-4 | Ferðavinnuætlan fyri Nólsoy | 1241 |
| 298/20 | 20/00868-1 | Skipan av Miðstovninum (Realskúlin Kongagøta og frk. Cohr) | 1243 |
| 299/20 | 20/03466-1 | Tórshavnar býarsavn : Umbygging av savnsbygninginum á Frúutrøð 1, matr. nr. 645a | 1247 |
| 300/20 | 19/04307-1 | Ungdómstilboð á Velbastað | 1250 |
| 301/20 | 19/03559-1 | Svimjihøllin í Gundadali: Rúmari umstøður til skifting og brúsu | 1253 |
| 302/20 | 16/01194-6 | Herluf Jakobsen : Áheitan vegna Bragdið um útvegan av hølum til felagið | 1257 |
| 303/20 | 17/01326-2 | Umbøn um yvirtøku av Gundadalshøllini | 1262 |
| 304/20 | 19/00423-2 | Venjingarhøli í Kollafirði | 1266 |
| 305/20 | 18/03747-1 | Stovnsetan av listaráði | 1272 |
| 306/20 | 19/01969-1 | Tøkir skúlabygningar 2019-2020 | 1276 |
| 307/20 | 16/00962-1 | Tórsvøllur - vestursíðan | 1302 |
| 308/20 | 20/04581-1 | Tórsvøllur Torg | 1311 |
| 309/20 | 19/00757-1 | Ítróttapolitikkur fyri Tórshavnar kommunu | 1315 |
| 310/20 | 16/01243-4 | Trivnaðarnevndin: Umbøn frá eldraráðum um broyting av viðtøkunum, soleiðis at heimild verður fyri at útgjalda fundarpening e.l. | 1323 |
| 311/20 | 20/04321-1 | Bátahylur í Álakeri - gøta á brimgarð | 1327 |
| 312/20 | 20/01272-1 | Skógfriðing av øki fram við Hoydalsá ísv makaskifti við Búnaðarstovuna | 1329 |
| 313/20 | 20/03654-1 | Útbjóðing av útstykking við Miðhorn í Tórshavn | 1334 |
| 314/20 | 17/02247-1 | Gøtan kring Havnina og fiskastykkið | 1340 |
| 315/20 | 18/00173-1 | Gamla brúgvin um Sandá úti í Havnardali | 1351 |
| 316/20 | 20/04090-3 | Umsókn um keyp ella nýtslurætt til jarðarstykki, sum liggur eystanfyri matr.nr. 1076l, Stiðjagøta 5, Tórshavn | 1356 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 317/20 | 20/04192-2 | Fyrispurningur um keyp av matr.nr. 1083a, Tórshavn | 1358 |
| 318/20 | 20/04607-1 | Spælipláss í kommununi | 1360 |
| 319/20 | 20/02186-2 | Áheitan um yvirtøku av vegi matr. nr. 1094r, Tórshavn (2006-3342) | 1362 |
| 320/20 | 17/00971-3 | Verkætlan til framhald av útstykkingini Klingrutjørn - Klingurstjørn | 1364 |
| 321/20 | 20/00758-1 | Uttanhýsis kanning av framtíðar tørvi á brennistøð | 1367 |
| 322/20 | 17/01760-5 | Umsókn um byggiloyvi til bygning á matr. nr. 161b, 185c og 156, Tórshavn. undir Bryggubakka og Rektaragøta | 1369 |
| 323/20 | 19/04234-5 | Umsókn um keyp av øki til samanlegging við matr. nr. 1115b, undir Gráasteini 64, Tórshavn | 1377 |
| 324/20 | 20/00199-3 | Umsókn um broyting av byggisamtykt og prinsipielt byggiloyvi til KOKS | 1379 |
| 325/20 | 20/01016-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt á Glyvursnesi, matr. nr. 2a og 2c, Kirkjubøur | 1384 |
| 326/20 | 20/04449-1 | Útflyting av burturkasti 2021 | 1386 |
| 327/20 | 20/04370-1 | Eykajáttan november 2020 | 1389 |
| 328/20 | 20/00203-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020 | 1392 |
| 329/20 | 19/01965-2 | Gigni : Framtíðar hølisviðurskifti í Tórshavnar kommunu | 1396 |
| 330/20 | 20/04204-1 | Ásetan av fundardøgum fyri býráðið 2021 | 1400 |
| 331/20 | 20/04650-3 | Áheitan um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 1175i, Tórshavn | 1401 |

**Til viðgerðar**

## 294/20 Mál beind í nevndir 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 3/20 | 20/00205-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 25/20 | 20/00205-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 63/20 | 20/00205-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 87/20 | 20/00205-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 131/20 | 20/00205-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 182/20 | 20/00205-1 |
| 7 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 214/20 | 20/00205-1 |
| 8 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 267/20 | 20/00205-1 |
| 9 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 294/20 | 20/00205-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri økir í kommununi** | **Fyri samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. desember 2020 | Blað nr.: 1235<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 295/20 Møguligt keyp av grundstykkið burtur av matr.nr. 43a, Velbastaður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 160/20 | 20/01519-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 34/20 | 20/01519-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 154/20 | 20/01519-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 210/20 | 20/01519-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 185/20 | 20/01519-2 |
| 6 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 271/20 | 20/01519-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 01.12.2020 | 67/20 | 20/01519-2 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.12.2020 | 245/20 | 20/01519-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 323/20 | 20/01519-2 |
| 10 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 295/20 | 20/01519-2 |

**Upprunin til málið:** Eigarin av grundstykkinum bjóðar kommununi grundstykkið til keyps.

Umleið 535m2, verða frámatrikuleraðir matr.nr. 43a, Velbastaður. Stykkið liggur beint hinumegin skúlan á Velbastað.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Parkeringsviðurskiftini við Skúlan á Velbastað eru sera trupul.

Verandi eigari av ognini matr. nr. 43a, hevur vent sær til kommununa. Hann bjóðar kommununi eitt grundstykki á uml. 535m2, til keyps fyri uml. 500.000,00
( Uml. 935 kr.m2 )

Longdin á grundstykkinum framvið vegnum verður uml. 20,25 metrar.

Um kommunan ognar sær lendið, ber til at gera parkeringsøkið á grundstykkinum.

Stykkið hevur staðið á sølulista hjá ognarmeklara, men er fyribils tikið av sølulista aftur, meðan frábýtismálið verður avgreitt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin. Ongi.**

| | Býráðsfundur<br>17. desember 2020 | Blað nr.: 1237 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið í teknisku nevnd og í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at kommunan ognar sær økið til parkeringspláss til skúlan.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti.** Verkætlanin verður fíggjað av konto 8175, Vegir Íløgur, L00002, framfluttur karmur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til, at keypa ognina, sum nú er frámatrikulerað og hevur fingið matr.nr. 43i, Velbastaður. Vídd 477m2, fyri í mesta lagi 500.000,00 svarandi til 1.050 kr.fermeturin.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Jákup Dam legði fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til at keypa uml. 535 fermetrar av matr. nr. 43a og 43i, Velbastaður, sambært upprunaliga tilmælinum til teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina og sambært kortskjali, j.nr. 20/01519/3.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Jákupi Dam, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Grundstykkið er matrikulerað, og er breiddin til vegin einans uml. 20 metrar, vísandi til at ein geiri á 4 metrar er matrikuleraður til økið omanfyri.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við eigaran av ognini, og eigarin er sinnaður til at selja kommununi lendi á uml. 310 fermetrar burtur av matr. nr. 43i og 43h, fyri kr. 400.000,00 Hetta verður gjørt við marknaumskipan.

Breiddin til vegin verður tá uml. 26 metrar, og ber tá til at gera 10 parkeringsbásar á økinum, sí kortskjal j. nr. 20/01519-9.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við omanfyri nevndu loysn, sí kortskjal j. nr. 20/01519-9 Kort yvir parkeringsøkið við skúlan á Velbastað.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Nýtt tilfar er komið inn í málinum, sum verður viðgjørt í umsitingini og møguliga verður klárt til fundin.

**Tekniska nevnd 01. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, samstundis sum umsitingini verður heimilað at yvirtaka geilina matr. nr. 22a, sum kommunan hevur gjørt til gøtu, har fyrsti partur er trappa, tí talan er um brattlendi. Gøtan er føst farleið millum skúla og dagstovn og við eini yvirtøku kann gøtan eisini gerast atgongd til matr. nr. 43a og síðani við eini marknaumskipan kann kommunan fáa tvey eyka parkeringspláss fram við vegnum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipananevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>17. desember 2020 | Blað nr.: 1239<br><br>Formansins merki: |

## 296/20 Matr.nr. 135nn, Hoyvík. Møguligt afturkeyp.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 324/20 | 20/04548-2 |
| 2 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 296/20 | 20/04548-2 |

**Upprunin til málið:** Eigarar av matr.nr. 135nn, ynskja at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Matr.nr. 135nn, Hoyvík. Grundstykkið er planerað. Vídd 427m2.

Kommunan seldi verandi eigarum grundstykkið fyri kr. 482.083,00 við skeyti sum er tinglýst 23.11.2017.

Eigararnir av grundstykkinum, hava keypt hús, og ynskja nú at lata grundstykkið innaftur.

Eigararnir av grundstykkinum hava tikið stuðlamúrin niður sum gekk gjøgnum grundstykkið, og hava javnað lendið.

Samlaður kostnaður til tilfar er sambært kvittan kr. 37,500,00 og stendur grundstykkið teimum í kr. 519.583,00

**Lógir, ásetingar o.a.**

Kommunustýrislógin. Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn. Tinglýstir servituttir. Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað.

Grein 6 í skeytinum ásetur.
Byggingin skal vera byrja innan 2 ár frá tí, at byggibúningin er liðug og klárt er at byggja á stykkinum. Byggingin skal vera liðug og byggiváttan útskrivað í seinasta lagið 3 ár frá tí, at byggibúningin er liðug og klárt er at byggja á stykkinum. Annars tilskilar kommunan sær rætt til at krevja stykkið aftur móti, at keyparin fær keypspeningin og tað, hann hevur goldið fyri byggibúning, afturgoldið uttan rentur. Fellur stykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama stykki til góðar.
Allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla til keypara. Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

**Upplýsingar frá umsitingini:**

Talan er um útstykking Karlamagnussarbreyt sethús, og er skeytið tinglýst í 2017.

Sostatt er talan um um eina “ gamla “ útstykking sum fyri tíð síðani er endað.

At fremja eina nýggja útlutan av grundstykkjunum so hvørt sum tey koma innaftur, verður mett trupult og umsitingarliga krevjandi.

Mett verður at stykkini so hvørt tey koma innaftur, í fyrsta lagið kunnu bjóðast møguligum umsøkjarum við bráfeingis tørvi, og í øðrum lagi verða seld í fríðari sølu, til ásettan minsta prís, sum verður samsvarandi meting frá meklara, tó ongantíð fyri lægri prís enn afturkeyps prís.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum. Ongir.**

**Umhvørvisárin. Ongi.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl. Skeyti.** Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa grundstykkið aftur frá eigara, og at afturrinda eigara kr. 519.583,00
Seljari rindar tinglýsingarútreiðslur.

Tá ið kommunan er tinglýstur eigari av grundstykkinum, verður grundstykkið í fyrsta lagið bjóða møguligum umsøkjara við bráfeingis tørvi, og í øðrum lagi lýst til sølu hjá ognarmeklara.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 297/20 Ferðavinnuætlan fyri Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 11.02.2019 | 13/19 | 17/03546-4 |
| 2 Vinnunevndin | 10.02.2020 | 12/20 | 17/03546-4 |
| 3 Nólsoyarnevndin | 01.09.2020 | 8/20 | 17/03546-4 |
| 4 Vinnunevndin | 07.09.2020 | 62/20 | 17/03546-4 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 178/20 | 17/03546-4 |
| 6 Vinnunevndin | 14.12.2020 | 87/20 | 17/03546-4 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 326/20 | 17/03546-4 |
| 8 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 297/20 | 17/03546-4 |

**Vinnunevndin 11. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Visit Tórshavn hevur yvirtikið uppgávuna at gera ferðavinnuætlan fyri Nólsoy.
Arbeiðið kann væntandi verða liðugt í fyrstu helvt av 2020. Arbeiðið við at gera ferðavinnuætlanina verður eitt sindur dýrari. Mett verður, at tað sum restar í, verður umleið kr. 37.750.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Leiðarin á Stjórnaskrivstovuni og kommunustjórin mæla vinnunevndini til at játta Visit Tórshavn kr. 37.750 afturat til at gera ferðavinnuætlanina fyri Nólsoy lidna.
Mælt verður til, at peningurin verður játtaður av kontu 7710 Ferðavinna.

**Vinnunevndin 10. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í februar 2020 yvirtók Visit Tórshavn uppgávuna at gera ferðavinnuætlan fyri Nólsoy.

Arbeiðið hevur verið tarnað av støðuni við korona, men nú er eitt uppskot klárt. Sjálvt um borgarar og vinna í Nólsoy hava verið við í tilgongdini við millum annað work-shop og samrøðum, verður skotið upp at hava eina hoyring. Ætlanin var at hava ein borgarafund í Nólsoy, men vegna nýkomnu støðuna av korona verður mælt til, at ein hoyring á netinum verður gjørd í september, so eitt liðugt uppskot er klárt at leggja fyri í oktober 2020.

**Skjøl:**

Uppskot til ferðavinnuætlan fyri Nólsoy.
Yvirlit yvir átøk til kunningar.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni, og býarsrkitekturin mæla byggi- og býarskipanarnevndini og vinnunevndini, umvegis nólsoyarnevndina til at taka undir við tilmælinum um at leggja uppskot til ferðavinnu-ætlan fyri Nólsoy til hoyring á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu.

**Nólsoyarnevndin 01. september 2020:** Staðbundna nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 07. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:** Ferðavinnuætlanin fyri Nólsoy hevur ligið alment frammi til hoyringar, men eru ongar viðmerkingar komnar inn til ætlanina.

Ætlanin var at skipa fyri borgarafundi í Nólsoy um ferðavinnuætlanina, men vegna corona hevur hetta ikki verið gjørligt. Í staðin lá ferðavinnuætlanin frammi til hoyringar í longri tíð enn upprunaliga ætlað.

Nú vit nærkast ársenda verður mælt til at avgreiða ferðavinnuætlanina, so farast kann undir at arbeiða við átøkunum í ferðavinnuætlanini, tá ið nýggja árið byrjar.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla vinnunevndini til at samtykkja uppskotið til ferðavinnuætlan fyri Nólsoy.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í Vinnunevndina.

**Vinnunevndin 14. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 298/20 Skipan av Miðstovninum (Realskúlin Kongagøta og frk. Cohr)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 63/20 | 20/00868-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 315/20 | 20/00868-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 329/20 | 20/00868-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 298/20 | 20/00868-1 |

**Upprunin til málið:**
Samtykt hin 30. oktober 2019 í máli 19/01969 Tøkir skúlabygningar um at Realskúlin, Skúlin í Kongagøtu og húsini hjá Frk. Cohr verður dagstovnur sum samanhangandi tilboð.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Gjørt er uppskot til skipan av stovninum, harundir viðvíkjandi plásskapasiteti. Gjørt er eisini uppskot til tillaging av bygninginum í Kongagøtu til dagstovnavirksemi og kostnaðarmeting tí viðvíkjandi.

Skotið verður upp, at stovnsheitið verður Miðstovnurin, sum longu verður brúkt á staðnum.

Í viðgerðina er eisini tikin við vøggustovuvirksemið, sum Miðstovnurin hevur í Hornabø. Harumframt hevur eisini verið viðgjørt hølistørvur til børn við serligum tørvi, sum í dag heldur til í leigumáli á Frælsinum.

Hølisstøðan hjá Stella Maris Vøggustovu hevur eisini verið viðgjørd sum partur áv hesum máli, sí tilmæli í máli 19/01795.

Høvuðsbygningarnir eru Realskúlin og Kongagøta við hvør sínum fimm stovum. Til ber at skipa virksemið alt eftir tørvi (hóskandi *flowi*). Samlaði plásskapasiteturin í báðum bygningunum verður uml. 50-53 vøggustovubørn og 100-110 barnagarðsstovubørn.

Húsini hjá Frk. Cohr gevur Miðstovninum umstøður til børn við serligum avbjóðingum, har møguleiki er at fara burtur frá eftir tørvi, umframt til annað atknýtt virksemi hjá stovninum. Garðsøkið verður skipað eftir aldri á børnunum.

Miðstovnurin hevur vøggustovu í Hornabø. Nú Miðstovnurin verður víðkaður, er fyri virksemið skilabest er at flyta alt virksemið á eitt stað.

Bygningurin í Hornabø verður hinvegin mettur væl egnaður at hýsa tilboðnum til børn við serligum tørvi, sum í dag eru á Frælsinum. Í hesum sambandi verður mælt til at siga upp leigusáttmála við UMMR og flyta tilboðið í Hornabøm, tá bygingurin verður tøkur.

Gjørt er uppskot til tillagingar av bygninginum í Kongagøtu, sí skjal. Gjørd er eisini kostnaðarmeting av hesum íroknað garðsøkið, sí skjal. Hesi verða løgd fram á fundinum.

Íløgujáttan er ikki tøk til endamálið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/01795 Høvuðsumvæling Stella Maris Vøggustova
18/02825 Leigumál á Frælsinum

**Møgulig frávik/læjttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Byggingin, tá allur bygningurin er tikin í nýtslu, er ætlað at økja plásskapasitetin, sum hevur við sær øktan rakstur samsvarandi barnatalinum. Væntað verður, at aftrat teimum 5 mió í íløgujáttan 2021 skulu aðrar umleið kr. 2 mió til at fáa allan bygningin kláran.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 5.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato 2021 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | 3175 | Nýggj projektkonta | | 3175 | L00001 Løgukarmur | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarastjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at umrøða málið og fíggjartørvin.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Víst verður til málslýsingina omanfyri og íløgujáttan í fíggjarætlanini 2021 kr. 5 mió á løgukontu 3175 Barnaansing til Miðstovnin.

Skúlavirksemið í skúlanum í Kongagøtu er flutt út á Fløtir, og alstórur tørvur er at fáa bygningin gjørdan kláran til dagsstovnavirksemið hjá Miðstovninum (fevnandi um Realskúlan, skúlan í Kongagøtu og Frk. Cohr-húsini), sum áður er samtykt.

Partur av hesum er at flyta dagstovnavirksemi úr øðrum hølum. Frítíðartilboðið á Frælsinum 30 til børn við serligum avbjóðingum skal flyta til Hornabø í seinasta lagi um ársskiftið, tá leigumálið við UMMR gongur út. UMMR hevur gjørt nýggja leiguavtalu við ÍSF um hølini. Vøggustovuvirksemið, sum er í Hornabø í dag, skal flyta í Miðstovnin.

Í løtuni eru frammanundan ov nógv børn í Realskúlanum, tí ætlanin at gera skúlan í Kongagøtu um til dagstovnavirksemið hevur drigið út. Neyðugt er at gera bráðfeingis tillagingar í Frk. Cohr-húsinum (smáar tillagingar) og í skúlanum í Kongagøtu (meira umfevnandi).

Aftrat hesum er alneyðugt at lata upp fleiri vøggustovupláss í BARN skipanini. Framrokning av plásstørvi vísir, at í januar 2021 og frameftir vanta í minsta lagi 47 vøggustovupláss. Verða ikki fleiri vøggustovupláss útvegað, verður bíðitíðin hjá foreldrum at fáa pláss til børnini enn drúgvari. Harumframt tekur Stella Maris Vøggustova ikki fleiri børn inn.

Játtanin er tí eisini ætlað til at lata tvær vøggustovur (uml. 18-20 pláss tilsamans) upp aftrat í Miðstovninum sum skjótast tíðarætlan fyri tillagingarnar er greið.

Hesar kr. 5 mió røkka til ein part av ætlaðu bygningstillagingunum, men nóg mikið til at fáa virksemið í parti av bygninginum í gongd og góðkent. Umframt okkurt smávegis arbeiði í Frk. Cohr-húsinum er tað serliga ovara hæddin í Kongagøtu, har innrættast skal nýggj vøggustova við skiftiumstøðum, verjur móti trappum, nýggjan felags køk, vesini tillagast til vøggustovur við skifti møguleikum og smáum kummum, garderobur o.a. skal setast upp, og málaraarbeiði skal gerast.

Neyðugt er at fáa arbeiðið í gongd beinanvegin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at heimila umsitingini at fyrireika og gera avtalur um ymsu arbeiðini á Miðstovninum, og í hesum sambandi at játta kr. 5 mió á kontu 3175 Barnaansing til løgukontu við heitinum Miðstovnurin.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við tilmælinum við tí ískoyti, at arbeiðið skal bjóðast út og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, mæla til at bjóða arbeiðið út og leggja málið fyri aftur til støðutakan tá tilboð eru innkomin.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 atkvøður ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 299/20 Tórshavnar býarsavn : Umbygging av savnsbygninginum á Frúutrøð 1, matr. nr. 645a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.10.2020 | 255/20 | 20/03466-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 327/20 | 20/03466-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 328/20 | 20/03466-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 299/20 | 20/03466-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Leiðarin á Tórshavnar býarsavni hevur saman við umsitingini arbeitt við at lýsa tríggjar ymiskar valmøguleikar fyri umvæling og umbygging av bygninginum á Frúutrøð 1 til framtíðar savnsvirksemi, herundir fevna um fasta framsýning, skiftandi framsýningar og umsiting og lutvíst goymsla. Sí hjálagt upprit.

Til fundin kemur umsitingin at greiða nærri frá uppritinum.

Næsta stig vildi verið at fingið gjørt nærri metingar um kostna fyri eitt ella fleiri av stigunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Málið um framtíðar íbúðarbygging á Frúutrøð.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongir.

**Umhvørvisárin**
Avmarkað.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
Sí hjáløgdu frágreiðing.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, býararktitekturin, leiðarin á Húsaumsitingini og mentamála-leiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um umsitingin skal halda fram við fyrireikingunum við støði í stig 1, 2 ella 3.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, tekur undir við at arbeitt verður við stig 1, løtt loysn.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Játtan
Á fundi í mentamálanevndini 5. oktober 2020 var samtykt at arbeiða víðari við stig 1 sbrt. hjálagda uppriti.

Í fíggjarætlanini fyri 2021 hevur býráðið 26. november 2020 samtykt at játta 1.500 tkr. sum løgujáttan til Tórshavnar býarsavn.

Fyrireikingar og útinning
Tískil eru nú grundarlag fyri at fara undir fyrireikingar og seinni útinning av stig 1, løtt loysn, har dentur verður lagdur á at fáa betrað munandi um fyritreytirnar fyri at hava eina fasta framsýning og møguligar evnisframsýningar og har tað samstundis verður roynt at fáa funktiónina í bygninginum so góða sum tilber innanfyri givna fíggjarkarmin m.a. við at gera brunatiltøk, ið gera tað møguligt at fáa nýtsluloyvi til at hava væl fleiri fólk inni í senn og soleiðis økja um nyttuvirði og eisini inntøkurnar.

Neyðugar tillagingar v.m.
Lætta loysnin inniber at framsýningarrúm vera tillagaði, at ávísir veggir vera tiknir niður/fluttir og aðrir skilaveggir gjørdir fyri at fáa meiri framsýningarpláss, umframt aðrar neyðugar funktiónir.

Aðrar ábøtur sum avleiðing av tillagingunum, er at skifta gólv, umframt mála veggir og loft, umframt at betra um vesi-viðurskiftini sbrt. galdandi byggikunngerð. Eisini vera tiltøk gjørd fyri at fáa ljósviðurskiftini betri egnaði til framsýningarvirksemi, umframt aðrar smærri tillagingar, alt eftir sum tøka fíggingin nú røkkur til.

Fyri at fáa sum mest burturúr tøku játtanini er hugsanin at fáa ráðgeva at gera grundleggjandi kanningar og projektering og síðani at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð til tvær fyritøkur. Ætlandi kunnu fyrireikingarnar byrja í næstum og síðani heinta inn tilboð í januar 2021 og fara undir útinning í januar/feb. 2021. Væntandi tekur arbeiðið umleið 3-4 mánaðir og kann so væntandi vera klárt til at ein føst framsýning kann lata upp á sumri 2021. Verkætlanin verður tillagað alt eftir hvussu útboðið hildnast.

Verkætlanarbólkur
Innanhýsis í kommununi kemur verkætlanin at vera eitt samstarv millum Tórshavnar býarsavn, býarskipanardeildina, trivnaðarfyrisitingina/mentamáladeildina og húsaumsitingina. Húsaumsitingin kemur at hava verkætlanarleiðsluna um hendi og vera byggiharri.

Møgulig framtíðar stig
So vítt tilber, vil tað í hesi verkætlanini vera tikin atlit til at henda verkætlanin tekur hædd fyri møguligum seinni framhaldi til stig 2 og 3 í uppritinum um hølisviðurskifti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á Húsaumsitingini, býararkitekturin og mentamála-leiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at játta 1.500 tkr. av løgujáttan (2021) - 5575 Søvn og mentanararvur til nýggja projektkontu - Tórshavnar býarsavn.

b). at heimila umsitingini at fáa projekterað umbygging og umvælingar av bygninginum á Frúutrøð 1 og at søkja um byggiloyvi.

c). at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð antin sum høvuðsarbeiðstøku ella sum fakarbeiðstøkur og innganga sáttmálar innan tøka fíggjarkarmin.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, atkvøður blankt, vegna vantandi heildarætlan og kostnaðarætlan.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

## 300/20 Ungdómstilboð á Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 34/20 | 19/04307-1 |
| 2 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 24.02.2020 | 2/20 | 19/04307-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 16.12.2020 | 338/20 | 19/04307-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 17.12.2020 | 353/20 | 19/04307-1 |
| 5 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 300/20 | 19/04307-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í eykajáttan fyri 2019 (j.nr. 19/04681) eru játtaðar kr. 500.000 til at fyrireika nýtt ungdómstilboð á Velbastað eftir sama leisti sum í Kaldbak og Norðasta horni.

Barna- og ungdómsdeildin hevur í eina tíð arbeitt við at kanna tørvin á einum námsfrøðiligum ungdómstilboði fyri bygdirnar Kirkjubø og Velbastað eftir nakað sama leisti sum í Kaldbak og Norðasta horni. Stundum verður ynski um slíkt tilboð reist eitt nú tí, at børn og ung á Velbastað og í Kirkjubø noyðast at ferðast til Havnar.

Eins og í t.d. Kaldbak og Norðasta horni, so kann ungdómstilboð skipast í dagstovninum á Velbastað, ið eisini virkar sum frítíðarskúli. Hølini hjá Sólarmagn kunnu eisini brúkast til endamálið, men Sólarmagn verður eisini brúkt til annað virksemi regluliga og í vikuskiftum, og tí kunnu hesi virksemi fella somu tíðir. Royndir frá øðrum ungdómstilboðum vísa, at tilboðið skal vera støðugt opið fyri at halda teimum ungu til og at tey eisini vera tikin í álvara. Um tilboðið stongir í úrtíð vísa royndir, at tey ungu fella frá. Hetta talar fyri staðseting í dagstovninum á Velbastað.

Eitt slíkt ungdómstilboð er vanliga opið tvær til tríggjar ferðir um vikuna, har børnini kunnu verða aldursbýtt frá 4.-5. flokki og 6.-9. flokki upp til 17 ára aldur . Ungdómstilboð í hesi støðd krevur minst tvey starvsfólk.

Barnatalið í økinum sær soleiðis fyri 2019 sbrt. hagstovuni:

| | 2019 | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 10 ár | 11 ár | 12 ár | 13 ár | 14 ár | 15 ár | 16 ár | 17 ár | 18 ár |
| Syðradalur, Streymoy | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| Kirkjubøur | 2 | 1 | 2 | 2 | 1 | - | 2 | 3 | 1 |
| Velbastaður | 8 | 7 | 5 | 8 | 5 | 3 | 4 | 2 | 7 |

Sum liður í neyvari fyrireikingum er í næstum ætlanin at spyrja tey ungu, hvat tey kundu hugsað sær av ungdómstilboðnum har á staðnum. Nøkur av hesum brúka frammanundan ungdómstilboð í høvuðsstaðarøkinum.

Royndirnar eru, at tað krevst neyv fyrireiking at skipa nýtt ungdómstilboð. Tað er av týdningi at skipa innbjóðandi umhvørvi og fjølbroytt virksemi. Roknast skal við, at kostnaður at seta á stovn tilboði við innbúgvi, spølum og hentleikum annars er uml. kr. 115.000.

Starvsfólkini skulu eisini leggja ætlan fyri virksemið eitt nú við íblástri frá á hinum ungdómstilboðunum í Tórshavnar kommunu.

Við støði í rakstrarjáttanini, ið tilboðini í Kaldbak og Norðasta horni hava, er árligi rakstrarkostnaðurin uml. kr. 450.000.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at seta fyrireikingar at skipa ungdómstilboðið í gongd saman við Dagstovninum á Velbastað og teim ungu í økinum, og at beina málið í staðbundnu nevndina fyri Kirkjubø og Velbastað til viðmerkingar.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 24. februar 2020:** Staðbundna nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Stígur kom í ætlanina, tá koronafarsóttin tók seg upp, men arbeitt er víðari við fyrireikingunum.

Á Velbastað er frammandundan eitt tilboð fyri børnum í skúlaaldri annaðhvørt fríggjakvøld fyri børnum í øllum skúlaaldri. Í samráð við tað tilboðið, leggur kommunala ungdómstilboðið seg eftir at arbeiða við bólkinum ung í aldrinum 14 – 18 ár. Tað eru uml. 30 ung í hesum aldri í Kirkjubø, Velbastað og Syðradali tilsamans.

Ungdómstilboðið fer at halda til í somu hølum, sum frítíðarskúlin er í dag. Hetta er leistur eisini aðrastaðni í kommununi. Nøkur keyp skulu gerast serliga við fleksiblum innrættingum, innbúgvi, útgerð, spølum v.m., sum hóska til málbólkin ung. Hetta er mett at kosta uml. kr. 70.000.

Ætlanin er at hava opið tvey kvøld um vikuna. Hetta tí at royndir frá líknandi ungdómstilboðum siga, at tað er gott at byrja í smáum fyri síðani at síggja, hvør tørvurin verður. Opið er mikukvøld og fríggjakvøld, hetta soleiðis, at tað er ikki opið somu kvøld sum ungdómstilboðið á Norðasta horni.

Starvsfólk er tøkt til ungdómstilboðið og lýst verður ætlandi eftir einum fólki aftrat. Ynski er at fáa starvsfólk, sum vilja tey ungu, við einum forvitnum, lurtandi, og undrandi hugburði. Innihaldsliga verður tilboðið nakað sum í hinum ungdómstilboðunum so sum borðspøl, kiosk, kreativitet, spurnarkappingar v.m.

Enn hevur ungdómstilboðið ikki fingið nakað navn, men ætlanin er, at tey ungu eins og bygdafólkini fáa møguleika til at vera við í einari navnakapping.

**Fíggingin:**
Eykajáttanin í 2019 er løgd inn á kontu 3215 Aðrar útreiðslur barnaansing. Játtanin er ikki tøk longur. Konta 3215 hevur í 2020 borið ymsar óvanligar útreiðslur, m.a. øktum barnatali, har vøggustova er komin aftrat, og part av kostnaðinum at fíggja meirnýtslur hjá stovnum í roknskapinum 2019 burtur. Eingin játtan er sett av til endamálið í fíggjarætlanini 2021.

Umsitingin hevur tí leitað eftir minninýtslum á øðrum kontum á grein 3 sum fígging til ungdómstiloðið 2021. Skotið verður upp at flyta kr. 125.000 av kontu 3211 Námsfrøðilig ráðgeving og kr. 225.000 av kontu 3217 Dygdarmenning. Tilsamans kr. 350.000, ið mett verður nøktandi til virksemið tvey kvøld um vikuna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at skipa Ungdómstilboð á Velbastað sum rakstrarstað (3318) í Eind B, og at flyta kr. flyta kr. 125.000 av kontu 3211 Námsfrøðilig ráðgeving og kr. 225.000 av kontu 3217 Dygdarmenning til endamálið.

**Mentamálanevndin 16. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 301/20 Svimjihøllin í Gundadali: Rúmari umstøður til skifting og brúsu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.11.2019 | 302/19 | 19/03559-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 108/20 | 19/03559-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 22.06.2020 | 196/20 | 19/03559-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 16.11.2020 | 305/20 | 19/03559-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 305/20 | 19/03559-1 |
| 6 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 301/20 | 19/03559-1 |

**Upprunin til málið:**
Býráðssamtykt 4. juli 2019 í máli 15/01400 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl.

**Samandráttur**
Í sambandi við viðgerðina av málinum um nýggjan langhyl, varð samtykt í mentamálanevndini, fíggjarnevndini og býráðnum at fáa til vega uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu, og at umsitingin fær heimild at biðja um tilboð til ráðgeving hesum viðvíkjandi.

Í sambandi við langhylsverkætlanina er lagt upp til at samlaða anleggið kann taka ímóti væl fleiri viðskiftafólkum/kundum v.m. og verður tí mett hóskandi at fara undir fyrireikingar til víðkan av skiftirúms- og brúsuumstøðunum. Eisini skal atlit takast til viðurskifti hjá starvsfólkum at skifta og teimum sum eru rørslutarnaði.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við viðgerðina av málinum um nýggjan langhyl, varð samtykt í mentamálanevndini, fíggjarnevndini og býráðnum at fáa til vega uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu, og at umsitingin fær heimild at biðja um tilboð til ráðgeving hesum viðvíkjandi.

Í sambandi við langhylsverkætlanina er lagt upp til at samlaða anleggið kann taka ímóti væl fleiri viðskiftafólkum/kundum v.m. og verður tí mett hóskandi at fara undir fyrireikingar nú til víðkan av skiftirúms- og brúsuumstøðunum. Eisini skal atlit takast til viðurskifti hjá starvsfólkum at skifta og teimum sum eru rørslutarnaði v.m.

Í 2017 bleiv heittvatnsskipanin til verandi brúsur endurnýggjað. Í 2018 eru skápini í skiftingarrúmunum endurnýggjaði, og ber lutfalsliga lætt til at økja um talið av skápum.

Miðrúmini í skiftingarrúmunum, har tað áður vóru sólir, kunnu umgerast soleiðis, at har ber til at gera fleiri brúsur.

Byggiskráin fyri langhylin fevnir ikki um at víðka um skiftirúms- og brúsuviðurskiftini. Skipanaruppskotið leggur upp til, at øll almenn atkomu- og skiftirúmsviðurskifti framhaldandi verða í verandi høll. Sum upplýst í málinum til býráðsviðgerðina í desember 2018 viðvíkjandi ráðgevarasáttmálanum - fer nýggja høllin at hava økt virksemi og økt tal av brúkarum við sær. Metast má týðandi, eisini við atliti at víðari prosjekteringini, at fingið verður til vega uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, og sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum.

Útreiðslur til hesa bygging liggur uttanfyri kostnaðarmetingina og fíggingina
av langhylsverkætlanini annars. Til tess at fáa uppskot til vega skal roknast við ávísum útreiðslum til

ráðgeving v.m.

Á fundinum er ætlan at gjøgnumganga ynski, krøv og møguleikar í sambandi við verkætlanina.

Ætlanin er í fyrsta umfari at vita um til ber at fáa eina ískoytisavtalu við verandi ráðgeva í sambandi við langhylsverkætlan og í øðrum lagi at fáa annan ráðgeva viðv. at gera koncept fyri eina út- og umbygging av skifti- og brúsurúmum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Byggilóggávan, herundir BK17.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Langhylsverkætlanin.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ikki viðkomandi.

**Umhvørvisárin**
Í ávísan mun.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ikki í hesum umfari.

**Skjøl**
Kort yvir verandi innrætting.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | Ja | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | Ja | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Ætlanin er í fyrsta umfari at fíggja hesa fyrstu fasuna av konceptmenning innan raksturin av svimjihøllini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til samtykkja at fara undir gerð av møguligum konsepti fyri út- og umbygging av brúsu- og skiftirúmunum.

**Mentamálanevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at leggja uppskotið fyri nevndina aftur.

**Ískoyti**:
Sp/f SNA arktitektar hava saman við umsitingini og leiðaranum í Svimjihøllini arbeitt við at menna uppskot til konsept fyri út- og umbygging av brúsu- og skiftirúmunum, og har tað eisini verður givin boð uppá, hvussu umstøður hjá starvsfólkum at skifta o.a. og skiftirúmsviðurskiftini hjá rørslutarnaðum o.a. verða betraði ella umskipaði.

Nú fyriliggur ein ávegis projektmappa (sí hjálagt) við uppskotum til ymisk konsept, harav eisini boð uppá umskipanir av kafeteria, móttøku, starvsfólkaviðurskiftum v.m.

Á fundinum verða uppskotini løgd fram og eisini greitt frá fyribils metingum um kostnaðarviðurskifti v.m.

Skotið verður upp, at arbeitt verður víðari við uppskotunum. Metast má skilabest, at endalig støða verður tikin saman við langhylsverkætlanini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotini við atliti til, at umsitingin arbeiðir víðari við uppskotunum at leggja aftur til endaliga støðutakan, harundir fígging.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020**: Umrøtt.

**Ískoyti:**
Við støði í víðari umrøðu millum leiðsluna í høllini og umsitingina er fingið til vega eitt uppskot afturat til loysn. Sí hjálagt uppskot D (verður tøkt til fundin).

Víðari tilgongd
Umsitingin metir at tað er hóskandi at nevndin umrøður uppskotini og tekur støðu til um tað skal arbeiðast víðari við einum ella fleiri av uppskotunum ella møguligar samansetingar av teimum og herundir at fáa neyvari kostnaðarmeting. Talan kann eisini vera um eina stigvísa tillaging. Har t.d. víðkan av brúsurúmunum verður framt fyrst og onnur viðurskifti framd seinni.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til um arbeiðast skal víðari við einum ella fleiri av uppskotunum.

**Mentamálanevndin 22. juni 2020:** Samtykt at koma aftur í nevnd við kostnaðarmeting av uppskoti C saman við uppskoti til skifting til rørslutarnað frá uppskoti B.

**Ískoyti:**
Ráðgevin SNA Ark. hevur nú gjørt kostnaðarmeing av loysn B og við hølum til tey sum bera brek frá loysn c. Sí hjálagt skjal E.

Uppskot til stigvísa ætlan:
Ætlanin kann fremjast í stigum, har t.d. byrjað var við at gera fleiri brúsur í skiftirúminum hjá kvinnum, síðani hjá monnum og at enda skiftirúminni til rørslutarnað v.m.. Hetta seinasta kann fyrst gerast tá núverandi gosbað er tikið burtur og verandi venjingarhøli hjá HS. Hetta verður væntandi í seinnu helvt av 2022 ella fyrst í 2023.

Fígging
Um ynski er at fremja hesa ætlan kundi fíggingin t.d. verið soleiðis:

2021 - 1,500 tkr.
2022 - 2000 tkr.
2023 - 2000 tkr.

ella heldur frá 2022 og fram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til um farast skal víðari við eini ætlan í 3 stigum yvir árini 2021-23.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. november 2020:** Samtykt at mæla til at gera umbyggingina yvir árini 2022-23 og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongar ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

## 302/20 Herluf Jakobsen : Áheitan vegna Bragdið um útvegan av hølum til felagið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.04.2017 | 69/17 | 16/01194-6 |
| 2 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 63/18 | 16/01194-6 |
| 3 Mentamálanevndin | 08.02.2018 | 72/18 | 16/01194-6 |
| 4 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 170/20 | 16/01194-6 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 170/20 | 16/01194-6 |
| 6 Mentamálanevndin | 16.11.2020 | 304/20 | 16/01194-6 |
| 7 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 316/20 | 16/01194-6 |
| 8 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 331/20 | 16/01194-6 |
| 9 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 302/20 | 16/01194-6 |

**Málslýsing:**
Ítróttafelagið Bragdið og Tórshavnar kommuna skrivaðu 8. desember 1998 leigusáttmála um matr. 1268c t.e. í Gundadali við niðara vøll (sí hjálagt). Matr. er uml. 110 m2 við ástandandi húsum. Sáttmálin hevur ikki áseting um uppathald annað enn at tað í grein 2 er ásett, at tað ikki kann vera uppsagt fyrrenn til 1. november 2008. Í grein 5 er ásett at "*Um so er at Tórshavnar kommuna vil hava húsini tikin niður, ella sjálv ynskir at ogna sær tey, skal endurgjaldast Ítróttafelagnum Bragdinum ein peiningaupphædd, sum ásett verður av teimum av Føroya Rætti tilnevndum metingarmonnum, um ikki kommunan og Bragdið semjast um endurgjaldið."*

Húsini hjá Bragdinum í Gundadali eru sambygd við røð av øðrum bygningum – tað eru felagshúsini hjá ávikavist Bridgefelagnum/Bridgesambandinum og FF Giza Hoyvík, og dagstovnurin Miðstovnurin, sum kommunan eigur. Økið, sum húsini liggja á, eru partur av heildarætlanini fyri ítróttaøkið í Gundadali, har ætlan er at taka bygningarnar niður til evt nýbygging, spæliplássv.m. Bæði Bridgefelagið/Bridgesambandið og FF Giza Hoyvík hava verið í samskifti við kommununa um yvirtøkuavtalu.

Bragdið hevur á fundi sett fram ynski um, at kommunan yvirtekur húsini fyri hóskandi kostnað, sum partarnir kunnu semjast um og at fara undir verkætlan við nýggjum felagshúsi.

**Møguligt nýtt hús við Tórsbreyt**
Um felagið fær pening til vega ynskir felagið at fara undir bygging av felagshúsi við ella kring Tórsbreyt. t.d. við síðuna av verandi garasjuhúsi. Sí hjálagt tilfar frá felagnum um, hvussu hetta kundi verið gjørt.

Felagið hugsar, at peningur, sum felagið fær fyri verandi hús, skal innganga í fíggingina av nýggja húsinum. Eftir verður ein rest-tørvur, ið felagið má leggja eina ætlan fyri. Felagið hevur møguleika fyri at søkja um stuðul til íløgur sbrt. galdandi leiðreglu frá 3. september 2015 um stuðul av kontu 5370 stuðuli til íløgur, ið sum høvuðsreglu gevur møguleika fyri stuðli upp til 30% av metta byggikostnaðinum.

Fyrisitingin metir, at sum heild vil tað vera skilagott, at frælsur ítróttur fær høli við Tórsbreyt. Fleiri feløg innan frælsan ítrótt hava teirra virksemi á Tórsbreyt. Umframt Bragdið er talan um Hvirluna og sersambandið Frælsur Ítróttur Føroya. Sum útgangsstøði hevði verið ynskiligt, at eini møgulig komandi felagshús vóru ein felags verkætlan millum fleiri áhugapartar.

Fyrisitingin metir skilabestu loysn – heldur enn at byggja nýtt felagshús til eitt av feløgunum beint uppat sjálvari rennibreytini, sum harumframt má metast trupul at fremja – at kommunan yvirtekur felagshúsini hjá Bragdinum í Gundadali at taka niður, og at feløgini innan frælsan ítrótt á Tórsbreyt yvirtaka ella leiga bygningin, har dagstovnurin Kurla heldur til, og sum lættliga kann tillagast til felagshús. Kommunan er í tilgongd at keypa Kurlu, sum Føroya Tele enn eigur.

Ein slík loysn vildi verið í samsvari við heildarloysn bæði fyri Gundadalsøkið, Tórsbreyt og í mun til dagstovnaøkið í miðbýarøkinum, har Kurla og Miðstovnurin er partur. Har tann fyrri stovnurin er lítil rakstrareind, er tann seinni í ótíðarhóskandi hølisumstøðum. Í ætlan er er at byggja nýggjan stovn í miðbýarøkinum ístaðin fyri hesar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at fara undir samráðingar við Bragdið um yvirtøku av felagshúsi teirra í Gundadali, og at taka upp samband við feløgini innan frælsan ítrótt um tilgongd at skipa felags hølisloysn á Tórsbreyt í bygninginum, ið Kurla heldur til í dag.

**Mentamálanevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið á fundi við umboð fyri nevndina í Bragdinum. Herundir á ástaðarfundi í hølum felagsins í Gundadali.

Felagið ynskir at TK yvirtekur ognina í Gundadali og byggir uppí verandi goymslubygning við Tórbreyt ella í verandi tøknibygning, har tað eisini eru WC og skiftirúm. Sí hjálagt myndir frá bygninginum. Í mun til uppskotið frá 2016 metir felagið nú, at mest týðandi er at fáa betri goymslumøguleikar og nakað betri umstøður til upphiting (í ringum veðri) o.a. Leysliga mett ynskir felagið at bygdir vera uml. 35-40 m2 afturat einum av verandi bygningum, har felagið fær ein ávísan framíhjárætt (møguliga ávíst áramál), men sum annars eisini kann brúkast av hinum feløgunum t.e. Hvirlan og Smæran. Bragdið metir tørvurin á hentleikum til styrkisvenjingar betri kann nøktast í teimum venjingartilboðunum, ið longu eru í býnum.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá mettum fyritreytum og kostnaði fyri at byggja afturat verandi bygningum við Tórsbreyt.

Umsitingin hevur eisini mett um viðurskiftini saman við Ítróttaanleggum og verður mett at verandi goymslubygningurin kann skipast nakað betri. Sum er hava Bragdið og Hvirlan innrættað sær hvør sítt rúm í bygninginum til serútgerð hjá feløgunum, meðan tað mesta av hølinum eru stativini til rimarenning. Sí hjálagt meting av virðismeting av ognini hjá Bragdinum í Gundadali, umframt avrit av leiguavtaluni til lendið har Bragda-húsið stendur í Gundadali.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um umsitingin skal

fara víðari við samráðingunum við Bragdið um yvirtøku av ognini í Gundadali í 2019 ella 2020 samstundis sum farið verður undir fyrireikingar til at byggja ein tilbygning við Tórsbreyt í seinasta lagi í 2021.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Útsett.

**Mentamálanevndin 08. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í samráðingum við Bragdið um viðurskiftini. Felagið ynskir at avhenda húsini skjótast gjørligt. Ognin er í sera ringum standi og heldur er støðan vorðin verri síðani metingina 2011. Felagið bjóðar TK at lata ognina fyri 350 tkr.

Ætlanin er at upphæddin, ið felagið fær fyri ognina møguliga verður oyramerkt til bygging av goymsluhøli við Tórsbreyt. Felagið er farið burtur frá ætlanini um eitt størri felagshús.

Hugsanin er at tað antin kann vera talan um ein minni goymslubygning sum framhald av verandi goymslubygningi við norðara endan ella við tøknihúsið. Í løtuni fyriliggur ikki ein tøk ætlan fyri hesum. Samskifti við felagið um møguliga bygging heldur ætlandi fram í næstum.

Sí hjálagt uppskot til skjeyti.

Skotið verður upp at keypið verður fíggjað av kontu 6175 Umsiting og røkt av fastari ogn.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við at yvirtaka ognina á Gundadalsvegi 6 (matr. 1268c) fyri 350 tkr. pr. 31. desember 2020 og at fíggja keypið av kontu 6175 Umsiting og røkt av fastari ogn.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
**Keyp av Kurlu**
Víst verður til viðgerð í máli 17/03061 Útinna forskeypsrætt til ognina Kurla matr. nr. 1408b, Tórshavn. Tórshavnar kommuna yvirtók bygningin pr. 10. november 2020.

**Viðv. avtalu við Bragdið um ognina í Gundadali og leiguavtalu um part av Kurlu**
Umsitingin hevur verið á fundi við Bragdið um málið og at broyta semjuna frá fyrr í ár soleiðis at tey ístaðin inngangа avtalu við TK har virðið á teirra ogn (350 tkr). í Gundadali inngongur at rinda fyri leigugjald og el&hita yvir eitt nærri tilskilað áramál. Í løtuni brúkar TK 100 kr./m2/árið í leigugjaldi til frítíðarfelagsskapir og umleið 100 kr./m2/árið fyri el&hita. Felagið ynskir at fáa brúksrætt til fylgjandi hølir í bygninginum: 2.04 skrivstova (14,3 m2), 1.05 køkur (20,5 m2) og part av 1.01 stova (ca. 10 m2), 0.04 venjingarhøli (38,2 m2), umframt atgongd til gongsøkir og ves – sett til 17 m2 – tils. 100 m2 – t.v.s. 20 tkr./árið.

Hugsanin er at gera eina leiguavtalu við Bragdið, ið gongur í 15 ár, men sum so ikki verður prístalsjavnað hesi árini. Mett verður at Bragdið eigur at fáa fyrsta rætt at velja høli av tí at felagið letur sína ogn í Gundadali ganga inn í hettar leigumálið.

Sí hjálagt sum fylgiskjal tekningar yvir bygningin. Umsitingin kemur á fundinum at geva boð uppá nýtslu av bygninginum og evt. tillagingar.

**Viðv. avtalu við Hvirluna um leiguavtalu um part av Kurlu**
Umsitingin hevur eisini havt fund við umboð fyri Hvirluna og umrøtt møguleikarnar. Felagið tykist ikki í eins stóran mun vilja binda seg til eins nógvar fermetrar í bygninginum, men vil fegin hava eina skrivstovu og eitt venjingarhøli, umframt ynskir møguleika fyri goymslu, herundir av ymiskum sum í dag er í goymslubygningin á Tórsbreyt.

**Umbyggingar og tillagingar í bygninginum**
Í máli 20/03794 samtykti býráðið 29. oktober 2020 við fyrstu viðgerð at játta 500 tkr. til tillagingar í bygninginum. Hugsanin er at hesar tillagingar kunnu gerast stigvíst og at tær ikki hindrað at t.d. Bragdið kann byrja virksemi í bygninginum nú um árskiftið tá dagstovnavirksemi har er liðugt. Ikki er enn avrátt hvørjar tillagingarnar skulu vera, men kann t.d. vera talan um at fáa ávísar skifti- og brúsurúmshentleikar, ventilatión til venjingarhøli, umframt at fáa bygningin gjørdar so góðan sum tilber í mun til rakstur, reingerð v.m. Eisini verður umhugsa onkrar tillagingar viðv. atkomu og garðinum soleiðis at bygningurin kann kennast at vera ein rímiliga samrunnin partur av Tórsbreyt. Her kann eisini vera aktuelt við tillagingum í parkerings- og ferðsluviðurskiftunum.

**Møguleikar fyri øðrum feløgum í bygninginum**
Av tí at tað ikki í verandi støðu tykist sannlíkt at Bragdið og Hvirlan hava áhuga at leiga allan bygningin verður mett upplagt at fara í dialog við onnur feløg sum kundu havt áhuga fyri felagsvirksemi har. Nevnast kunnu t.d. Tórshavnar súkklufelag, Triathlonfelagið og møguliga onnur við og soleiðis fáa hylling á hvussu virksemi i bygninginum kann setast saman.

**Rakstur av bygninginum**
Ítróttaanlegg kemur at hava høvuðsrakstrarábyrgd av bygninginum sum eitt ítróttahús burturav. Hetta inniber at Ítróttaanlegg hevur yvirskipaða umsjón við bygninginum, men frátekur tað ikki feløgunum at fara væl um og at læsa eftir sær o.s.fr. sbrt. ásetingum í leiguavtalu og húsordan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at umrøða framtíðar nýtsluna og skipan av bygninginum og økinum.
b). at taka støðu til um farast skal í samskifti við Tórshavnar súkklufelag, Triathlonfelagið og møguliga onnur við um møgulig leigumál í bygninginum og koma aftur í nevnd til komandi fund.

**Mentamálanevndin 16. november 2020:** Nevndin samtykti at taka undir við b).

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við Bragdið um leigusáttmála um ávís høli í komandi ítróttahúsinum við Tórsbreyt, og eru komin á samt um hjálagda leigusáttmála, umframt hjálagda skjeyti.

Leigusáttmálin gongur yvir 15 ár og inniber at felagið ikki skal rinda leigu og nýtslugjald hesi árini, men sum so hinvegin ikki fær útgoldið keypsupphæddina fyri keypið av ognini á Gundadalsvegnum 6.

Sum framhald av hesum sáttmálanum við Bragdið, verður hildið fram við samskiftinum við onnur feløg um leigusáttmálar um aðrar partar av húsinum og felagsbrúk av húsinum og verður væntandi komið aftur í nevnd við úrslitinum av tí í januar 2021.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um at innganga 15 ára leigusáttmála við Bragdið sum hjálagt og at keypa ognina á Gundadalsvegnum 6 sbrt. hjálagda skeyti.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 303/20 Umbøn um yvirtøku av Gundadalshøllini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 104/17 | 17/01326-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 31.05.2017 | 147/17 | 17/01326-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 242/17 | 17/01326-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 191/18 | 17/01326-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 276/18 | 17/01326-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 181/19 | 17/01326-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 271/20 | 17/01326-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 283/20 | 17/01326-2 |
| 9 Mentamálanevndin | 16.11.2020 | 311/20 | 17/01326-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 317/20 | 17/01326-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 332/20 | 17/01326-2 |
| 12 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 303/20 | 17/01326-2 |

**Málslýsing:**
13. mars 2017 fekk kommunan skriv frá ítróttafeløgunum Neistin, Kyndil og Fleyr viðv. samráðingunum um avhendan av Gundadalshøllini, umframt uppskot um eina loysn við felagshølum í Høllini á Hálsi til Neistan og Kyndil, men Fleyr verður eftir í verandi felagshølum og fær tey.

Kommunan hevur áður verið í samráðingum við feløgini um Gundadalshøllina, men bar tá ikki á mál. Uppleggið tá var at kommunan yvirtók høllina uttan viðurlag. Hetta m.a. tí mett verður at høllin hevur ein rímiliga týðandi tørv á høvuðsumvæling innan nøkur ár. Tá var ikki undirtøka í tí eina felagnum fyri avtaluni.

Viðv. møguligum felagshølum í Høllini á Hálsi, so uppskotið hjá feløgunum ikki so upplagt og vil innbera skerdar møguleikar í aðrar mátar. Hartil kemur at meginreglan viðv. hølum er sonevnt shared use og tískil ikki upplagt at hølir vera løgd burturav til ávís feløg, men heldur spurningurin at skapa karmar soleiðis at fleirtáttað nýtsla kann fáast burturúr hølum v.m.

Hartil er spurningurin um hvat kostnaðurin vil vera. Áður hevur verið viðgjørd ein útbygging suður úr verandi høll. Tann útbyggingin vildi kunna inniborið fleiri hentleikar til feløgini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:

a). Principielt at umrøða um ein yvirtøka er áhugaverd og í sofall at heimila umsitingini at fara undir realitetssamráðingar við feløgini við støði í yvirtøku uttan viðurlag eins og undanfarnar hallaryvirtøkur.
b). At umrøða ynski um møgulig felagshølir til Neistan og Kyndil í Høllini á Hálsi og vil umsitingin koma við nærri tilráðing til komandi fund.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 31. mai 2017:** Nevndin tekur undir við a og hevur umrøtt b.

**Ískoyti**
Í samráð við eigaran er gjørd støðulýsing av bygninginum. Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá. Sí hjáløgdu frágreiðing. Í næstum verður ástaðarfundur og vera víðari samráðingar so ætlandi í heyst.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at taka kunningina til eftirtektar.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið á fundi við nevndina í L/F Venjingarhøllin (Gundadalshøllin).

Greitt verður frá gongdini í samráðingunum og verður upplegg til yvirtøkuavtalu gjøgnumgingið (sí hjálagt skjal).

Ætlanin er at halda fram við tingingunum í juni og koma aftur í nevnd í  august.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Kunningin tikin til eftirtektar og samtykt at kanna um møguleikar eru til felagsvirksemi í økinum.

**Ískoyti**
Samráðingar hava verið við L/F Venjingarhøllina (Gundadalshøllina). Umsitingin greiðir frá status í samráðingunum og umrøða av hvussu hesar møguliga kunnu koma á mál.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka kunningina til eftirtektar.

Heðin Mortensen og Turið Horn vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í víðari samráðingum við L/F Venjingarhøllin. Felagið heldur fast við eitt gjald á 900 tkr. fyri yvirtøkuna av høllini (300 tkr. til hvørt felagið), vísandi til innskotspeningin tey hava latið upprunaliga í verkætlanina. Alternativt fer felagið at royna at fáa rakstur í høllina og herundir tillagað gjøld v.m. Eisini ynskir felagið at fáa endurnýggja leigusáttmálan frá 1983 (sí hjálagt skjal). Hetta skuldi tó ikki verið

alneyðugt av tí, at onki evstamark tykist vera ásett í sáttmálanum, annað enn at hann ikki kundi uppsigast áðrenn 2015. Í leigusáttmálanum er annars í pkt. 5 ásett at um kommunan ynskir at ogna sær hana tá leigutíðin er farin skal eigarin verða endurgoldin ein peningaupphædd, sum ásett av tveimum av sorinskrivaranum útnevndum monnum, um ikki býráðið og hesi semjast um endurgjaldið.

Tað sum talar ímóti at taka av slíkum tilboði er fyrst og fremst at aðrar hallir eru yvirtiknar uttan viðurlag (tó í sambandi við Badmintonhøllina var skuld við og í sambandi við høllina á Stórheyggi fekk felagið eina langtíðarleiguavtalu við ymiskum framíhjárættindum til høllina fram til 2024. Tað sum talar fyri er, at TK við høllini fær eina høll, ið hevur eitt mio. virði, sjálvt um tørvur er á týðandi ábótum á høllina.

Avbjóðingin við at leingja leiguavtaluna er at felagið tá mest sannlíkt kemur at søkja um týðandi stuðul til umvælingar frá TK og sum heild eru vánaligt útlit fyri raksturin hjá høllini kann bera útreiðslurnar av eini umvæling.

Í sambandi við mál 18/03453 Skipan av Gundadali, sum kemur fyri á komandi fundi í mentamálanevndini er gjørd ein heildarætlan fyri alt Gundadali. Við støði í teirri viðgerðini er upplagt at um leigusáttmálin verður longdur at avmarka leigumálið til umleið helvtina av verandi lendi t.v.s. at lendið millum høllina og Dansifrøi ikki skal vera partur av leigumálinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til annaðhvørt:
a. um farast skal undir endaligar samráðingar um yvirtøku av høllini ella
b. um leiguavtalan skal leingjast ella ikki leingjast og í sofall minkast við økinum millum Gundadalshøllina og Dansifrøi.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Samtykt at taka undir við b í tilmælinum.

**Ískoyti**:
Nevndin í Í/F Venjingarhølini hevur verið á fundi við kommununa og rykt eftir avkláring viðv. framtíðini hjá høllini. Eisini hevur felagið latið avrit av seinasta ársroknskapinum hjá felagnum.

Greitt er at í verandi støðu forfellir hølin og hevur tørv á høvuðsumvæling og tykist ikki vera fíggjarligt grundarlag fyri tí í verandi skipan. Tó so at skipanin hjá TK fyri stuðul til íløgur er møgulig, men hevur hon vanliga als ikki upphæddir, ið eru nøktandi í hesum høpi. Sí hjálagt áður gjørd støðulýsing.

Hartil kemur, at felagið ynskir at kommunan yvirtøkur høllini – vísandi til uppskot til semju frá 2019.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja um antin:

a). um farast skal í tilgongd við felagið um, hvussu felagið undir verandi skipan, kann fara undir eina stigvísa ætlan fyri umvæling av høllin ella

b). um farast skal í samráðingar um yvirtøku av høllini.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við b og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 16. november 2020:** Útsett.

**Ískoyti**:

**Keyp og ískoytisavtala**
Umsitingin hevur verið í samráðingum við L/F Venjingarhøllin og er treytað komin ásamt um fylgjandi skeyti og ískoytissáttmála. Hetta inniber at TK skal rinda feløgunum 900 tkr. fyri at yvirtaka bygningin og samstundis geva feløgunum ein nærri tilskilaðan brúksrætt v.m. næstu 15 árini. Eisini er lagt upp til at yvirtaka verandi hallarvørð í høllini.

**Fígging**
Býráðið samtykti 26. november 2021 í máli 20/03416 Fíggjarætlan 2021, Tórshavnar kommuna, at játta 1.000 tkr. til yvirtøku av Gundadalshøllini. 900 tkr. eru ætlaðar til keypið og restin til tinglýsing v.m.

**Góðkenningartilgongd í feløgunum handan L/F Venjingarhølin**
Í hesum føri er talan um eitt lutafelag, sum tey trý ítróttafeløgini Kyndil, Neistin og Fleyr eiga og tí vil keypið av ognini og ískoytisavtalan vera treytað av endaligari góðkenning á nevndar- og aðalfundum í 2 førum. Tískil kann koma uppá tal at eitt ískoyti kemur til málið áðrenn endaligu viðgerðina.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:

a). at taka undir við at rinda L/F Gundadalshøllini 900 tkr. fyri at yvirtaka Gundadals-høllina at fíggja av kontu 6175 Umsiting og røkt av fastari ogn.

b). at inngang hjá lagda ískoytisáttmála um brúksrætt v.m. ísv. yvirtøku av høllini.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Tikið av skrá**.**

## 304/20 Venjingarhøli í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 92/19 | 19/00423-2 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 01.10.2019 | 2/19 | 19/00423-2 |
| 3 Økisnevndin | 18.03.2019 | 6/19 | 19/00423-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 147/19 | 19/00423-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 7/20 | 19/00423-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 68/20 | 19/00423-2 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 70/20 | 19/00423-2 |
| 8 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 21/20 | 19/00423-2 |
| 9 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 91/20 | 19/00423-2 |
| 10 Fíggjarnevndin | 06.04.2020 | 85/20 | 19/00423-2 |
| 11 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 57/20 | 19/00423-2 |
| 12 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 79/20 | 19/00423-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 22.06.2020 | 211/20 | 19/00423-2 |
| 14 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 186/20 | 19/00423-2 |
| 15 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 144/20 | 19/00423-2 |
| 16 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 328/20 | 19/00423-2 |
| 17 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 333/20 | 19/00423-2 |
| 18 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 304/20 | 19/00423-2 |

**Upprunin til málið:**
Jákup Dam, býráðslimur.

**Samandráttur:**
Uppskotið snýr seg um at fáa bygt ein minni hjábygning afturat høllini upp á høvuðsinngongdina norðanfyri til at seta upp venjingarmaskinur av ymsum slag til brúk innan ítróttin v.m.

**Lýsing av málinum:**
Sbrt. uppskotinum er hugsanin í fyrsta umfari at fáa planerað, stoypt og takt ein rábygning á umleið 100 m2, ið skal staðsetast uppat verandi hallarbygningi. Síðani er hugsanin, at húsavørður hjá Ítróttaanleggum stigvíst fer undir innrætting av hølinum til venjingarendamál. Harumframt koma fakveitingar innan el- og hvs. Fyribils verður mett, at kostnaðurin fyri tað, sum skal bíleggjast av uttanhýsis veitingum ella tilfari, verður umleið 800 tkr.

Ítróttaanlegg og umsitingin meta, at onnur alternativ eiga at verða umhugsað viðv. umstøðum til venjingarútgerð. Uppat høllini er fimleikahøllin í Kollafjarðar skúla.

Mett verður, at tað ikki er alneyðugt, at skúlin bæði hevur ítróttahøll og fimleikahøll fult út til taks. Ein loysn við venjingarútgerð í parti av fimleikahøllini kundi eisini verið umhugsað, ið haraftrat má metast bíligari loysn.

Tað hevði so gjørt, at skúlin o.o. framhaldandi kundu brúkt fimleikahøllina partvíst til ymisk serstøk høvi, samstundis sum tað ikki verður neyðugt at gera íløgu í uppíbygging av ítróttarhøllini. Á 1. hædd í høllini

við inngongdina er eisini ein stór loftshædd. Henda kundi eisini verið innrættað, men mett verður, at tann verkætlanin kostar nakrar mió. kr. vegna brunakrøv, trappuviðurskifti, lyftu v.m.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í Tórshavnar kommunu eru privatar venjingarmiðstøðir, sum heild eigur at vera sýnt ansi viðv. kappingaravlaging.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Eingi.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ikki viðkomandi.

**Umhvørvisárin**
Ávís.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Tekning av uppskotinum viðv. útbygging av ítróttahøllini.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at arbeiða víðari við ætlan, har partur av fimleikahøll skúlans verður gjørd til venjingarhøli.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við at byggja ein tilbygning aftrat ítróttarhøllini og beina málið í staðbundnu nevndina fyri Kollafjørð og økisnevndina.

**Økisnevndin 18. mars 2019:** Samtykt at játta ein part av íløguni kr. 400.000,-, vísandi til raðfestingarlistan sum er gjørdur yvir bygdirnar mál. nr 19/01034. Bergun Kass var ikki við til hetta málið.

**Ískoyti**

Nú er greitt at Økisnevndin játtar 400 tkr. til verkætlanina, umframt tær 300 tkr. sum eru settar av á kontuni fyri smærri ítróttaanlegg. Tá ávís fígging nú er tøk, er tíðin búgvin til næsta stig, ið er at fáa innheintað tilboð uppá gerð av innlokaðum hjábygningi. Hugsanin er at fáa ráðgeva Ove Mortensen, arktitekt at gera skitsuuppskot, ið verður latið til byggivaldið til góðkenningar. Síðani verður farið undir at bjóða arbeiðið viðv. gerð av innilokaðum hjábygningi út sum undirhondsboð til tveir veitarar. Væntandi tekur tilgongdin at gera skitsuprojekt og at fáa innheintað tilboð til og við mai 2019. Ætlanin er at hetta verkætlanarstigið skal kunnu fremjast fyri í mesta lagi 700 tkr.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini at fáa gjørt avtalu um skitsuprojekt við Ove Mortensen, ark. og søkja um myndugleikagóðkenning.

b). at bjóða arbeiðið at gera innilokaðan hjábygning út til tveir veitarar sum undirhondsboð.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 01. oktober 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Í høllini er loft, sum ikki er gjørt liðugt, og sum kundi verið innrættað til m.a. venjingarhøli og felagshøli annars. Í fyrireikingararbeiðnum hevur tekniska fyrisiting víst á tað óhepna, at nýggjur hølistørvur verður loystur við at byggja høllina út, heldur enn at gera loftið liðugt og útvega ta meirfígging, ið krevst.

Ymsar ætlanir hava verið um at innrætta loftið. Avbjóðingin er fyrst og fremst kostnaður til brunaviðurskifti og atkomu við lyft. Trivnaðarfyrisitingin metir, at loysnir hesum viðvíikjandi eiga at kannast nærri, so at til ber at viðgera innrætting av loftinum sum loysn til venjingarhølið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um umsitingin skal fyrireika aðra hølisloysn enn samtykt 8. mai 2019.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Samtykt at halda fast við samtyktina frá 8. mai 2019.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var viðgjørt seinast, hevur Jákup Dam, býráðslimur, biðið um frágreiðing, hvørt tað samanlagt er ein fyrimunur heldur at gera eina loysn inni í verandi hølum á Loftinum, heldur enn at byggja afturat høllini sum annars samtykt.

Umsitingin metir, at ein loysn kann gerast fyri umleið 2.200 tkr. og fevnir tá um innrættan av allari hæddini, tó ikki íroknað lyftu millum hæddirnar. Undantak kann væntandi fáast fyri lyftu í upp til 3 ár.

Sí hjálagt skitsur viðv. innrætting av verkætlan á Loftinum í Høllini.

Ein avbjóðing er at fáa gólvið so mikið stoytdoyvandi, at venjingar við tungum vektum ikki larma óneyðugt og gera stoytskaðar á elskipan v.m. Neyðug atlit verða tikin í tí sambandi í gólvloysnini.

Í løtuni eru 700 tkr. tøkar til endamálið á projektkontu L57029F Venjingarhøli í Kollafirði.
Til at fíggja restina av tørvinum verður í apríl 2020 gjørt tilmæli í sambandi við framflytingar frá fíggjarárinum 2019 í fíggjarætlanini, har restfíggingin kr. 1,5 mió. verður játtað inn á kontu 6110 Umsiting og røkt av bygningum, soleiðis at tað í alt verða 2.200 tkr. Tá er eisini nærri greitt sáttmálaupphædd í høvuðsarbeiðstøkuni.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla mentamálanevndini og byggi- og býarskipanarnevndini til at samtykkja:

a) at gera venjingarhøli á loftinum í høllini og heimila umsitingini at gera avtalu um projektering við Ove Mortensen, ark. og søkja um myndugleikagóðkenning,
b) at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð og høvuðsarbeiðstøka,
c) at flyta 700 tkr. av projektkonto L57029F Venjingarhøli í Kollafirði til kontu 6110 Umsiting og røkt av bygningum - oyramerkt til hesa verkætlan, og
d) at restupphæddin 1.500 tkr. verður játtað í viðgerðini av framflytingum av játtanum frá 2019 til kontu 6110 Umsiting og røkt av bygningum ætlað hesi verkætlan.

Málið verður beint í býráðið um teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men biðja umsitingina koma aftur í nevnd við tilmæli viðvíkjandi kostnaði og fígging til gerð av lyft.

**Ískoyti**:
Viðv. kostnaðarmeting fyri lyftu
Umsitingin hevur kannað nærri viðv. kostnaðinum fyri at fáa lyft gjørda.
Mett verður at lyft til 6 persónar, stálkonstruktión kring lyft, brunaverja við lættstáli og gips, GSM moduli og góðkenning hjá Arbeiðseftirlitinum kann útvegast fyri umleið 600 tkr. íroknað kommunalt MVG.

Fígging er ikki tøk til endamálið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til um lyft skal útvegast til verkætlanina í hesum umfari.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd 10. mars 2020.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at fara undir verkætlanina, so sum lýst í tilmælinum, og at arbeitt verður við at fáa fígging til lyft sum skjótast.

**Ískoytið fígging nágreinað:**
Samlaða arbeiðið verður mett at kosta umleið 2,2 mió. kr.. Hetta verður fíggjað við 700 tkr. av projektkonto L 57029 Venjingarhøli í Kollafirði aðrari konto og 1,5 mió kr. av konto 6811 Áir, yvirflatuvatn og veitir frá 2019 (avlop 2019).

**Fíggjarnevndin 06. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
22. mai 2020 var licitatión fyri høvuðsarbeiðstøku at gera venjingarhølini. Fimm feløg vóru boðin. Tey vóru:

Sp/f Húsavarðartænastan
Sp/f JEP Smíð

Sp/f Bulur
Sp/f Búsetur
Sp/f Eysturlon

og fylgjandi feløg lótu inn tilboð og við hesum upphæddum:

Sp/f JEP Smíð 2.198.432,07 kr.
Sp/f Búsetur 2.613.962,00 kr.
Sp/f Eysturlon 2.937.643,72 kr.

Eftir at tilboðini eru eftirkannaði, kann staðfestast at Sp/f JEP Smíð hevði lægsta boð á 2.198.432,07 tkr, og at tað uppfyllir krøvini í útbjóðingartreytunum. Ætlandi er, at byrja arbeiðið beinanvegin og skal tað verða liðugt í viku 42, hetta er seinkað í umleið 2 vikur. Sáttmálin verður undirskrivaður ein av fyrstu døgunum.

**Kostnaðarmeting**
Upprunaliga var ætlanin at útinna verkætlanina innan karmarnar á kontu 6110 Umsiting og røkt av bygningum (Húsaumsitingin) Tøk játtan 2.200 tkr. til endamálið er á kontu 5775 ítróttaranlegg L57029 Venjingarhøli í Kollafirði. Útyvir kostnaðin til høvuðsarbeiðstøkuna eru útreiðslur til ymiskar atknýttar útreiðslur mett til umleið 400 tkr, ið er ætlanin at rinda av kontu 6110 Umsiting og røkt av bygningum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á Húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála við Sp/f JEP Smíð á 2.200 tkr. og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í fíggjarætlanini fyri 2021 hevur býráðið 26. november 2020 samtykt at játta 1.000 tkr. sum løgujáttan til løgujáttan 5775 Ítróttaanlegg ætlað til Venjingarhøli í Kollafirði.

Verkætlanin, ið var samtykt fyrr í ár, er komin væl áleiðis og verður væntandi avhendað í desember 2020. Tá verkætlanin var fyrireikað og boðin út, var neyðugt at gera nakrar tillagingar í mun til tøku fíggingina. Harumframt var ikki tøk fígging til lyftu, ið annars verður mett neyðug.

Við hesi nýggju játtanini ber til at útvega lyftu, umframt at gera skilaveggir til at fáa hølisfunktiónina betri. Væntandi verður tørvur á umleið 600 tkr. til gerð av lyftu og 400 tkr. til restarbeiðir.

Arbeiðið við at útvega lyftu verður ætlandi boðið út til 2 feløg sum undirhondsboð.

Viðv. arbeiðinum at gera skilaveggir v.m.
Ætlandi vera samráðingar tiknar upp við arbeiðstakaran Sp/f JEP Smið, og um felagið kann standa við áleið somu eindarprísir, so verður skotið upp at gera avtalu við felagið um hesa eyka arbeiðstøkuna.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á Húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at játta 1.000 tkr. av løgujáttan (2021) - 5775 Ítróttaanlegg til projektkontu L57029 Venjingarhøli í Kollafirði.

b). at heimila umsitingini at gera sáttmála um gerð av restarbeiði við Sp/f JEP Smið á upp til 400 tkr.

c). at heimila umsitingini at bjóða út sum undirhondsboð gerð av lyftu og gera sáttmála um veiting.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við Mentalmálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 305/20 Stovnsetan av listaráði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 11/19 | 18/03747-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 43/19 | 18/03747-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 42/19 | 18/03747-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 75/19 | 18/03747-1 |
| 5 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 63/19 | 18/03747-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 146/19 | 18/03747-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 324/20 | 18/03747-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.12.2020 | 240/20 | 18/03747-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 17.12.2020 | 354/20 | 18/03747-1 |
| 10 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 305/20 | 18/03747-1 |

**Upprunin til málið:**
Forkvinnan í mentamálanevndini Gunvør Balle.

**Samandráttur**
Ætlanin er at stovnseta eitt ráðgevandi listaráð í sambandi við list í býarrúminum og at virksemi hjá verandi listabólki verður skipað í einari samlaðari reglugerð og skipan.

**Lýsing av málinum**
Visjónin fyri Tórshavnar Listaráð er, at Tórshavnar kommuna við greiðum listaprofili kann geva kommununi enn størri dám av serligum estetiskum samleika og verða kend sum ein kommuna við livandi list og serstøkum býarrúmum, ið kunnu stuðla undir visjónini um okkara høvuðsstað – virkin og vakin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 17/04195 Stovnsetan av ráðgevandi listaráði.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongi.

**Umhvørvisárin**
Avmarkað.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Fundarpeningur verður latin uttanhýsis limunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekturin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja uppskotið. Málið verður beint í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Útsett til næsta fund.

**Ískoyti**
Hjálagda uppskot er ein roynd at gera eina samlaða reglugerð og skipa eitt nýtt ráðgevandi listaráð í mun til býarrúm og samstundis varðveita verandi listabólk, ið stendur fyri ítøkiligum útboðum og innkeypi av list.

Útyvir ráðgeving um list, er eisini hugsanin at møguleiki skal vera fyri at spyrja ráðið um ráð í mun til onnur mál og verkevni innan mentan og list.

Málið hevur avmarkaðar fíggjarligar avleiðingar. Uttanhýsis umboðini fáa fundarpening sbrt. galdandi reglum.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við uppskotinum og beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 6 blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Odd Færø, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Sbrt. § 3, stk. 1. í reglugerðini fyri Tórshavnar Listaráð tilnevnir býráðið tríggjar uttanhýsis ráðslimir fyri føroyska listafrøði, har Arkitektafelag Føroya, Føroysk Myndlistafólk og LISA mæla til hvør sín lim í ráðið. Við atliti til grein 8 í javnstøðulógini eru feløgini biðin um at mæla til tveir limir hvør – ein av hvørjum kyni. Umframt hesar tríggjar limirnar eru 2 limir frá umsitingini.

Feløgini mæla til at velja millum fylgjandi:

- Arkitektafelagið Føroya mælir til at velja antin Medunu Dalsgarð ella Eyðun Eliasen
- Føroysk Myndlistafólk mælir til at velja antin Randi Samsonsen og Jón Sonna Jensen
- LISA mælir til at velja antin Katrinu í Geil og Knút H. Eysturstein

Sbrt. § 3, stk. 2. velur býráðið forfólk í ráðnum millum kommunalu umboðini (t.e. antin býararktitekin ella listaábyrgdarhavandi í kommununi).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at velja forfólkið og ein lim fyri hvørt av feløgunum samsvarandi reglugerðini og við atliti at javnstøðu.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Vald eru Eyðun Eliasen, Randi Samsonsen, Knút Háberg Eysturstein og samtykt at velja Biritu Wardum sum forkvinnu í Listaráðnum.

**Ískoyti**:
Gunvør Balle, forkvinna í mentamálanevndini ynskir at fáa víðkað listabólkin við einum limi við listafakligari útbúgving.

---
Meting hjá umsitingini um møguliga loysn

Í verandi støðu er ásett í § 5, stk. 2 at:
Stk. 2: Limir í listainnbólkinum eru:
a). Listaábyrgdarhavandi í kommununi (forfólk)
b). Býararkitekturin
c). Listafakligi ráðgevin á Listasavni Føroya
d). Mentamálaleiðarin

Í sambandi við árligan rakstrarstuðul fyri 2021 við Listasavn Føroya, er ætlanin at fáa gjørt eina formliga samstarvsavtalu við savnið og herundir at fáa formalisera samstarvið um listafakliga ráðgeving sum part av stuðulsavtaluni. Harumframt hevur umsitingin longu í verandi støðu atknýttan listafakligan ráðgeva í sambandi við mál kring listahøllina, framsýningar v.m. Hugsanin er at hesin ella annar kundi verið limur í listabólkinum.

Málið hevur avmarkaðan fíggjarligan týdning, tí umboðið hjá listasavninum verður fevnt av avtaluni við Listasavn Føroya um árligan rakstrarstuðul, meðan hin listafakligi ráðgevin (listasøgufrøðingur) fær fyri skrásettar tímar.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at broyta § 5, stk. 2. í galdandi reglugerð við at leggja afturat pkt. “e). Listasøgufrøðingur settur av umsitingini.”

Málið verður beint í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, tekur ikki undir við tilmælinum og krevur málið fyri býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og bergun Kass, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og meirilutanum í Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 306/20 Tøkir skúlabygningar 2019-2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.05.2019 | 171/19 | 19/01969-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 209/19 | 19/01969-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 24.06.2019 | 225/19 | 19/01969-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 248/19 | 19/01969-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 236/19 | 19/01969-1 |
| 6 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 201/19 | 19/01969-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 268/19 | 19/01969-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 271/19 | 19/01969-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 28.10.2019 | 292/19 | 19/01969-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 30.10.2019 | 289/19 | 19/01969-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 315/19 | 19/01969-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 14/20 | 19/01969-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 11/20 | 19/01969-1 |
| 14 Mentamálanevndin | 27.04.2020 | 126/20 | 19/01969-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 122/20 | 19/01969-1 |
| 16 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 168/20 | 19/01969-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 22.06.2020 | 210/20 | 19/01969-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 187/20 | 19/01969-1 |
| 19 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 158/20 | 19/01969-1 |
| 20 Mentamálanevndin | 24.08.2020 | 217/20 | 19/01969-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 25.08.2020 | 201/20 | 19/01969-1 |
| 22 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 224/20 | 19/01969-1 |
| 23 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 220/20 | 19/01969-1 |
| 24 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 260/20 | 19/01969-1 |
| 25 Mentamálanevndin | 16.11.2020 | 306/20 | 19/01969-1 |
| 26 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 319/20 | 19/01969-1 |
| 27 Mentamálanevndin | 07.12.2020 | 332/20 | 19/01969-1 |
| 28 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 334/20 | 19/01969-1 |
| 29 Mentamálanevndin | 16.12.2020 | 341/20 | 19/01969-1 |
| 30 Fíggjarnevndin | 17.12.2020 | 355/20 | 19/01969-1 |
| 31 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 306/20 | 19/01969-1 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. desember 2020 | Blað nr.: 1277 |
| | Formansins merki: |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Nýggi Musikkskúlin verður tikin í nýtslu eftir summarfrítíðina og Skúlin á Fløtum verður tikin í nýtslu til skúlaársbyrjan 2020-2021. Í hesum sambandi verða fleiri bygningar tøkir til møgulig onnur endamál.

Húsaumsitingin hevur gjørt yvirlit yvir ymsar bygningar við stamdátum, bygningslýsingum og meting um bygningsstøði og í nøkrum føri um egna nýtsluendamál. Sí framløgu, ið løgd er fram í fíggjarnevndini.

Talan er í høvuðsheitum um skúlabygningar, sum knýta seg til verandi virksemið hjá Musikkskúlanum og Skúlanum á Fløtum, tó ikki Venjingarskúlan (Skúlaeindin á Frælsinum hjá Skúlanum á Fløtum), sum ætlandi verður avhendaður Mentamálaráðnum í sambandi við kampusætlanina.

Innan trivnaðarfyrisitingina eru nógv áleikandi mál um hølistørv bæði innan dagstovnaøkið, skúlaøkið og mentamálaøkið. Umframt kommunala hølistørvin, eru fleiri felagsskapir o.o., ið ynskja høli frá kommununi til frítíðarvirksemi, felagshøli v.m.

Aðrar ætlanir í kommununi fevna eisini um nakrar av hesum bygningum. Sum omanfyri nevnt er Venjingarskúlin ætlaður kampusætlanini. Arbeitt verður eisini við íbúðarætlan á Frúutrøð, har verandi musikkskúli og kommunulæknahøli er partur av ætlani.
Tað er tí eisini greitt, at til ber ikki at nøkta allan henda tørv og ætlanir annars við teimum bygningum, sum nú verða tøkir. Talan er í høvuðsheitum um Argja skúla, Realskúlin, Skúlan í Kongagøtu, Gula skúla við Landavegin og Skansastovu.

Aðrir bygningar kunnu tó eisini koma í spæl. Verður t.d. NámX flutt út á Argir, sum uppskot er um, lata nýggir møguleikar seg upp í Eysturskúlanum eitt nú at skipa forskúlatilboð og frítíðarskúla í bygninginum, og bygningurin, sum í dag hýsir frítíðarskúlanum Smílibýlið, kann seljast ella nýtast til annað endamál. Øvugt, flytur NámX ikki út á Argir, kann tann skúlin brúkast til annað endamál.

Eisini á dagstovnaøkinum eru yvirskipað atlit at taka. Realskúlin sum dagstovnur er fyribilsloysn vegna vaksandi tørvin á dagstovnaplássum. Møguleikin antin at flyta ella víðka stovnin í Skúlan í Kongagøtu hevur týdning bæði fyri samlaða plásskapasitetin og íløguætlanina hjá kommununi, har leggjast má upp fyri nýbygging.

Havast skal í huga, at hóast bygningar verða tøkir, so eru ikki allir í besta standi ella egnaðir at flyta inn í uttan víðari. Eitt nýtt nýtsluendamál kann hava við sær útreiðslur til bygningsdagføringar í mun til myndugleikakrøv og neyðugar hølistillagingar, sum hædd skal takast fyri.

Mett verður, at nøkur av høvuðsmálunum, ið skulu takast við í hesa umrøðu, eru:
- Tørvurin á fleiri dagstovnaplássum
- Møgulig flyting av NámX
- Serskúlatilboð
- Frítíðarfelagsskapir

Umsitingin greiðir á fundinum nærri frá um ymsu tørvirnar, ætlanirnar og ynskini. Endamálið er, at fyrisitingin tekur samanum og ger tilmæli um samanhangandi raðfestingar til endaliga støðutakan.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- Framløga um bygningar
- Kampusætlan

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til, at fyrisitingin ger tilmæli um samanhangandi raðfesting av nýtsluendamálum til ymsu bygningarnar.

**Mentamálanevndin 13. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Trivnaðarstjórin saman við mentamáladeildini og barna- og ungdómsdeildini hava viðgjørt møguleikar fyri samanhangandi raðfesting til ymsu tøku bygningarnar.

Viðgerðin hevur tikið støði í áleikandi málum um hølistørv og ynski, sí einstøku lýsingarnar niðanfyri.

Í nøkrum førum verður mælt til ítøkiliga raðfesting av nýtsluendamáli og bygningi, í øðrum førum verður mælt til raðfesting at arbeiða víðari við.

Gjørdar eru ikki ítøkiligar kostnaðarmetingar av flytingum ella broytingum í virksemi.

**Guli skúlin á Landavegnum 32 (Skúlin á Fløtum – Eindin á Landavegnum)**
Viðgerðin hevur fevnt um:

- Sernámsfrøðilig skúlatilboð
- Dagstovnavirksemi
- Frítíðarvirksemi

Í løtuni heldur sernámsfrøðiligt skúlatilboð til í skúlanum, tað sonevnda 4-10 tilboðið. Innan skúlaumhvørvið eru ymisk faklig sjónarmið um, hvørt slík tilboð skulu ella kunnu vera í egnari eind ella tey heldur skulu vera integrerað í vanligum skúla. Væntast kann og fráboðað er vaksandi tørvur á hølum til sernámsfrøðilig skúlatilboð sum heild í kommununi, sí mál 18/04396 eftirmeting av sernámsfrøðiliga økinum í Fólkaskúlunum. Har sum guli skúli er, ber til at byggja út á økinum.

a) Mælt verður til, at 4-10 tilboðið heldur fram.

**Skúlin í Kongagøtu, Realskúlin og Frk. Cohr**
Bygningarnir eru viðgjørdir undir einum. Viðgerðin hevur fevnt um:

- Dagstovnavirksemi, harundir viðvíkjandi máli um høvuðsumvæling av Vøggustovuni Stella Maris
- Framsýningarbygningur til Tórshavnar býarsavn og Tórshavnar listasavn
- Skúlavirksemi hjá Sankta Frans skúla (Mál 18/04026 Skúlastýrið í Sankta Frans skúla: Bygningsviðurskifti v.m.)
- Ymsar áheitanir um annað virksemi

Dagstovnur heldur í dag fyribils til í Realskúlanum sum liður í at nøkta tørvin á dagstovnaplássum. Uppskot er, at dagstovnurin heldur fram í realskúlanum og verður víðkaður við Skúlanum í Kongagøtu, ið sostatt verður stórur námsfrøðiligur miðbýarstovnur. Húsini hjá Frk. Cohr hýsa í dag frítíðarskúlavirksemi og kunnu knýtast uppí dagstovnavirksemið. Íløgan í klárgerð er lítil, hinvegin tálmar loysnin íløgutørvin hjá kommununi í nýggj pláss munandi.

Vísandi til mál um stóra høvuðsumvæling av Vøggustovuni Stella Maris, verður skotið uppi heldur at niðurleggja Stella Maris sum stovn og flyta børnini í Kongagøtu/realskúlan. Hóast børnini í Stella Maris flyta í Kongagøtu/realskúlan, verða framvegis nýggj dagstovnapláss fingin til vega har. Barakkirnar í Kongagøtu verða tiknar burtur og gevur tað rúm fyri betri uttandura viðurskiftum.

b) Mælt verður til, at realskúlin, skúlin í Kongagøtu og Frk. Cohr verður at brúka til dagstovn sum samanhangandi tilboð, higar eisini børnini í Stella Maris flyta.

**Argja skúli (tann nýggjari og eldri) (í verandi støðu Skúlin á Fløtum – Eindin á Argjum)**
Bygningarnir eru viðgjørdir undir einum. Viðgerðin hevur fevnt um:

- NámX
- Dagstovnavirksemi í sambandi við mál um Dagstovnin á Argjum

Uppskot hevur leingi verið um, at NámX verður staðsettur í Argja skúla og skipaður sum sjálvstøðugur skúli (Mál 17/00298 Skúlabygnaður í Tórshavnar kommunu árini 2017-2021). Mett verður, at nýggjari skúlin aleina nøktar ikki allan hølistørvin, serliga mangla fakhøli. Hesi kunnu fáast til vega antin við at umbyggja eldra partin av Argja skúla ella við at taka hann niður og byggja nýtt upp til tørvin, so at NámX

verður framtíðartryggjaður ungdómsskúladepil. Alternativ til hetta er at samstarva við aðrar skúlar um fakhøli.

Dagstovnurin á Argjum hevur átrokandi tørv á høvuðsumvæling. Tilmæli er um heldur at taka hann niður og byggja nýggjan og størri dagstovn á sama grundøki. Uttan mun til, um talan verður um nýbygging ella umvæling, so verður neyðugt at flyta børnini úr stovninum, meðan bygt verður. Uppskot er, at nýggjari partur av Argja skúla verður brúktur til dagstovn, meðan bygt verður ætlandi árni 2021-2022. Viðv. gamla Argja skúla verður nærri støða tikin seinni. Í verandi støðu hava m.a. AA-felagsskapir virksemi har.

Í hesum tíðarskeiðið eigur verkætlan at fáa tørvandi høli til NámX fyrireikað og gjørd soleiðis, at NámX kann flyta út á Argir 2022 ella 2023, ella at samstørv verða skipað við skúlar um hesi høli.

c) Mælt verður til, at NámX flytur út á Argir og neyðug høli verða fingin til vega, men at skúlin í fyrsta umfari hýsir børnum í dagstovninum á Argjum í sambandi við byggimál.

**Eysturskúlin og Smílibýlið**
Bygningarnir eru viðgjørdir undir einum. Viðgerðin hevur fevnt um:

- NámX
- Forskúla og frítíðarskúla
- Sernámsfrøðilig skúlatilboð

Tá NámX er flutt út ætlandi uml. 2022-23, kann frítíðarskúli til Eysturskúlan flyta inn, eins og at møguleiki er at skipa forskúlatilboð. Við hesum kann frítíðarskúlin í Smílibýlinum niðurleggjast.

Um NámX ikki flytur úr Eysturskúlanum, verða ongar stórvegis broytingar.

d) Vísandi til tilmæli um at flyta NámX úr Eysturskúlanum, verður harumframt mælt til at flyta frítíðarskúlan í Smílibýlinum inn í Eysturskúlan umframt at skipa forskúlatilboð.

**Skansastova**
Viðgerðin hevur fevnt um:

- Frítíðarvirksemi

Bygningurin kann hýsa fleiri frítíðarendamálum. M.a.Lions Club Tórshavn (menn) og Lions Liljan (kvinnur) hava sett ynski fram um at leiga ovastu hæddina og gera hana í stand til endamálið. Við hesum kann Lions eisini fara úr leigumálinum við kommununa í Múllers pakkhúsi, og sum kommunan hevur ynski um.

Boð uppá miðhæddina kann vera leigað bridgefeløgunum evt. sum býti fyri bridgehúsið. Samráð um hetta er ikki tikin upp enn. Tøkum lætt heldur til í niðastu hædd, men høli kann tó eisini brúkast til annað virksemi. Týdningarmikið er tó, at virksemini í húsinum hóska til hvørt annað.

e) Mælt verður til at geva frítíðarfelagsskapum leigumál í bygninginum.

**Venjingarskúlin lon 4 (Skúlin á Fløtum – Eindin á Frælsinum)**
Viðgerðin hevur fevnt um:

- Fritíðarvirksemi

Vísandi til ætlanina um Fróðskaparsetur/kampus verður venjingarskúlin fyribils ikki tikin við í hesa viðgerð. Her verður kortini víst á, at Lon 4 er 100% kommunal ogn. Lonin er staðsett ytst í ætlaða kampusøkinum móti høllini á Stórheyggi. Hugsast kann, at lonin verður ikki fevnd av teim fyrstu byggistigunum í kampusætlanini.

Lon 4 kundi komið inn í myndina aftrat ella í staðin fyri Skansastovu, ið er minni bygningur. Hugsandi er, at til ber at hýsa bridge, talvi, golfsimulatori, dart v.m. í lon 4.

f) Mælt verður til at kanna møguleikarnar við Lon 4 nærri.

**Gamli musikkskúlin á Frúutrøð** 1
Viðgerðin hevur fevnt um:
- Fyribils býarsavn

Í løtuni verður fyrireikað íbúðarætlan saman við Bústøðum (mál 18/00950 íbúða-rbygging á Frúutrøð). Um hetta skuldi komið í drag, er møguleiki, at bygningurin eitt tíðarskeið hýsir Tórshavnar býarsavni at brúka til framsýningar og skrivstovuhald v.m. GHM hevur leigumál á ovaru hæddini og skal ein loysn finnast til teirra í næstum.

g) Mælt verður til at hava henda møguleika opnan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja:
a) At 4-10 tilboðið hjá Skúlanum á Fløtum heldur fram í bygninginum á Landavegnum.
b) At Realskúlin, skúlin í Kongagøtu og Frk. Cohr verður dagstovnur sum samanhangandi tilboð, og at børnini í Vøggustovuni Stella Maris flyta higar
c) At NámX flytur í Argja skúla tó eftir, at Dagstovnurin á Argjum er liðugt bygdur
d) At um og tá NámX flytur út á Argir, so flytur frítíðarskúlin Smílibýlið í Eysturskúlan og forskúlatilboð verður skipað
e) At Skansastova verður at leigað út til frítíðarfelagsskapir
f) At møguleikarnir fyri at brúka Lon 4 í venjingarskúlanum til frítíðarvirksemi verða kannaðir
g) At møguleikin at brúka gamla musikkskúlabygningin á Frúutrøð til fyribils býarsavn, verður hildin opin alt eftir, hvussu íbúðarætlanin verður realiserað.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Umrøtt
Mentamálanevndin 24. juni 2019: Samtykt at taka undir við a) at 4-10 tilboðið hjá Skúlanum á Fløtum heldur fram í bygninginum á Landavegnum. Samtykt at taka undir við b) tó soleiðis, at Realskúlin, skúlin í Kongagøtu og Frk. Cohr verður dagstovnur sum samanhangandi tilboð. Samtykt at taka undir við f) at møguleikarnir fyri at brúka Lon 4 í venjingarskúlanum til frítíðarvirksemi verða kannaðir.

Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, taka undir við c) at NámX flytur í Argja skúla tó eftir, at Dagstovnurin á Argjum er liðugt bygdur og d) at tá NámX flytur út á Argir, so flytur frítíðarskúlin Smílibýlið í Eysturskúlan og forskúlatilboð verður skipað.

Ein minniluti, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam, taka ikki undir við c) og d).

Ein minniluti, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam, mælir til at gamli musikkskúlin Frúutrøð verður dagstovnur.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Ískoyti**
Víst verður til tilmæli til undanfarna mentamálanevndarfund 17. Juni 2019. Á fundinum var støða ikki tikin til pkt. e) og pkt. g).

Mett verður hóskandi at fáa avklárað hesi mál um somu leið sum hini vera viðgjørd í fíggjarnevndini.

Viðv. pkt. g).
Mett verður neyðugt at kanna neyvari og fáa meting um, hvussu Býarsavnið, ið hevur átrokandi tørv á hølisumstøðum (bæði skrivstovu & framsýning) í einum fyribils tíðarskeiði kundi húsast har, meðan íbúðarætlanin verður fyrireikað.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at gera kanning av fyritreytunum fyri, at Býarsavnið fyribils kann húsast í bygninginum á Frúutrøð 1 og, um samtykt í fíggjarnevndini, leggja málið aftur fyri nevnd í oktober.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bjørghild Djurhuus, samtykti at taka undir við tilmælinum og punkt e og g í tilmælinum til fundin 24. juni 2019 og beina málið í fíggjarnevndina.

Meirilutin ynskir at umsitingin kannar fyritreytirnar fyri at ogna sær Nólsoyarstovu til býarsavn.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, stemmar blankt.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Eini meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við Mentamálanevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við Mentamálanevndini og krevur málið fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson, býráðslimur og Helena Dam á Neystabø, býráðslimur krevja málið fyri býráðið.
Býráðsfundur 26. september 2019: Broytingaruppskot frá Gunvør Balle um at beina málið aftur í mentamálanevndina, ið bleiv einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 28. oktober 2019:** Nevndin samtykti at:

- 4-10 tilboðið hjá Skúlanum á Fløtum heldur fram í bygninginum við Landavegin,
- Realskúlin, skúlin í Kongagøtu og húsini hjá Frk. Cohr verður dagstovnur sum samanhangandi tilboð,
- Argja skúli verður tillagaður til fyribils dagstovn í sambandi við, at nýggjur dagstovnur á Argjum verður bygdur,
- Skansastova og Lon 4 í Venjingarskúlanum verður leigað út til frítíðarvirksemi, og at umsitingin til næsta fund leggur fram uppskot til, hvat virksemi kann húsast har, og
- at møguleikin at brúka gamla musikkskúlabygningin á Frúutrøð til fyribils býarsavn, verður hildin opin alt eftir, hvussu íbúðarætlanin verður realiserað,

og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Begun Kass, Gunvør Balle og Heðin Mortensen, tekur undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at viðv. Argja skúla er svimjihøllin og fimleikarahøllin ikki fevnt av ætlaðu broytingunum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøddi blankt.

**Ískoyti**
Viðv. møguleikum fyri frítíðarvirksemi í Skansastovu

**Verandi hølir**: (sí hjáløgdu tekning)
Loftshædd býtt upp í fleiri smærri høli
Miðhædd býtt upp í fleiri smærri høli, umframt WC.
Veghædd býtt upp í eitt størri rúm, umframt fleiri heilt smærri rúm íroknað WC.

**Bygningsstøðan**:
Um nýtt virksemi av almannagagnligum slag kemur í bygningin og sum krevur ymsar umbyggingar má roknast við at ymisk krøv í BK17 vera gjørd galdandi av byggivaldinum.

Umsitingin er í holt við at gera eina byggifakliga meting um málið, ið kann fyriliggja til komandi fund.

- Felagsskapir, ið hava sýnt áhuga fyri virksemi í Skansastovu ella kundu verið aktuellir til tað:

**Lions Club Tórshavn/Lions Club Liljan**
Viðm.: Ynskja sær høli á loftinum og vilja samstundis lata fara leigumálið á loftinum í Mullers Pakkhúsi. Teirra verkætlan inniber eina umbygging av loftinum m.a. at umskifta skilaveggir, gera minni køk, umframt ves. Í felagnum eru limir, sum í stóran mun kunnu standa fyri arbeiðinum sjálvir.

**Tøkum lætt**
Viðm.: Hevur avmarkað dansivirksemi í kjallarahæddini. Er serliga sunnukvøld umleið 40 vikur um árið, men ynskir sær møguleika fyri fleiri tíðum. Virksemi hevur inntil á sumri deilt brúkið av rúminum við virksemi hjá rútmisku deild á musikkskúlanum. Sí hjálagt umsókn frá felagnum. Mál 16/01390 - Andreas Sigurstein: Áheitan vegna Dansifelagið Tøkum Lætt at hjálpa teimum við hølisviðurskiftunum.

**Mentón/Føroya tónleikarafelag**
Ynskja at hava venjingarhøli og verkætlanarhøli í bygninginum sum heild. Hetta virksemi vil hava týðandi ávirkan á annað virksemi, tí bygningurin er als ikki ljóðtættur millum hæddir og rúm. Umsøkjarin ynskir allan bygningin, men møguliga kundi virksemi verið í kjallaranum og miðhæddini um so er, at brúkararnir í húsinum avtala, nær tónleikavirksemi er og ikki. Sí hjálagt umsókn frá felagnum. Mál 19/02066 - Mentón og Føroya Tónleikarafelag: Umsókn um venjingarhøli í Skansastovu.

**MC felagið**
Ynskir at hava atgongd til felags virksemi. Møguliga kundi tað verið kombinerað við Tøkum lætt í kjallaranum, men er ikki upplagdur møguleiki eisini tá atlit skal takast til, hvar limir seta súkklurnar. Sí hjálagt umsókn frá felagnum. Mál 19/01209 - Páll Johan Jarnfoss: Umsókn um lendi til virksemi hjá MC Vinum.

**Bridgehúsfelagið**
Sbrt. samtykt í máli 16/01316 – Vegna nevndina í Brigdehúsinum Pól E. Egholm: Umbøn um fund viðvíkjandi Brigdehúsinum í Gundadali, hava samráðingar verið við felagið um at yvirtaka ognina hjá felagnum í Gundadali. Eitt hugskot kundi verið at latið teimum miðhæddina í Skansastovu til teirra virksemi. Eins og við loftinum vil tað innibera umvælingar- og umbyggingar, herundir at broyta innirætting, betra um vesiviðurskiftini, gera minni køk, betra um atkomu við meiri. Alt eftir hvussu hvør semjan verður við felagið, kann roknast við ávísum útreiðslum fyri TK av hesum.

**Samanumtikið viðv. Skansastovu**
Sum sæst omanfyri er áhugin fyri bygninginum størri enn tað letur seg gera at eftirlíka. Roknast skal eisini við útreiðslum til ávísar dagføringar í bygninginum eisini til at fáa bygningin góðkendan til nýtt virksemi av hesum slag. Parkeringsviðurskifti á matrikklinum eru avbjóðandi, men parkeringsøki eru í nánd.

Viðv. møguleikum fyri frítíðarvirksemi í Lon 4 á Frælsinum

Verandi hølir: (sí hjáløgdu tekningar).

**Veghæddin hevur hesi høli:**
- 3 flokkstovur
- Bókasavnshøli (svarandi til uml. 2 flokkstovur)
- Hølið í millum bókasavnshøli og starvsfólkastovuna við klæðnarúmi + - 2 WC
- Starvsfólkastova (svarandi til uml. 2 flokksstovur) + køkur.
- Minni skrivstova
- Stór long ljós gongd
- Skrivstova + minni skrivstova + gongd (ca. 1/2 skúlastova)
- Hinumegin inngongdina: 3 smærri skrivstovur + WC

**Kjallarahæddin:**
- Hinumegin inngongdina: 3 smærri skrivstovur + WC
- Bókagoymsla (svarandi til uml. 2 flokksstovur)
- Goymsla (svarandi til uml. 2 flokksstovur)
- Gongir

umframt ventilatiónsrúm o.a.

**Bygningsstøðan:**
Um nýtt virksemi av almannagagnligum slag kemur í bygningin verður í høvuðsheitum ikki rokna við stórvegis krøvum í mun til byggilóggávuna. Samstundis er greitt at bygningurin fer at krevja ábøtur eins og aðrir og verður her helst serliga aktuelt at skifta vindeygu innan nøkur ár, umframt at drena betri framvið pørtum av bygninginum og at fugtumvæla partar av kjallaranum. Hinvegin eru p-viðurskiftini í økinum heilt góð til hesi virksemi sum í høvuðsheitum eru seinnaparts- og kvøldarvirksemir.

Umsitingin er í holt við at gera eina byggifakliga meting um málið, ið kann fyriliggja til komandi fund.

Verða nýggj virksemi skipað í bygninginum, so verður at taka hædd fyri, at bygningurin er partur av kampusætlanini, ið Mentamálaráðið, kommunan og Fróðskaparsetrið hava arbeitt við. Hetta merkir, at kommunan má sleppa úr leigumálum smidliga, tá tað gerst neyðugt.

- Felagsskapir, ið kundu verið aktuellir til virksemi í Lon 4:

**Lions Club Tórshavn/Lions Club Liljan**
Í staðin fyri Skansastovu hevði Lions Club ístaðin kunna fingið t.d. eina flokkstovu + part av skrivstovuhølum í Lon 4 ella fingið skrivstovuøkið burturav. Hetta vil ikki innbera stórvegis inntriv í bygningin. Hetta er treytað av at virksemi brúkar felags hentleikar. Lions Club hevur søkt um høli í Skansastovu.

**Tøkum lætt**
Um trægólv var lagt á eina av skúlastovunum vildi virksemi lættliga kunna verið staðsett har. Samstundis kundu hølini verið brúkt til annað virksemi hjá Kvøldskúlanum v.m. aðrar tíðir tá tað ikki verður dansað. Virksemi fær atgongd til felags hentleikar.

**Bridgehúsfelagið**
Sbrt. samtykt í máli 16/01316 Vegna nevndina í Bridgehúsinum Pól E. Egholm : Umbøn um fund viðvíkjandi Brigdehúsinum í Gundadali hava samráðingar verið við felagið um at yvirtaka ognina hjá felagnum í Gundadali. Eitt hugskot kundi verið at latið teimum bókasavnshøli í Lon 4, samansett við felags nýtslu av køki við annað felag, umframt felags ves við annað virksemi. Krevur bæð smærri tillagingar. Harumframt kundi avtala verið gjørd við felagið um ávísar møguleikar fyri at annað virksemi kann brúka teirra hølir sbrt. avtalu.

**Havnar telvingafelag**

Sbrt. samtykt í máli 17/00846 Hølisviðurskifti o.a. – Havnar Telvingafelag hava samráðingar verið við felagið um útvega teimum eina hóskandi framtíðar hølisloysn. Starvsfólkastovan í Lon 4 saman við atgongd til aðrar hentleikar kundi verið eitt gott boð uppá loysn fyri felagið. Harumframt kundi avtala verið gjørd við felagið um ávísar møguleikar fyri at annað virksemi kann brúka teirra hølir sbrt. avtalu.

Alt eftir hvussu hølini verða útlutaði ber helst eisini til at hýsa hesum virksemi í fyrsta umfari ella í einum seinna umfari, alt eftir um og nær kjallarin verður tikin í nýtslu heilt ella lutvíst:

**Listgrafo**
Sbrt. samtykt í máli 17/01361 Listaverkstøð í Finsen er enn óloyst hvar felagið kann vera. Ein loysn er viðv. evningsstovuni í Finsen og onnur kundi verið antin í flokksstovu á veghæddini í Lon 4 ella í kjallaranum.

**Havnar Dartfelag**
Er pt. í leigaðum hølum (sí mál 17/04244 – Havnar dartfelag - hølisviðurskifti). felagið kundi verið ávíst til eina flokksstovu á veghæddini ella annað av størru rúmunum í kjallaranum.

**Argja Dart**
Er í leigaðum hølum og gott at fingið kanna eina loysn, ið lutvíst var saman við Havnar dartfelag. Mál 18/01692 Argja Dartfelag: Hølisviðurskifti v.m.

**Tórshavnar Golfklubbi - golfsimulator**
Manglar høli. Verkætlanin í Bacalao lat seg ikki gera og kundi t.d. fingið ávíst antin eina flokksstovu á veghæddini ella loysn í kjallaranum. Mál 18/02547 Jógvan Amonsson : Umsókn vegna Tórshavnar Golffelag um rakstrarstuðul til at húsa innanhýsis golfvenjingum.

**Mentón/Føroya tónleikarafelag**
Eins og lýst viðv. Skansastovu er ikki so líkatil at fáa slíkt virksemi sameint við annað virksemi, tó kundi borið til at innrætta nøkur smærri høli í skrivstovunum við inngongdina á veghæddini og niðri undir. Hetta krevur umvælingararbeiðið, herundir ljóðbjálving so nærumhvørvið ikki verður órógva og inni í bygninginum.

**MC felagið**
Kundi evt. fingið lutvísan brúksrætt til onkur av hølunum. Krevur nærri metingar.

Harumframt er annað virksemi sum helst eisini kundi komið uppá tal.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at fara undir samráðingar um leiguavtalur við fylgjandi felagsskapir í fyrsta umfari:
- Lions Club Tórshavn/Lions Club Liljan viðvíkjandi Skansastovu
- Tøkum lætt viðvíkjandi Skansastovu
- Bridgehúsfelagið viðvíkjandi antin Skansastovu ella Lon 4
- Havnar telvingafelag viðvíkjandi antin Skansastovu ella Lon 4
- Havnar dartfelag viðvíkjandi Lon 4
- Listgrafo viðvíkjandi Lon 4

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. november 2019:** Nevndin samtykkir at fara undir samráðingar við nevndu frítíðarfelagsskapir um møguleikar fyri at húsast í annaðhvørt Lon 4 ella Skansastovu, og at fáa kannað, hvat mettur kostnaðurin er fyri at gera Skansastovu í stand sambært krøvum, og hvat mett søluvirði av bygninginum er – at leggja aftur fyri nevndina.

**Ískoyti:**

**Viðv. Musikkskúlabygninginum á Frúutrøð 1**
Vísandi til samtykt 28. okt. 2019 í mentamálanevndini og 30. oktober 2019 í fíggjarnevndini viðv. at møguleikin at brúka gamla musikkskúlabygningin á Frúutrøð til fyribils býarsavn, hevur umsitingin saman við Tórshavnar býarsavni, arbeitt við at lýsa møguleikarnar. Sí hjálagt ávegis frágreiðing frá Býarsavninum um ymiskar hættir at fremja verkætlanina uppá.

Húsaumsitingin fer síðani ætlandi saman við ráðgeva at meta nærri byggifakliga um uppskotini og við støði í tí verður gjørt eitt samlað tilmæli um savns- og bygningsviðurskiftini til nevndarviðgerð í vár. Talan kann vera um eina røð av broytingum, summar kunnu helst gerast innan játtanina hjá Húsaumsitingini, meðan onnur meiri týðandi átøk vilja krevja serstaka løgujáttan.

Samstundis er semja um, at ein komandi framsýning hjá Býarsavninum v.fl. í sambandi við at tað í mai 2020 eru 75 ár síðani endan av hersetingini av Føroyum, hóskandi eigur at vera í hølunum á Frúutrøð 1. Húsaumsitingini kemur ætlandi at gera nakrar smærri tillagingar í bygninginum soleiðis at har eru nøkulunda umstøður til ta framsýningina, eitt nú atkoma fyri rørslutarnað o.a. Tær tillagingarnar vera gjørdar innanfyri raksturin á Húsaumsitingini.

Sí eisini umsókn frá Býarsavninum í sambandi við framsýningina: Mál 19/05025 Havnin undir krígnum, ið eisini er á skrá til fundin.

Á loftinum hevur GHM síni felags- og venjingarhøli. Ætlanin er, at tey hald fram har so leingi eingin onnur nøktandi hølisloysn til teirra er funnin. Aftrat á loftinum eru onnur smá høli, sum við tillagingum kunnu gerast til skrivstovupláss. Sambært viðmerking frá býarsavninum ber ikki til at samantvinna ymiskt virksemi í bygninginum, soleiðis at aðrir brúkarar eisini hava sína gongd í húsinum.

**Læknahølini í Frúutrøð**
Ongar viðtalur eru longur í bygninginum og bygningurin tí tøkur til onnur endamál.

Møguleiki er at skipa hølini sum fyribils skrivstovur hjá eindarleiðarunum á dagstovnaøkinum, sum byrja í starvi 1. februar 2020. Í løtuni er eingin onnur skrivstovuloysn til eindarleiðararnar. Verður hetta ein meira varandi loysn, eiga ávísar tillagingar at verða gjørdar í innrætting.

Kommunan skal veita Gigni høli til smábarnavirksemið. Møguliga kann hetta skipast í bygninginum um so er, at bygningurin kann brúkast til endamál í longri áramál. Metast má, at Gigni tá vildi verið einasti brúkarin í bygninginum. Skal henda ætlan setast í verk, verður neyðugt at gera ætlan um innrætting v.m. og fígging fáast til endamálið.

**Viðv. skúlabygningunum á Frælsinum (samogn TK og landið)**
Í sambandi við viðgerðina á fundinum í mentamálanevndini 13. mai 2019 var í triðja reglubrotið skrivað: "Talan er í høvuðsheitum um skúlabygningar, sum knýta seg til verandi virksemið hjá Musikkskúlanum og Skúlanum á Fløtum, tó ikki Venjingarskúlan (Skúlaeindin á Frælsinum hjá Skúlanum á Fløtum), sum ætlandi verður avhendaður Mentamálaráðnum í sambandi við kampusætlanina."

Í yvirlýsing dagf. 29. apríl 2019 frá táverandi landsstýriskvinnu í mentamálum og borgarstjóranum varð avtalað, at partarnir gera fíggjarliga uppgerð yvir felagsognirnar á Frælsinum við tí endamáli, at kommunan avhendar landinum ognirnar í 2020.

Sum liður i hesum hevur kommunan skotið upp gerðabýti soleiðis, at kommunan fær til ognar lendi til bygging í Stjórutjørn. Hesar samráðingar eru ikki lidnar, hetta eitt nú av, at nýtt landsstýri er skipað, men gongd er í málinum.

Rakstrarviðurskiftini í samognini og lutvíst í Lon 4 eru skipaði við hjálagda sáttmála um býtið av felagsútreiðslum á Føroya læraraskúla og venjingarskúlanum frá 1992, tó so at sbrt. samskifti og praksis síðani, verður økið umsitið nakað øðrvísi enn ásett her.

Pt. verður avroknað uml. 1800 tkr./árið við Setrið fyri samognarraksturin umvegis rakstrarjáttanina hjá Skúlanum á Fløtum. Hartil hava verið onkrar útreiðslur gjøgnum árini innan bygningsviðlíkahald.

Ætlandi flytur Skúlin á Fløtum í nýggja bygningin á Fløtum í august 2020. Í hesum sambandi hevur Setrið spurt, um hvussu verður víðari í bygningunum á Frælsinum, tí tað er viðkomandi í mun til m.a. reingerðarfólk v.m., ið eru í føstum starvi og eru m.a. lønt av fíggingini gjøgnum Skúlan á Fløtum. Í flestu førum er talan um 6 mánaðar uppsagnarfreist. Ikki er roknað við at Skúlin á Fløtum framhaldandi skal rinda til Setrið fyri samrakstur eftir at skúlin er fluttur á

Á fundinum í mentamálanevndini 15. januar 2020 eru mál (bæði í hesum máli og í máli viðv. sernámsfrøðiliga økinum) sum viðvíkja nýggjum kommunalum virksemi í bygningunum á Frælsinum.

Mett verður tí hóskandi, at kommunan tekur upp samskifti við Setrið/landsstýrið um framtíðar rakstrarviðurskifti og avtalum tí viðvíkjandi, og soleiðis at Setrið kann gera av, hvussu verður við reingerðarfólki, húsavørðum v.m. Hetta hevur eisini týdning viðvíkjandi møguligari nýggjari fígging frá kommununi eftir summarið rakstur.

Mett verður eisini skilagott, at partarnir í sama sambandi samskipa møguliga nýggja nýtslu av bygningunum í tilgongdini at broyta ognarviðurskiftini annars. Hædd eigur eisini at takast fyri, at stórvegis íløgur eru ikki gjørdar í bygningsstandin síðstu árini, og at nýggj nýtsla kann hava við sær fíggjartørv til bygningsábøtur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a) at umsitingin heldur á við fyrireikingunum viðv. framtíðar brúki av bygninginum á Frúutrøð 1 til Býarsavn

b) at heita á fíggjarnevndina um at samtykkja at virksemi hjá Tórshavnar býarsavni ísv. framsýningina ‘Havnin undir krígnum’ kann vera staðsett á Frúutrøð 1 frá á várið 2020 til á heystið 2020.

c) at eindarleiðararnir á dagstovnaøkinum fyri fyrst hava skrivstovur í læknaviðtalunum í Frúutrøð, og at tað verður nærri kannað, um og hvussu smábarnavirksemið hjá Gigni kann skipast har, tá onnur loysn er funnin til eindarleiðararnar

d) at samtykkja at fara undir samráðingar við setrið og landsstýrið um omanfyri nevndu viðurskifti.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, heldur fast í at Frúutrøð verður brúkt til dagstovn og at Gigni fær fremstu raðfesting í mun til læknaviðtaluhølini á Frúutrøð og at endalig og varandi loysn verður funnin til býarsavnið. Minnilutin tekur undir við punkt d).

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í Mentamálanevndini.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndr Sigurðsson, tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini, við tí ískoyti, at Býarsavnið fyribils verður staðsett á Frúutrøð.

**Ískoyti:**
Samtyktirnar á fundinum 15. januar 2020 í mentamálanevndini og í fíggjarnevndini 22. januar 2020 eru undir útinning.

Av tí at samráðingar nú eru ávegis við landsstýrið um lon 4 á Frælsinum, verður mett hóskandi at endurskoða ætlanina viðv. møguligum frítíðarfelagsskapum í lon 4, ið annars var samtykt í mentamálanevndini 27. november 2020.

Viðv. skúlabygningunum á Argjavegi (gamli Argja skúli), so mælir Húsaumsitingin til at taka bygningin niður, tá avtalan við AA-felagsskapirnar gongur út í 2022. Sæð verður tí eisini burtur frá at lata fleiri felagsskapum høli har nú.

Vísandi til tilmæli í máli 19/01794 Høvuðsumvæling av dagstovninum á Argjum, matr. Nr. 4 bq, Argir og vísandi til samtykt í mentamálanevndini 28. oktober 2019 og í fíggjarnevndini 30. oktober 2019 viðv. Argja skúla, verður mett hóskandi at endurskoða ætlanirnar fyri fyrrv. Argja skúla (skúlabygningarnir á Argjavegi) og heldur at nýta bygningarnar har til annað endamál og sum ikki krevur stórvegis ábøtur í fyrstu atløgu. Sí eisini tilmæli í máli 18/04396 Eftirmeting av sernámsfrøðiliga økinum í fólkaskúlunum.

A. Viðv. Skansastovu
Viðv. MC-felagnum
Sbrt. samtykt í býráðnum 27. februar. – í máli 19/01209 Umsókn frá MC-felagnum um at leiga part av øki matr. 1112, Tórshavn (mál 19/01209) er teirra umsókn viðv. Skansastovu ikki viðkomandi longur.

<u>Bygningsfaklig meting viðv. Skansastovu</u>
Húsaumsitingin hevur yvirskipað mett um málið og metir at neyðugar umvælingar koma at kosta umleið 2. mio.kr. Hóast leiguavtalur verða gjørdar við felagsskapir um høli í Skansastovu nú, so má metast má, at hesar umvælingar mugu verða byrjaðar ella gjørdar, áðrenn flutt verður inn í 2021, um játtan fæst til endamálið.

<u>Meting um felagsskapir, ið kundu verið hýstir í Skansastovu</u>
Um neyðugu umvælingarnar kunnu vera gjørdar, kundi verið farið í samráðingar við fylgjandi felagsskapir um virksemi í húsinum:
- á 2. hædd: Lions Club Tórshavn og Lions Club Liljan
- á 1. hædd: Havnar dartfelag
- á 0. hædd: Tøkum lætt sum høvuðsvirksemi, sett saman við ávísum dagvirksemi hjá Mentón/Føroya tónleikarafelag, sum tó skal tillaga virksemið til, at tað ikki órógvar annað virksemi í húsinum.
Umframt at dartfelagið og Lions feløgini kundu lænt hølini til serlig høvi.

B. Viðv. Finsen – evningsstovan
<u>Meting um felagsskapir, ið kundu verið hýstir í Finsen</u>
- Evningsstovan: Havnar telvingarfelag

Tilber at flyta virksemi inn í hølini uttan stórvegis tillagingar og kostna. Tilber at gera leigusáttmála, ið fær gildi á heysti 2020.

C. Argja skúli (nýggjari)
<u>Meting um felagsskapir, ið kundu verið hýstir í nýggja skúlabygningunum</u>
4-10 skúlatilboðið hjá Skúlanum á Fløtum (sí mál 18/04396 Eftirmeting av sernámsfrøðiliga økinum í fólkaskúlunum).
Harumframt Argja dart, Bridgehúsfelagið og Listgrafo. Hvørjar stovur, talan kann vera um, kann nágreinast, men støddirnar eru nøktandi. Atgongd til ves í felagsøkinum. Neyðugt verður at gera grundleggjandi hentleikar til gerð av kaffi v.m. Sí hjálagt tekningar og rúmyvirlit yvir bygningin.

Annars er ikki neyðugt við stórvegis tillagingum fyri at kunna hýsa hesum felagsskapum og vónandi ber til í ávísan mu at feløgini sjálvi standa fyri tí. Til ber at gera leigusáttmálar, ið fáa gildi á heysti 2020. Samstundis sum møguligur leigusáttmáli verður gjørdur við Brigdehúsfelagið verður gjørd semja um uppathald av leigumálinum, har verandi brigdehúsið stendur.

D. Viðv. skúlabygninginum á Landsvegnum

Um avgjørt verður at flyta 4-10 tilboð út á Argir, letur tað upp fyri, at annað virksemi kann fara í bygningin á Landsvegnum. Her kundi t.d. verið talan um Gigni (sí mál 19/01965 Gigni : Framtíðar hølisviðurskifti í Tórshavnar kommunu). Hetta kevur tó eina neyvari bygningsfakliga meting. Møguliga kann hetta vera saman við Bridgehúsfelagnum og/ella onkur skrivstovutørvur hjá minni eind í kommununi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um:
a). at fara undir samráðingar við
i). Lions Clubb Tórshavn og Lions Club Liljan um leigusáttmála um 2. hædd.
ii). Havnar dartfelag um 1. hædd.
iii). Tøkum lætt um leigusáttmála um 0. hædd, men við treyt at Mentón/Føroya tónleikarafelag fær ávísan brúksrætt til dagvirksemi har, umframt at dartfelagið og Lions feløgini skulu kunna læna hølini til serlig høvi.
b). at fara undir samráðingar við Havnar telvingarfelag um leigusáttmála um evningsstovuna í Finsen.
c). at fara undir samráðingar við Argja dart um leigusáttmála um ávíst høli í nýggja skúlabygninginum á Argjum.
d). at fara undir samráðingar við Brigdehúsfelagið um leigusáttmála um ávís høli í nýggja skúlabygninginum á Argjum, ið eisini inniber eina semju um uppathald av leigusáttmálanum um lendi í Gundadali har verandi brigdehús stendur
e). at fara undir samráðingar við Listgrafo um leigusáttmála um ávís høli í nýggja skúlabygninginum á Argjum.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2020:** Nevndin samtykti at taka undir við A1) og A3), B og E í tilmælinum.

Viðvíkjandi A2), C og D verður at taka upp á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020**: Ein samd nevnd tekur undir við mentamálanevndini við teirri broyting viðvíkjandi punkt A3, at leiguavtalur skulu gerast við Tøkum lætt, Lions Club Tórshavn og Lions Club Liljan viðvíkjandi felagshølum í Skansastovu uttan treyt um brúksrætt til tónleikafelagsskapir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur harumframt undir við pkt. c í tilmælinum.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.


**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.


**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Ískoyti**:
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020, er umsitingin í samráðingum við fylgjandi feløg:
- Havnar telvingarfelag
- Tøkum lætt
- Lions club Tórshavn & Liljan

Feløgini hava fingið uppskot til sáttmálar. Greitt verður frá meginreglum fyri ásetan av fermetraleigu og gjald fyri el&hita. Endaligt tilmæli kemur til komandi fund.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Við støði í samtyktini í málinum hjá fíggjarnevndini 20. mai 2020 og umrøðuni í mentamálanevndini 10. juni 2020, hevur umsitingin verið í samráðingum við fylgjandi feløg:

Viðv. Tøkum lætt
Skotið verður upp at gera 5 ára leigusáttmála við Tøkum lætt um veghæddina í Skansastovu. Mánaðarliga gjaldið er 1200 kr., umframt ljós og hita mett til umleið 1000 kr./mánaðin.

Viðv. møguligum samvirknaði og brúksmøguleika til Mentón/Føroya tónleikarafelag er tað ikki tikið við sbrt. samtyktini í fíggjarnevndini.

Sum greitt frá í málinum 10. Juni 2020, so er neyðugt at raðfesta høvuðsumvæling av bygninginum í 2021 ella eftir tað. Hetta nýtist ikki hindrað, at Tøkum lætt heldur á við sínum virksemi fyribils. Um felagið fær leigusáttmála fer brúksavtalan hjá felagnum frá 2016 samstundis úr gildi.

Sí hjálagt uppskot til leigusáttmála.

Viðv. Lions club Tórshavn og Lions club Liljan
Tilmæli er ávegis.

Viðv. Havnar telvingafelag
Tilmæli er ávegis.

Viðv. Listgrafo
Tilgongdin viðv. leigusáttmála við Listgrafo á Argja skúla er ikki liðug enn. Felagið ynskir sær evningsstovuna í Finsen sum við hesum tilmæli verður skotið upp at lata til Havnar telvingarfelag.

4-10 tilboðið
4.10 heldur til í Gula skúla við Landavegin (Skúlin á Fløtum – Eindin við Landavegin). Nú Skúlin á Fløtum flytur úr skúlabygninginum á Argjum, verður mælt til, at 4-10 tilboðið flytur í nýggjara partin av Argja skúla. Hetta gevur tilboðnum betri hølisumstøður og møguleika fyri, at næmingatalið í tilboðnum kann verða hægri. Hetta skúlaárið eru 29 næmingar í tilboðnum, og mett verður, at um tilboðið flytur úr bygningin á Argjum, kann næmingatalið so líðandi hækkað til uml. 50 næmingar.

Tað ber væl til at sameina skúlavirksemið við, at frítíðarfelagsskapir kunnu fáa høli í bygninginum eisini, og at frítíðarvirksemi kann vera har eftir skúlatíð.

Skúlin á Fløtum fer framhaldandi at umsita svimjihylin. Skúlin á Argjahamri og Skúlin á Fløtum hava undirvísing í svimjihylinum, haraftrat hevur Skúlin á Trøðni tímar, og Havnar Svimjifelag hevur tíðir til venjing har.

Víst verður til, at tað hevur verið umrøtt at tillaga nýggjara partin av Argja skúla til dagstovn, soleiðis at Dagstovnurin á Argjum kann flyta hagar, meðan dagstovnurin verður umvældur. Henda ætlan ber ikki til, um 4-10 flytur í Argja skúla.

**Tilmæli:**
A.
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um at gera 4,5 ára leigusáttmála við:

a). Tøkum lætt

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

B.
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at 4-10 tilboðið flytur í part av nýggjara Argja skúla, tá flutt verður í nýggja bygningin á Fløtum.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. juni 2020:** Samtykt at taka undir við a) og beina málið í fíggjarnevndina. Eisini samtykt at taka undir við b) og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja at gera 4,5 ára leigusáttmála við Havnar Telvingarfelag viðvíkjandi hølum í Finsen. Mánaðarliga gjaldið íroknað el&hita er 2.500 kr.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn, tekur undir við tilmælinum um at gera sáttmála við Havnar Telvingarfelag og harumframt samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og viðvíkjandi pkt. b at beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið samráðingum við Lions Club Tórshavn um sáttmála, ið eisini fevnir um Lions Club Liljan. Sí hjálagt úrslit. Sáttmálin inniber at felagið fráfellir galdandi leigusáttmála um ovastu hædd í Mullers pakkhúsi og fær møguleika at leiga ovastu hædd í Skansastovu í staðin. Í samráð við Húsaumsitingina fer felagsskapurin at gera ymisk arbeiði har og skal tí afturfyri ikki rinda húsaleigu fyrstu 3 árini, men rindar annars fyri el&hita.

**Tilmæli:**
Leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um at innganga hjálagda leigusáttmála við Lions Club Tórshavn, ið er galdandi frá 1. september 2020 til 30. juni 2025.

**Mentamálanevndin 24. august 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. august 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**

Viðv. møguligum feløgum og virksemi í skúlabygninginum á Argjavegi

Viðv. Argja dart
Felagið hevur latið uppskot til innrætting í skúlabygninginum á Argjavegi. Sí hjálagt tekningar. Áðrenn endalig støða kann takast til leigumál er neyðugt at viðgera tað saman við skúlanum, Húsaumsitingini og byggivaldinum. Talan er um 2 hølir, ið burturav skulu brúkast til dart og 2 sum eru felags nýtsla saman við skúlanum v.m.

Viðv. Listgrafo
Felagið hevur vitjað í skúlabygninginum á Argjavegi, men sýnir tí ikki serligan áhuga, men vil heldur vera í Gula skúla. Bíðað verður eftir nærri uppleggi frá felagnum.

Viðv. møguligum feløgum og virksemi í Gula skúla

Í summar hava fylgjandi feløg og stovnur vitjað í Gula skúla á Landavegnum við atliti til møgulig leigumál har:

a). Bridgehúsfelagið
b). Listgrafo
c). Gigni

Brigdehúsfelagið ynskir sum útgangsstøði allan bygningin. Listgrafo sýndi eisini stóran áhuga fyri bygninginum, men er ikki komið við uppskoti enn. Gigni ynskir somuleiðis fegin at fáa at kalla allan bygningin, men vildi verið hugsandi at tað bar til at sameind at havt Gigni og t.d. Listgrafo í Gula skúla.

Virksemi hjá Gigni krevur tó helst broytingar og umvælingar. Umsitingin hevði upprunaliga sum mál at vita um tað bar til at sameina minst 2 virksemir í bygninginum. Umsitingin greiðir nærri frá viðurskiftunum á fundinum.

Greitt tykist tó at tað verður torført at fáa sameint hesi ymisku ynskini og tí kundi ein loysn verið ístaðin at gjørt avtalu um endurgjald til Brigdehúsfelagið sum tey so kunnu brúka til at útvega aðra hølisloysn og sjálvi ráða yvir.

---

Miðhæddin í Skansastovu er enn ikki løgd av til ávíst virksemi.

Viðv. Tórshavnar býarsavni á Frúutrøð 1
Tórshavnar býarsavn hevur nú havt virksemi í nakrar mánaðir í bygninginum á Frúutrøð 1. Sum heild hevur tað eydnast væl. Mælt verður til at staðfesta at savnið heldur fram har. Neyðugt verður at gera tillagingar í bygninginum og kemur tilmæli um tað til komandi fund. Ikki er endaliga greitt viðv. virkseminum hjá GHM á loftinum í bygninginum. Inntil nærri er avklárað heldur virksemið fram har.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um:

a). at fara í endaligar samráðingar við Argja dart um leigusáttmála við støði í uppskotinum til innrættan, tó soleiðis at neyðug samnýtsla er við skúlan.
b). at fáa greinað um tað ber til at sameina virksemi hjá Gigni og Listgrafo í Gula skúla og fyritreytirnar fyri tí.
c). at Tórshavnar býarsavn fær bygningin á Frúutrøð 1 til býarsavnsvirksemi.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina – pkt. c) at Tórshavnar býarsavn heldur fram á Frúutrøð 1 til býarsavnsvirksemi – í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Viðv. Argja dart
Umsitingin hevur viðgjørt málið neyvari við felagið, umframt við skúlaleiðsluna. Harumframt er uppskotið sent til góðkenningar hjá byggivaldinum, ið hevur góðkent broytingina.

Talan er um niðurtøku av veggi millum hølí 1.53 og hølí 1.55. Ætlanin er at felagið stendur fyri hesum í samráð við Húsaumsitingina og skúlan.

Ætlanin inniber kostnaðir á umleið xx tkr. Skotið verður upp at TK rindar xx. tkr. í stuðli til felagið at gera arbeiðið, umframt kostnað til el - og HVS-innleggjara. Hartil koma kostnaðir til lásaskipan v.m.

Samanlagt er neyðugt at játta umleið xx fyri tilfar og hesi arbeiði. Skotið verður upp at dekka tað var kontu xyx.

Mett verður hóskandi at innganga hjálagda leigusáttmála við Argja dart.

Tilmæli
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:

a). at játta xx tkr. av kontu xyz til tillagingar av hølunum 1.53 og 1.55
b). at heita á fíggjarnevndina at innganga hjálagda leigusáttmála við Argja dart.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Ískoyti**:
Havnar Dartfelag rykkir eftir eini avklároing um teirra framtíðar hølisviðurskifti.

Felagið metir at umstøðurnar í verandi hølum ikki eru haldbarar. Har eru avbjóðingar við fukti, plássi v.m.

Vísandi til málið um tøkar skúlabygningar (mál mál 19/01969) er ein møguleiki í miðhæddini í Skansastovu.

Í sofall verður neyðugt at fáa kanna fyritreytirnar fyri at felagið kann virka har, herundir kostnaðir av umvælingum og umbyggingum, umframt at felagið kannar um uppsøgn av leigumálinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til um farast skal víðari við at kanna um Havnar dart kann hava virksemi í miðhæddini í Skansastovu.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Ískoyti**:
Viðv. Argja dart í skúlabygninginum á Argjavegi

Argja dart fær væntandi skjótt byggiloyvið til avmarkaðu tillagingarnar í hølunum 1.53 og 1.55. Møguligt er at útinna neyðugu tillagingar í eini samansettari loysn við sjálvbodnum arbeiðið hjá felagnum og ískoyti frá TK til tilfar og til fakarbeiði við el, gólv v.m. á tils. 20 tkr. og kemur væntandi at vera mælt til at fíggja tað av kontu 5365 Stuðul til ítrótt.

Viðv. Havnar dart í miðhæddini í Skansastovu
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samskifti við Havnar darfelag um dartvirksemi í miðhæddini í Skansastovu. Felagið tekur principielt undir við loysnini og kann fara í holt við virksemi í komandi ári, tá ÍSF er farið úr hølunum. Felagið kemur í næstum við einum koncepti fyri innrætting og vil eisini innganga í at taka niður innveggir v.m., ið skulu burtur til at fáa eitt hóskandi ítróttahøli, umframt hjárúm. Hinvegin metir felagið ikki at tað hevur orku til at standa fyri umvælingum av gólvi, el, hita, lofti og ynskir at TK gerð tað, harumframt manglar at gera hóskandi eyka rýmingarleið. Húsaumsitingin kemur væntandi í 2021 at raðfesta gerð av rýmingarleið og at mála bygningin.

Møguligu tillagingar fyri at fáa hóskandi høli eru ikki príssettar enn, men kann lættliga vera talan um týðandi upphædd alt eftir byggimálskrøvum í mun til BK17, herundir serliga brunabjálving í mun til hinar hæddirnar. Hetta vil so krevja at neyðug játtan verður sett av í 2021 til endamálið.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða spurningin um møguliga fígging av umvæling og tillagingum av Skansastovu.

**Mentamálanevndin 16. november 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Viðv. Argja dart
Umsitingin hevur viðgjørt málið neyvari við felagið, umframt við skúlaleiðsluna. M.a. við atliti til samvirkna millum skúlavirksemi og dartvirksemi. Harumframt er uppskotið sent til góðkenningar hjá byggivaldinum, ið júst hevur góðkent umbyggingina.

Talan er um niðurtøku av veggi millum høli 1.53 og høli 1.55. Ætlanin er at felagið stendur fyri hesum í samráð við Húsaumsitingina og skúlan.

Ætlanin inniber kostnaðir á umleið 15 tkr til el-, HVS, og gólvarbeiðir. Hartil koma kostnaðir til lásaskipan v.m.

Samanlagt er neyðugt at játta umleið 20 tkr. fyri tilfar og hesi arbeiði. Skotið verður upp at dekka tað av kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum. Mett verður hóskandi at innganga hjálagda leigusáttmála við Argja dart.

Umframt leigusáttmála um høli 1.53 og 1.55 inniber avtalan ávísan brúksrætt til onnur høli í bygninginum.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at játta 20 tkr. av kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til tillagingar av hølunum 1.53 og 1.55 og
b). at heita á fíggjarnevndina at innganga hjálagda leigusáttmála við Argja dart.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti**:
Á býráðsfundi 26. november 2020 samtykti býráðið Í mál 17/01361 Listaverkstøð í Finsen at beina málið um hølisumstøður til Listgrafo aftur í mentamálanevndina (sí málið hjálagt).

Gunvør Balle, býráðslimir hevur skotið upp at kanna um tað ber til at býta um uppá ymiskt virksemi í Finsen.

Umsitingin hevur mett innleiðandi um málið, og metir at ein møgulig loysn uppá viðurskiftini er at kanna við Havnar telvingarfelag um eina alternativa loysn har felagið fær leigumál í sangstovuni í Finsen í staðin fyri núverandi leigumál í evningsstovuni, soleiðis at tað ber til at gera møguligt leigumál við Listgrafo um evningsstovuna.

Um sangstovan verður broytt til at vera høli hjá Havnar telvingarfelagi, so vil tað innibera at hølið ikki longur verður tøkt til sangvirksemi og líknandi, tó so at tað verður neyðugt at virksemi í Auluni framvegis kann brúka køkin í sangstovuni til gerð av kaffi og sum sonevnt backstage høli til tónleikarar v.m. í sambandi við framførslur í Auluni. Kannast kann við byggivaldið um til ber at gera eina hurð ímillum sangstovuna og køkin og soleiðis hava betri skilna millum funktiónirnar. Samstundis skal kannast aftur við Listgrafo um fyritreytirnar fyri listavirksemi í evningstovuni. Mett verður hóast sangstovan ikki longur verður tøk til sangvirksemi o.l. so eru fleiri aðrir møguleikar í kommununi til slíkt virksemi.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á fíggjarnevndina um at heimila umsitingini at taka upp samráðingar við Havnar telvingarfelag um at broyta leigumálið til sangstovuna og í sofall um tað ber til, at taka samráðingar við Listgrafo um møguligt leigumál í evningsstovuni í Finsen.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 07. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti**:
Viðv. Havnar telvingarfelag
Umsitingin hevur verið í samráðingum við Havnar telvingarfelag um møguleikan fyri at broyta leigumálið hjá teimum til at vera í sangstovuni í staðin. Felagið tekur við tí treytað av, at sáttmálin ikki uttan serligar grundir kann uppsigast í leigutíðarskeiðnum, umframt praktiska hjálp til flyting.

Samvirknaður við virksemi í Auluni
Fyri at tryggja at tað framhaldandi verður møguligt at kunna gera kaffi v.m. og hava backstagemøguleika til tónleikarar ísv. tiltøk í Auluni er sett í sáttmálan, at Havnar telvingarfelag má tola at mentanarhølir í

miðbýnum í avmarkaðan mun brúkar køkin í sangstovuni sbrt. nærri avtalu við felagið, umframt at mentanarhølir í miðbýnum kann hava atgongd til goymsluna, ið er á loftinum, ið er inn frá sangstovuni.

Ætlanin er at fáa sett upp ein glasvegg við hurð ímillum køkin og sangstovuna fyri at kunna hava betri skilna millum funktiónirnar. Ætlanin er treytað av góðkenning frá byggivaldinum sbrt. galdandi reglum.

Mettur kostnaður fyri glasveggin er 35 tkr., ið verður at dekka av rakstarkontu.

Sangstovan er nærum meinlík í stødd við evningsstovuna og verður tí mælt til at leiguupphæddin er tann sama. Sí hjálagt uppskot til nýggjan leigusáttmála.

Viðv. Listgrafo
Við støði í samráðingunum í 2018 við felagið er gjørt dagført uppskot. Sí hjálagt. Uppskotið inniber at felagið fær fullan ræðisrætt til evningsstovuna, men gerð samstundis avtalu við Tórshavnar kvøldskúla um at fáa listagrafisku útgerðina hjá skúlanum at brúka í leigutíðarskeiðinum t.e. 4 ár og 11 mánaðir og skal afturfyri halda 2 skeið um árið í samstarvi við kvøldskúlan. Av tí at Listgrafo ikki er at meta sum vanligt almennagagnligt felag, verður mælt til at felagið í størri mun rindar veruligu hølisútreiðslurnar. TK rindar 13.000 kr./mánaðin til Bústaðir fyri leigumálið (sangstovan, aulan og evningstovan) og má metast at evningsstovan eigur umleið 3.000 kr. av hesum. Mett verður tí hóskandi at leigukostnaðurin er 4.500 kr. um mánaðin íroknað hita&ravmagn.

Munurin millum kostnaðin fyri leigumálini til Bústaðir og inntøkurnar frá feløgunum vera í fyrstu atløgu at dekka av kontu 5312 mentanarhølir í miðbýnum, inntil nærri verður ásett.

Umsitingin hevur ikki fingið endaliga váttan frá Havnar telvingarfelag og Listgrafo um leigusáttmálarnar – tískil kunnu dagføringar koma hesum viðv. áðrenn fundin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, deildinleiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heita á fíggjarnevndina um:

a). at leigumálið við Havnar telvingarfelag verður broytt til at vera í sangstovuni í Finsen í staðin fyri í evningstovuni.

b). at inngang a leigusáttmála við listgrafo um evningsstovuna í Finsen.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini 16. des. 2020 og 2. des. 2020 viðv. Argja dart.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Kunnað varð um málið.

# 307/20 Tórsvøllur - vestursíðan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 59/16 | 16/00962-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 185/16 | 16/00962-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 244/16 | 16/00962-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 173/16 | 16/00962-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 16.06.2016 | 193/16 | 16/00962-1 |
| 6 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 76/17 | 16/00962-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 22.01.2018 | 34/18 | 16/00962-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 12/18 | 16/00962-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 23.01.2018 | 27/18 | 16/00962-1 |
| 10 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 17/18 | 16/00962-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 28.02.2018 | 79/18 | 16/00962-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 28.02.2018 | 63/18 | 16/00962-1 |
| 13 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 38/18 | 16/00962-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 258/18 | 16/00962-1 |
| 15 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 217/18 | 16/00962-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 255/18 | 16/00962-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 07.12.2020 | 334/20 | 16/00962-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 336/20 | 16/00962-1 |
| 19 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 307/20 | 16/00962-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Útsett.

**Tórsvøllur vestursíða**

Tá Tórshavnar kommuna og Fótbóltssamband Føroya í 2010 settu sær fyri at fáa Tórsvøll til góðkent altjóða stadion, var fyrsta stig at fáa til vega eina heildarætlan, tann sonevndi masterplanurin, sum bæði viðgjørdi skipan av øllum ítróttaøkinum í Gundadali og tørvin á kravdum fasilitetum til sjálvan Tórsvøll sum landsliðsstadion til altjóða kappingar hjá UEFA og FIFA.

Viðurskifti, sum vóru sett á skrá til tess, vóru m.a.:
- At vaksa um sjálvan leikvøllin samsvarandi altjóða krøvum
- At skifta grasvøllin út við altjóða góðkent graslíkið
- At seta upp nýtt ljósannlegg samsvarandi krøvum til sjónvarping av altjóða dystum
- At yvirdekka áskoðaraplássini til tess at reisa verju fyri vindi og regni, og í hesum sambandi at betra um komfort til áskoðararnar
- At avmarka talið av áskoðarum úr 6.440 niður á uml. 5.000
- At reisa nýggjan bygning á suðursíðuni, ið kann brúkast til nógv ymisk endamál bæði ítróttarliga, vinnuliga og umsitingarliga
- At skipa stadion við nýggjum inn- og útgongdum, ið lúka altjóða krøv

Útyggingarstigini hava í høvuðsheitum verið hesi:
- Nýtt ljósannlegg 2011
- Grasvøllur skiftur til graslíki 2012
- Suðurtribunan tikin niður og nýggjur bygningur bygdur 2013 – er m.a. høvuðsinngongd til Tórsvøll, umsitingarhøli hjá FSF, og 900 áskoðarapláss undir taki og nýggjum setrum
- Eystara skýlið bygt 2014-2015 – tak yvir áskoðarapláss, nýggj setur, vesi og búðir. Eystara skýlið er bundið saman við bygninginum og áskoðaraplássini á suðurendanum.

**Vestara skýlið**
Vestara skýlið er framhald av heildarætlanini, har áskoðaraplássini verða dagførd og koma undir tak. Vesturskýlið verður eins og eysturskýlið bygt saman við bygninginum á suðurendanum og skapar sostatt samanhangandi form sum hestaskógvur. Tá vesturskýlið er bygt, er tað samært heildarætlanini bert torgið frammanfyri Tórsvølli, sum er eftir.

Verkætlanin við vesturskýlinum fevnir eisini um útbygging av gamla FSF-húsinum bæði norður- og suðureftir sum liður í, at Tórsvøllur skal røkka ásetingini um “Category 4” leikvøllir, ið er ásetingin fyri leikvøllir til altjóða landsdystir. Í løtuni er Tórsvøllur ein “Category 3” leikvøllur. Til tess at røkka hesum, skulu umklæðingin til spælarar og dómarar betrast, eins og umstøður til dopingkanningar og læknarúm. Umstøður til tíðindafólkini og VIP eru heldur ikki nøktandi.

Hesir nýggju fermetrarnir hava tann vinning umframt, at umklæðingarrúm, vesir og tey almennu økini kunnu eisini brúkast til tiltøk, sum eru í Gundadali, serliga á Niðara vølli, sum harvið fær høliskarmar til taks, ið ikki eru dag.

Á ovastu hædd eru góðir møguleikar fyri fleirnýtsluhølum, eitt nú gisting í sambandi við landsliðsvenjingar ella skúla, skrivstovur og kravdar VIP-fasilitetir í sambandi við landsdystir. Til ber at byggja 200 nýggj áskoðarapláss her, so at samlaði áskoðarakapasiteturin á vestursíðuni verður uml. 1.730.

Í stuttum fevnir útbyggingin um hesi høli:
- Veghædd – høli til vaktarhaldið, 2 umklæðingarrúm til dómarar, dopingrúm, 2 nútíðar umklæðingarrúm til liðini, høli til tíðindafundir, mixed zone (fjølmiðlar/leikarar), sum harumframt er foreldralounge móti niðaravølli
- 1. hædd – vesi, arbeiðsrúm hjá tíðindafólkuj
- 2. hædd – VIP høli, sølubúðir
- 3. hædd – sonevndar skybox til fleirnýtsluendamál, vaktarrúm

Útbyggingin loysir eisini trupulleikan við inngongdum, har áskoðarar í dag mugu inn á vøllin fyri at koma til áskoðaraplássini. Sum heild fer útbyggingin at lætta munandi um fyriskipan av dystum, kappingum og

tiltøkum á Tórsvølli. Tey síðstu áskoðaraplássini, gestir og tíðindafólk koma eisini undir tak. Og ikki minst, at Tórsvøllur verður endaliga liðugur og kann verða ein stoltleiki fyri bæði høvuðsstaðin og landið.

Verkætlanaruppskotið er í mai 2016 lagt fyri UEFA at góðkenna.

Ynskið hjá FSF hevur verið, at útbyggingin skuldi verða liðug í september 2018, tá nýggja kappingin Nations League, sum UEFA skipar fyri, fer av bakkastokki. Hesa tíðarætlan ber ikki til at røkka, nú so langt er útliðið, men mett verður, at til ber at skipa byggingina soleiðis, at dystir kunnu fyrskipast kortini.

Hendan kappingin verður samstundis sum vanligu EM og HM-undankappingarnar. Hetta kemur eisini at økja um virksemið á Tórsvølli, har tað í miðal fara at vera 5 A-landsliðskappingardystir um árið. Spælt verður tá alt árið, tvs. eisini um veturin, har tað eisini er møguligt við øðrum smærri millumlandakappingum.

Útbyggingin gevur eisini nýggjar og betri møguleikar fyri øðrum virksemi á Tórsvølli, serstakliga størri tiltøk og stadionkonsertir.

**Samstarv**
Eins og øll tey undanfarnu útbyggingarstigini síðan 2010, er ætlanin at skipa arbeiðið við vesturskýlinum í samstarvi við FSF eisini fíggjarliga.

Gjørt er uppskot til samstarvsavtalu við støði í avtalunum fyri hini útbyggingarstigini.

Sambært uppskotinum til avtalu verður lagt upp, at byggingi verður skipað í partalagi. Fyribilskostnaðarmeting fyri alt útbyggingarstigið er kr. 98 mió. Lagt er upp til, at hvør parturin rindar helvtina av kostnaðinum, tvs. 50/50, og at gjøldini hjá hvørjum parti fella soleiðis:

2016: FSF kr. 5 mió, TK kr. 5 mió.
2017: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2018: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2019: FSF kr. 5 mió, TK kr. 8,75 mió
2020: TK rindar FSF kr. 8,75 mió
2021: TK rindar FSF kr. 9 mió

FSF hevur góðkent henda leist. Til ber ikki at staðfesta endaliga byggiskostnaðin fyrr enn eftir útboð.

Tíðarætlan yvirskipað:
- Juli-desember 2016 – projektering
- Januar 2017 – útboð
- Februar 2017 – uppstartur og partalag
- Februar-desember 2017 – stig 1: fundamentir, stuðlamúrar, lendisarbeiði, betong, vegur og stál
- Januar-august 2018 – stig 2: Stál, stálsperrur og polycarbonate
- August 2018-august 2019 – stig 3: Komplettering, innleggingar og stólar.

Í avtaluuppskotinum verður, sum omanfyri nevnt, lagt upp til bygging av vestursíðuni í partalagssamstarvi. Harumframt, at skipanin við stýrisbólki millum TK og FSF um Tórsvallar-bygingina verður at halda fram, á sama hátt høvuðsráðgevin.

Til tess at fáa fyrireikað, prosjekterað og bjóða arbeiðið út verður mett neyðugt við játtan frá kommununi uppá kr. 5 mió í 2016 og samsvarandi kr. 5 mió frá FSF.

Sambært dagførdu íløguætlanini fyri 2016 eru settar kr. 5 mió av til Tórsvøll.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at samtykkja uppskot til samstarvsavtalu við FSF um at gera

yvirdekking yvir tribunir á vestarasíðu á Tórsvølli og út- og umbygging av verandi bygningi har. Mælt verður eisini til at játta kr. 5 mió av íløguætlanini 2027 5775 Ítróttaranlegg til fyrireiking, projekting og útboð.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Sigrun Mohr og Halla Samulensen, samtykti at taka undir við fyriliggjandi avtalu millum TK og FSF, við teirri treyt, at tær upphæddirnar sum eru nevndar í avtaluni eru endaligar fyri TK, eisini um verkætlanin verður dýrari, men at útreiðslubýtið verður 50/50 um verkætlanin verður bíligari enn mett.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur ikki undir við avtaluni vegna ov stóran iva um veruliga byggikostnaðin fyri hetta byggistigið.
**Ískoyti:**
Sambært fyriliggjandi uppskoti til avtalu millum TK og FSF fella gjøldini hjá hvørjum parti soleiðis í sambandi við verkætlanina:

2016: FSF 5 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2017: FSF 26,25 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2018: FSF 26,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2019: FSF 7,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2020: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2021: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2022: TK rindar FSF 7,0 mió kr.
2023: TK rindar FSF 7,0 mió kr.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við mentamálanevndini treytað av, at ognar- og ábyrgdarbýtið millum TK og FSF á vestursíðuni verður tikið upp til nærri støðutakan. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, vísir til sína støðutakan í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri, og tveimum ímóti at taka undir við tilmælilnum frá meirilutanum í fíggjarnevndini. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Jógvan Arge greiddi ikki atkvøðu.

**Ískoyti**:
Ymsu byggistigini á Tórsvølli farnu 6-7 árini eru gjørd í samstarvi millum kommununa og Fótbóltssambandið. Í sambandi við undanfarnu byggingar hava umboð fyri býráðið verið tilnevnd í stýrisbólk, har eisini umboð fyri Fótbóltssambandið sita. Sambært avtaluni við Fótbóltssambandið um vestursíðuna er ætlanin, at byggingin verður skipað í partalagi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóran mæla til at tilnevna tvey umboð fyri býráðið í stýrisbólkin fyri byggingina av Tórsvølli.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Annika Olsen, Bogi Andreasen og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Lisitatión uppá bygging av tribunum og bygnigni á vestursíðuni á Tórsvølli var 31. august 2017. J&K Petersen hevði lægsta boð kr. 88.499.385 handverkaraútreiðslur. Samráðst hevur síðani verið við arbeiðstakaran um tilboðið.

Harumframt er hetta tíðarskeiðið arbeitt nærri við konstrutkiónspartinum, har tað í mun til útbjóðingartilfarið er farið frá upprunaligu loysnini við betongveggi niður á hellu millum Tórsvøll og Niðara vøll til spunsvegg, sum mett verður er ein tryggari loysn. Gjørdar eru í hesum sambandi neyvari dýpdarkanningar. Har tað er djúpast eru 7,5 metrar. Spunsveggirnir verða slidnir niður eins og kent er frá havnagerð, og so verður stoypt í erva og harfrá bygt fast í sjálvt skýlið.

Staðfesta dýpdin niður á hellu og spunsveggirnir hava gjørt verkætlanina dýrari. Gjøgnumgongd hevur somuleiðis verið við ymisku fakini saman við høvuðsarbeiðstakara við tí endamáli at fáa prísin niður. Eftir hesar broytingar og samráðing eru handverkaraútreiðslurnar kr. 90.325.687.

Samlaður kostnaður íroknað byggiharraútreiðslur, ráðgeving, innbúgv, reinsiverk v.m. er kr. 118.569.663.

Við støði í hesum kostnaðinum er gjørt nýtt uppskot til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya um bygging av vestursíðuni, har útreiðslukarmurin er kr. 118,5 mió, og har báðir partar rinda kr. hvør sín helming tó soleiðis, at parturin hjá Tórshavnar kommunu er í mesta lagi kr. 59,285 mió.

Áður eru játtaðar kr. 10 mió til verkætlanina árini 2016 og 2017. Fíggjartørvurin hjá kommununi er sostatt kr. 49,285 mió, sum sambært uppskotinum til samstarvsavtalu við Fótbóltssambandi Føroya verður at fíggja yvir íløguætlanina árini 2019-2025 soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 2019 | kr. 6,000 | mió |
| 2020 | kr. 8,500 | mió |
| 2021 | kr. 8,500 | mió |
| 2022 | kr. 9,000 | mió |
| 2023 | kr. 7,500 | mió |
| 2024 | kr. 8,000 | mió |
| 2025 | kr. 1,785 | mió |
| | kr. 49,285 | mió |

Sambært tíðarætlanini verður bygingin liðug í oktober 2020. Byggingin verður eins og undanfarna byggistig skipað í partalagi. Umframt partalagssáttmála skal støða takast til høvuðsarbeiðstøkusáttmála við J&K Petersen, samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya og fígging.

Býráðið samtykti 16. juni 2016, at ognar- og ábyrgdarbýtið millum Tórshavnar kommunu og Fótbóltssamband Føroya verður tikið upp til nærri støðutakan. Upplýsast skal, at ítøkiligt uppskot er gjørt um slíkt býti, harundir uppskot um rakstrar- og samstarvsavtalu fyri Tórsvøll. Uppskotið verður lagt til politiska viðgerð í mentamálanevndini á fundinum í mars.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at:

- Góðkenna uppskotið til partalagssáttmála
- Góðkenna uppskotið til høvuðsarbeiðstakarasáttmála
- Góðkenna uppskotið til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya
- At játta kr. 5 mió av tøkum løgukarmi 2017 konta 5775 Ítróttaranlegg L00001 til løgukontu 5775 L57026 Tórsvøllur vestursíðan
- At játta í alt kr. 49,285 mió á íløguætlanini fyri 2019-2025 samsvarandi samstarvsavtaluni við Fótbóltssamband Føroya,

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Komið er eftir, at upphæddin, ið kommunan skal rinda, í málslýsingin er uttan mvg. Við mvg er upphæddin kr. 62,990 mió, fíggjartørvurni tó 52,990. Býtið í yvir ár verður so hetta:

| | | |
|---|---|---|
| 2019 | kr. 6,000 | mió |
| 2020 | kr. 8,500 | mió |
| 2021 | kr. 8,500 | mió |
| 2022 | kr. 9,000 | mió |
| 2023 | kr. 7,500 | mió |
| 2024 | kr. 8,000 | mió |
| 2025 | kr. 5,490 | mió |
| | kr. 52,990 | mió |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin vísir til tilmælið omanfyri við teirri broyting, at játtaðar verða í alt kr. 52,990 mió á íløguætlanini fyri 2019-2025.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundi 25. januar 2018 samtykti býráðið at góðkenna uppskot til partalagssáttmála, at góðkenna uppskot til høvuðsarbeiðstakarasáttmála, og at góðkenna uppskot til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya, og í hesum sambandi at játta kr. 62,990 mió íroknað kommunalt mvg til byggingina av vestursíðuni á Tórsvølli.

Eftir hesa býráðssamtykt hevur FSF boðað kommununi frá samtykt í starvsnevnd FSF´s um, at FSF vil broyta byggiverkætlanina soleiðis, at verandi FSF-hús á vestursíðuni ikki verður út- og umbygt sum ætlað, men ístaðin verður tikið niður og at nýtt hús verður bygt uppaftur á staðnum.

Endamálið við hesi broyting er at fáa eina betri bygging bæði viðvíkjandi innrætting og funktiónum. Fyrimunur er eisini, at hæddirnar á vestursíðuni verða bundnar saman við suðurendan í somu linju, tí meðan verandi bygningur hevur fýra hæddir, verður tann nýggi at hava tríggjar hæddir eins og suðurendin.

Harumframt minkar broytta ætlanin munandi um váðan í byggingini serliga við atliti at avbjóðandi lendinum.

Fótbóltssambandið hevur í hesum sambandi boðað kommununi frá, at mettur meirkostnaður fyri hesa ætlan er kr. 25,0 mió, og at Fótbóltssambandið sjálvt vil fíggja henda meirkostnað. Fíggjarligi parturin hjá Fótbóltssambandinum av samlaðu byggingini á vestursíðuni verður eftir hesum uml. kr. 84,3 mió.

Hetta merkir tó, at verkætlanin er ikki heilt tann sama, sum býráðið samtykti á síðsta fundi út frá fyriliggjandi skjølum.

Í sambandi við fyrireikingarnar at prosjektera vestursíðuna varð henda ætlan at byggja nýtt hús heldur enn at út- og umbyggja verandi hús viðgjørd. Semja var um, at hetta er ein uppá allar mátar betri loysn, men hon kundi ikki fremjast innanfyri tann fíggjarkarm, ið verkætlanin tá hevði.

Nú Fótbóltssambandið hevur samtykt at fíggja hesa broyting, verður mælt býráðnum til at broyta verkætlanina soleiðis sum lýst omanfyri, harundir at broyta tilhoyrandi partalagssáttmálan, høvuðsarbeiðstakarasáttmálan og samstarvsavtaluna við Fótbóltssambandið, men har játtanin hjá kommununi framhaldandi verður ikki hægri enn tær kr. 62,990 mió íroknað mvg, sum longu eru játtaðar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at samtykkja verkætlanina soleiðis broytt og at tilhoyrandi skjøl – partalagssáttmáli, høvuðsarbeiðstakarasáttmáli og samstarvsavtala við Fótbóltssambandið verða broytt samsvarandi. Harumframt verður mælt til at staðfesta, at játtanin hjá kommununi til byggiverkætlanina á vestursíðuni á Tórsvølli framhaldandi verður ikki hægri enn tær kr. 62,990 mió íroknað mvg, sum longu eru játtaðar.

**Mentamálanevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Víst verður til samstarvsavtaluna millum Fótbóltssamband Føroya og Tórshavnar kommunu grein 5 um fíggjarligu viðurskiftini. Sambært hesum rindar kommunan sín part av íløgukostnaðinum í pørtum soleiðis, at í 2025 er alt goldið. Byggingin er ætlað at verða liðug í 2020/21.
Fótbóltssambandið hevur sent fyrispurning til kommununa, um til ber at gjalda kommunala partin skjótari. Fótbóltssambandið greiðir frá, at til tess at fíggja byggingina, bæði meðan bygt verður og árini fram til 2025, noyðist Fótbóltssambandið at taka upp lán fyri partin hjá kommununi, ið ikki er goldin.
Í hesum sambandi er Fótbóltssambandið í gongd við at kanna tilboð frá fíggjarstovnum. Greitt er, at Fótbóltssambandið skal bera týðandi fíggjarkostnaðir av hesum. Lagt verður aftrat, at Fótbóltssambandið virðir avtaluna og góða samstarvið við kommununa um Tórsvøll, men loyvir sær at spyrja kommununa, um til ber at gjalda kommunala partin skjótari.
Sbrt. grein 5 í avtaluni, so kann kommunan gjalda gjøldini skjótari. Higartil hevur kommunan veitt 10 mkr. í fígging av 62,990 mkr. Uppskot hjá Fótbóltssambandinum er, at kommunan t.d. rindar 33 mkr. nú ella næsta ár, og restina 19,990 mkr. árini 2020-21, so at byggingin verður ikki verður óneyðuga dýrkað av fíggjarkostnaðum.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla til at broyta gjøldini soleiðis, at 33 mkr. verða játtaðar í 2018 av tøkum peningi. Harumframt verður mælt til at játta 10 mkr. av íløgujáttanini fyri 2020 og 9,990 mkr. í íløgujáttanini fyri 2021.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

Ískoyti:
Byggingin av vestursíðuni verður liðug uml. 21. juni 2021, sum er 4 mðr. seinni enn upprunaliga ætlað. Orsøk til hetta er spilldagar serliga viðvíkjandi veðrinum, koronatíðarskeiðnum í vár og avbjóðingar við leveransum.

Umsitingin hevur saman við Fótbóltssambandinum viðgjørt møguleikan um forseringsavtalu (framskunding), harundir at gera verkætlanina endaliga upp.

Fyri FSF hevur forseringin týdning, tí at Tórsvøllur tíðliga í mai 2021 fyri fyrstu ferð skal verða karmur um stóra EM-endakapping í Føroyum. Talan er um U17-kvinnur, har føroyska U17-kvinnulandsliðið eisini tekur lut saman við 7 øðrum londum. FSF hevur lagt nógv fyri at gerast vertir fyri enn størri altjóða kappingum enn bólkaspølini og einstøku landsdystirnir, sum hava verið higartil, og fyri býin er hetta eisini av størstu altjóða tiltøkum.

Fyri kommununa hevur forseringin eisini týdning, at tað so tíðliga sum gjørligt ber til at byrja uppá arbeiðið at skifta graslíkið á Niðara vølli, tá byggiplássið er farið av vøllinum, tí arbeiði væntast at taka eina 8 vikur.

Samráð hevur verið við arbeiðstakaran og høvuðsráðgevan um forseringsavtalu og treytir í tí sambandi. Til ber at framskunda liðuggerð av bygginini til 7. apríl fyri ein samlaðan kostnað uppá kr. 3,55 mió ráðgeving og kommunala projektleiðslu íroknað.
Harumframt er aðrir kostnaðir í sambandi við byggiætlanina, ið tørva fígging.

Tá arbeiðið varð byrjað, vórðu kommunan og FSF samd um at tekna projektábyrgdaratrygging, sum ikki var við í upprunaligu fíggingini. Kostnaðurin av hesi trygging er kr. 0,79 mió íroknað tryggingarráðgeving. Aftrat eru eisini meirútreiðslur til keyp av tribunustólum og innbúgvi kr. 0,6 mió.

Forsering, tryggingarkostnaður og hinir nevndu kostnaðirnir er tilsamans kr. 4,94 mió u/mvg, sum ætlanin er, at FSF og kommunan býta í helvt, so sum gjørt er upprunaliga. Við kommunalum mvg er parturin hjá kommununi kr. 2,62 mió.

Gjørt verður í hesum sambandi ískoyti til grein 5 í samstarvsavtaluni við FSF viðv. bygginini av vestursíðuni, har samlaði parturin hjá kommununi verður broyttur frá kr. 62,99 mió v/mvg til kr. 65,61 v/mvg. Avtalað er eisini, at kommunan rindar tær kr. 22.610.000, forseringskostnaðurin íroknaður, sum eftir eru at gjalda, soleiðis:
- 2023 kr. 9.120.000
- 2024 kr. 8.000.000
- 2025 kr. 5.490.000

Haraftrat skal gerast ískoytissáttmáli við arbeiðstakara og høvuðsráðgevan um forseringina.

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Íløgujáttan sambært samstarvsavtalu fellur árini 2023-2025.

| | **Rakstrarjáttan** | **Løgujáttan** |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 22.610.000 |

| | **Býráðsfundur**<br>17. desember 2020 | Blað nr.: 1310<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | |
|---|---|---|
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 0 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato 2023-2025 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | **Á** | | | **Av** | | | **Lokað** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | 5775 | L57026 | | 5775 | | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at samtykkja ískoytisavtaluna við FSF, har samlaði verkætlanarkostnaðurin hjá kommununi er settur til kr. 65,61 mió v/mvg. Mælt verður til, at restfíggingin verða játtað soleiðis:

kr. 9.120.000 í íløguætlanini fyri 2023,
kr. 8.000.000 í íløguætlanini fyri 2024, og
kr. 5.490.000 í íløguætlanini fyri 2025.

Harumframt verður heimilað kommununi saman við FSF at gera ískoytisavtalur við arbeiðstakara og høvuðsráðgeva um forseringina.

**Mentamálanevndin 07. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við tí ískoyti, at verkætlanin við hesum er gjørd endaliga upp í mun til krøv samsvarandi sáttmálunum áðrenn verksetan.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 308/20 Tórsvøllur Torg

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 07.12.2020 | 335/20 | 20/04581-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 335/20 | 20/04581-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 249/20 | 20/04581-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 308/20 | 20/04581-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórsvøllur sum altjóða stadion.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í 2010 settu Tórshavnar kommuna og Fótbóltssamband Føroya seg fyri at fáa Tórsvøll góðkendan sum altjóða leikvøll. Verkætlanarstigini hesi ár hava verið:

- Masterplan fyri Tórsvøll 2010-2011
- Ljósanlegg sett upp 2011
- Grasvøllur skiftur við graslíkisvøll 2012
- Suðurtribuna tikin niður, nýtt FSF høvuðssæti og áskoðarapláss undir tak, eysturskýli undir tak 2013-15
- Vesturskýli við umklæðingarrúmum, teknisku hølum, áskoðarapláss undir tak v.m. 2016-21

Síðsta verkætlanarstigið í teirri ætlan, sum løgd varð upprunaliga, og sum eisini er partur av kravdum umstøðum til altjóða stadion, er torgið uttanfyri sjálvt stadion. Talan er um alt økið frammanfyri FSF høvuðssætið og Niðara vølli frá økinum millum Dansifrøi og Gundadalshøllina og framvið Gundadalsvegnum til og við Brigdehúsið.

Torgið fevnir um røð av funktionalitetum, sum hava við altjóða dystarstøðu at gera. Torgið skal harumframt liva upp til býarskipanarlig krøv samsvarandi heildarætlanini fyri Gundadal, har hetta økið er høvuðsportalur til Gundadal frá miðbýnum.
Yvirskipað er torgið skipað sum eitt uppihaldstorg við spælipláss til allar aldursbólkar umframt parkering, vegir og gøtur. Tá landsdystir eru, verður torgið umskipað, so tað kann møta øllum krøvum, sum UEFA setur til kategori 4 stadion.

Torgið fevnir um:
- Skipað atkomu til áskoðarar, liðbussar, catering, neyðsendarakfør v.m.
- 1.000 m2 P-øki til sjónvarpsvognar, sum  ásett fyri kategori 4 stadion, men sum í dagligdegnum antin kann brúkast til “street ítrótt” , ella parkering (33 stk.), tá dystir eru í Gundadali
- Farleið hjá gongufólki og súkklandi gjøgnum Gundadal sum lýst í  “Heildarætlanini fyri Gundadal”
- Uppihaldstrappa frammanfyri FSF høvuðssætinum og Kafé #12
- Nýtt urbant spælipláss til allar aldursbólkar
- P-øki við Gundadalshøllina til 72 bilar
- Planting fram við Gundadalsvegnum og á torginum
- Allur belegningur á økinum (asfalt, betong og flísar)
- Innbygt “uttara hegn” og “turnstiles”[1]
- Info- og atgongumerkja kiosk
- Goymsla til “turnstiles”[1]
- Ljósseting sum lýst í  “Heildarætlanini fyri Gundadal”
- Av- og áseting til torgið

- Busslummar til býbussar
- Benkur og annað býarinventar
- Spæliplássútgerð

[1] “Turnstiles” er teljingartól til áskoðarar

Barakkirnar framvið Gundadalsvegnum, sum eru fýra samanbygdar bygningar, skulu takast niður. Kommunan eigur tveir av bygningunum, hinir standa á leigaðum lendi hjá kommununi. Tilgongd at yvirtaka báðar bygningarnar, sum ávikavist FC Hoyvík og Brigdefeløgini eiga, er í gongd.

Harumframt verður Gundadalshøllin eftir ætlan yvirtikin, har kommunan eftir hetta hevur fult ræðið á økinum millum Gundadalshøllina og Dansifrøi, sum ætlað er til P-øki.

Arbeiðið verður eftir ætlan gjørt í stigum, so hvørt økið verður tøkt. Fyrsta stig er at byggja saman stadion og torg við uppihaldstrappuni og farleið frá Gundadalsvegnum til stadion. Trappan er eisini liður í at javna hæddarmun.

Ætlanin er at skipa verkætlanina sum samstarv millum kommununa og FSF eftir sama leisti sum undanfarnu byggistig. Uppskot til samstarvsavtalu er gjørt. Sambært uppskotinum hevur samlaða verkætlanin eitt útreiðslukarm uppá kr. 30 mió, og at kommunan rindar 65% og FSF 35%. Arbeiðið er sett at byrja í 2021 og enda í 2023.

Í samstarvsavtaluni er eisini ásett, at niðurtøka av barakkunum er partur av verkætlanarkostnaðinum, men at kommunan serskilt ber kostnaðin at yvirtaka ognirnar hjá ávikavist FC Hoyvík og Brigdefeløgunum.

Í íløguætlanini eru kr. 5 mió settar av til endamálið 2021. Íløgujáttan fyri alla byggingina verður at játta árini 2022 og 2023.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Samráðing um yvirtøku av bygningum er í sjálvstøðugum málum.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | x | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Talan er um íløguverkætlan í samstarvi millum kommununa og FSF eisini um fíggjarliga kostnaðin. Loft er lagt á kostnaðin. Umsitingin og FSF eru í gongd við at skipa felags avtalu um rakstur og viðlíkahald av øllum Tórsvølli, harímillum eisini torginum.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 19.500.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 0 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato 2021-2023 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | 5775 | Nýggj projektkonta | | 5775 | L00001 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at samtykkja samstarvsavtaluna við Fótbóltssamband Føroya og í hesum sambandi at játta kr. 5 mió av løgukontu 5775 Ítróttaranlegg L0001 løgukarmur í 2021 til nýggja projektkontu Tórsvøllur torg. Harumframt verður mælt til at játta kr. 7,25 mió á íløguætlanini í 2022 og kr. 7,25 mió á íløguætlanini í 2023.

**Mentamálanevndin 07. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til, at arbeiðið við vestursíðuni á Tórsvølli verður gjørt liðugt, áðrenn endalig støða verður tikin til fyriliggjandi samstarvsavtalu við FSF og arbeiðið at gera torg frammanfyri Tórsvølli.

**Ískoyti:**
Talan er um verkætlan skipað sum eitt samstarv millum Fótbóltssamband Føroya og Tórshavnar kommunu, og skal uttanum økið til stadion til tíðir fevna um dystarstøður, men meginpartin av árinum er talan um alment øki, sum skal virka í gerandisdegnum.

Økið er áleið 7000-8000 $m^2$ til støddar, og eru greið altjóða krøv til dystarstøður, sum skulu samantvinnast við býarskipanarlig viðurskifti. Skitsuuppskotið tekur atlit til altjóða krøvini, og eru býarskipanarligu viðurskiftini partvís lýst í uppskotinum og í skjalinum *Viðmerkingar til spælipláss.*

Ein tørvslýsing hevði verið fyrsta stigið í eini skilagóðari tilgongd, har umsitingin beinanvegin varð tikin við uppá ráð. Vantandi tørvslýsingin hevði verið við til at tryggja ein samanhang millum tørv, krøv og ynskir til nýggja økið, umframt at verkætlanin varð sett inn í eina yvirskipaða hugsan í tráð við heildarætlanina fyri Gundadal og ítøkiligu verkætlanina um vestara skýlið á Tórsvølli.

Talan er um eitt stórt býartorg í Havnini, og tí er hóskandi at vera framsíggin í mun til, hvørji ynskir og krøv verða sett til verkætlanina. Verkætlanin verður mett at kosta 19 mió. kr., sum er eitt boð frá ráðgeva. Upphæddin er ikki grundað á eina kostnaðarmeting við støði í eini tørvslýsing, tí taka nógv ivamál seg upp í mun til verkætlanina. Mælt verður tí til at arbeiða víðari við at nágreinað verkætlanina við eini tørvslýsing í eini neyðugari tilgongd, sum skal vera grundarlagið undir verkætlanini. Hetta seinasta kundi verið skilmarkað í samstarvsavtaluna undir *Útinnan av arbeiðinum grein 4,* har tað stendur: *"...byggingin av torgi v.m. verður bygt eftir prosjekti, uppsett av MAP arkitektum"*.

**Skjøl:**
*Viðmerkingar til spælipláss*, journal nr. 20/04581-7

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja samstarvsavtaluna við Fótbóltssamband Føroya treytað av, at verkætlanin verður nágreinað í neyðugari tilgongd og ráðgevarasáttmáli verður gjørdur við ráðgeva og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til, at arbeiðið við vestursíðuni á Tórsvølli verður gjørt liðugt, áðrenn endalig støða verður tikin til fyriliggjandi samstarvsavtalu við FSF og arbeiðið at gera torg frammanfyri Tórsvølli.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 1 blankari at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini og meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Borgi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

# 309/20 Ítróttapolitikkur fyri Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 96/19 | 19/00757-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 214/19 | 19/00757-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 09.09.2019 | 234/19 | 19/00757-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 316/19 | 19/00757-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 11/20 | 19/00757-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 21.01.2020 | 32/20 | 19/00757-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 117/20 | 19/00757-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 27.04.2020 | 127/20 | 19/00757-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 13.05.2020 | 153/20 | 19/00757-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 22.06.2020 | 195/20 | 19/00757-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 221/20 | 19/00757-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 321/20 | 19/00757-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 07.12.2020 | 333/20 | 19/00757-1 |
| 14 Mentamálanevndin | 16.12.2020 | 343/20 | 19/00757-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 17.12.2020 | 357/20 | 19/00757-1 |
| 16 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 309/20 | 19/00757-1 |

**Upprunin til málið:**
Forkvinnan í mentamálanevndini Gunvør Balle

**Samandráttur**
Tórshavnar kommuna stendur í vøkstri. Fólkatalið økist og eftirspurningurin eftir karmum, hentleikum og samstarvi við kommununa innan ítrótt er í støðugum vøkstri eisini við fjølbroyttum altjóða virksemi. Samstundis hevur kommunan áhuga í, at eitt nú børn og ung hava góðar virkisumstøður og á tí støði, ið hóskar til teirra.

Mett verður hóskandi at seta ein yvirskipaðan politikk fyri, hvussu økið skal umsitast framyvir. Partur av hesum er eisini stuðulsskipanir á økinum, umframt
hvønn leiklut kommunan skal hava serliga viðvíkjandi trivnaðinum hjá børnum og ungum og samstarvi við feløgini tí viðvíkjandi.

**Lýsing av málinum**
Í 2000 var gjørt eitt mentanarálit, ið eisini fevndi um ítrótt, sí her: https://www.torshavn.fo/get.file?ID=210.
Hóast ávís viðurskifti kunnu ganga aftur eisini nú 20 ár seinni, so setir samfelagsliga menningin nýggj krøv til kommununa eins og til felagsvirksemið innan ítrótt.

Nakað av hesum er at finna í teim mál og avriksavtalum, sum gjørdar eru síðstu árini við Ítróttaranlegg og Svimjihøllina.

Løgur innan ítrótt vm.

Ítrótt hevur farnu árini fylt rættiliga nógv í íløgujáttanini og í býarskipanarligu planleggingini, eitt nú í sambandi tørv á anleggum til altjóða kappingar. Í hesum døgum verður arbeitt við málinum um Skipan av Gundadali umframt ætlanir eru um golfvøll á Glyvursnesi og Stórhøll við Stórutjørn.

Møgulig tilgongd
Ein slík tilgongd kann fremjast á ymiskar mátar. Innan økið eru tíggjutals feløg og felagsskapir, umframt at stórir partar av kommunalu umsitingini eru áhugapartar. Hóskandi er at byrja við verkstovu við luttøku av relevantum partum sum grundarlag fyri neyvari arbeiðssetningi. Umframt yvirskipaðan ítróttapolitikk er eisini ætlanin at gera uppskot til ítøkiligar ætlanir við støði í politikkinum bæði stutttíðar og langtíðar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sí omanfyri.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Skipanin við ókeypis hallarleigu.
Árligur rakstrarstuðul á mentanar- og ítróttarøkinum.
Kanning av ítrótti og mentan í Føroyum LOA-Fonden 18/01114
Skipan av Gundadali, sum eisini fevnir um Tórsbreyt

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongi

**Umhvørvisárin**
Avmarkað.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Býarskipanardeildin hevur eftirspurt at økið fær ein frítíðar- og ítróttarpolitikk.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at seta arbeiði í verk at orða ítróttapolitikk fyri Tórshavnar kommunu, har fyrsta stig er at fyriskipað verkstovu sum grundarlag fyri neyvari arbeiðssetningi.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin arbeiðir innleiðandi við málinum. Fyri at fáa eina hylling á sjónarmiðum og støðu til ymiskar spurningar og vandamál innan økið ynskir umsitingin, at nevndin við støði í nøkrum lyklaorðum og fordømum aðrastaðni umrøður viðurskifti, ið nevndin metir hevur týdning í víðari arbeiðinum.

Umsitingin fer síðani til í heyst at arbeiða við einum uppleggi til ítróttapolitikk, ið skal til leggjast til grund fyri dialogi við ítrótta- og frítíðarumhvørvið í kommununi.

Lyklaevnini, ið hugsanin er at umrøða eru fylgjandi:

*<u>Ítróttur og frítíð í býarrúminum</u>*
*Hvørji økir kunnu nýtast og til hvat*
*Alternativ nýtsla av verandi økjum og lundum so sum Grasagarður, onkur tómur bygningur, viðarlundir, grøn øki, skúlagarðar*

*<u>Online platform</u>*
*Til virksemi innan frítíð og ítrótt*
*Nýtsla av kommunalum facilitetum/hentleikum, virksemi innan kvøldskúla, hallarleiga, rørsluøkir, bóka ítróttartíma*
*Miðling av tilboðum og møguleikum*
*Tíðarhóskandi*

*<u>Familjulív og frítíðar- ella ítróttarlív</u>*
*Sameina dagligdag og rørslu við tilboðum ella møguleikum til familjur*
*Rørsla í gerandisdegnum. Øll luttaka saman. Sama tíð og stað, men evt. ymiskt virksemi.*

*<u>Kommunalt samstarv</u>*
*við felagsskapir og feløg, sum skipa fyri ítrótti og frítíðartilboðum:*
*evt. ítróttur sum eisini kann fevna um ferðavinnu: golf, klatring, hiking/gongutúrar*

*<u>Samstarv millum feløg og stovnar</u>*
*evt. innan klatring, háskúla, fitness, dart, golf, rógving osfr.*

*<u>Gøtu-ítróttur,</u>*
*møguleikar fyri rørslu uttandura*
*skateboard, klatring, kurvabóltur*
*Amboð*

*<u>Úrvals-ítróttur og landslið</u>*

*Ikki breiddin og fjøldin, men at styrkja ávísar ítróttarbólkar*
*Karmar til landsliðsvirksemi og markamótið við landið*

*Inklusión – møguleikar fyri øll*
*Sosialt og fíggjarligt.*
*Samstarv - stuðulsskipan*
*Frístundakortið (Ísland)*

*E-sportur*
*Savna fólk, ið hava við Talgildan ítrótt at gera. Skapa ein pall.*

*Fjølbroytni*
*Breidd í fjøld – børn, ung, familjur, eldri*

*Dygd og menning*
*Nógv frívilligt arbeiði í frítíðar- og ítróttarvirksemi.*
*Menna og vegleiða feløgum innan rekruttering, organisering og áhaldni hjá frívilligum í felgasskapum*

*Skipað virksemi / óskipað virksemi*
*felagsítróttur o.a. í hallum og á vøllum*
*úti virksemi á fríøki, í náttúru ella innandura*

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Útsett

**Mentamálanevndin 09. september 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Fundir hava verið við nakrar viðkomandi partar í sambandi við, at ein frítíðar- og ítróttapolitikkur verður orðaður.

M.a. við leiðaran í Frítíðarskúlanum í badmintonhøllini, við formannin í Fólkaheilsuráðnum, við nevnd og aðalskrivara í ÍSF, umframt við ítróttaráðgevan hjá ÍSF.

Øll eru á einum máli um, at tað er neyðugt í størri mun at mobilisera vaksnar venjarar at venja børn og ung, soleiðis at børn ikki eiga ábyrgdina av at venja børn.

Tað verður eisini hildið vera umráðandi, at krøv verða sett til feløg og felagsskapir, ið fáa fíggjarligan stuðul frá kommununi, hetta kann m.a. verða gjørt við at oyramerkja stuðul til ávíst ítróttarligt virksemi, til ungdómsvenjara ella annað.

ÍSF er eisini sera hugað fyri eini stuðulsskipan líknandi teirri íslendsku stuðulsskipanini "Frístundakortið". Har er tað partur av skipanini, at kommunan setir krøv til ávísa dygd og støði í tilboðum hjá feløgum og felagsskapum.

Ávís krøv skulu vera uppfylt fyri at vera við í skipanini. Dømi um krøv eru tey somu sum omanfyristandandi. Um ein stuðulsskipan sum "Frístundakortið" skal setast í verk, er tað tískil týdningarmikið, at gjøllar fyrireikingar verða gjørdar.

Tað eigur at verða gjørt greitt, hvat kommunan vil við skipanini og hvat endamálið við henni er. Eitt nú at økja um fólkaheilsu, ella fáa børn og ung virkin ella okkurt triðja. Tað eigur samstundis at vera væl fyrireikað, hvussu skipanin skal skipast og hvørji krøv eiga at verða sett feløgum og felagsskapum.

Hjálagt er ávegis útkast (kemur sum skjal mánadagin) til Frítíðar- og ítróttapolitikk til ávegis umrøðu. Samstundis verður skotið upp at skipað verður fyri einum hoyringsfundi við feløg og felagsskapir innan frítíð og ítrótt í næstum.

Fólkaheilsukanningin hjá Fólkaheilsuráðnum er somuleiðis hjáløgd, sum grundarlag fyri kjakinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið og at samtykkja at hava ein hoyringsfund í næstum.

**Mentamálanevndin 27. november 2019:** Samtykt.

**Ískoyti:**
Sum liður í fyrireikingunum til gerð av ítróttapolitikki hevur umsitingin fingið gjørt eina spurnakanning viðv. ymiskum innan ítróttaøkið. Harumframt hevur starvslesandi frá setrinum, ið hevur verið á mentamáladeildini í starvsvenjing í heyst, latið inn ritgerð, ið er viðkomandi fyri evnið (hjáløgd sum fylgiskjal).

Eisini hevur kommunan fingið eina framløgu frá Runavíkar kommunu um teirra stuðulsskipanir innan ítróttaøkið (hjáløgd sum fylgiskjal).

Sum fyrireiking til hoyringsfundir seinni í januar verða høvuðspunkt í spurnakanningini og høvuðsniðurstøður í ritgerðini, umframt framløgan frá Runavíkar kommunu lagdar fram sum kunning og íblástur til víðari viðgerðina og komandi støðutakanina.

Til mentamálanevndarfundin í februar er ætlanin at hava eitt dagført útkast til frítíðar- og ítróttapolitikk klárt. Ætlanin er, at útkast til politikk kann fara til hoyringar stutt eftir tað og koma til endaliga viðgerð í mars 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 21. januar 2020:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Við støði í viðgerðini og hoyringunum higartil hevur umsitingin gjørt uppskot til ein ítrótta- og frítíðarpolitikk. Sí hjálagt skjal.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at senda uppskotið til hoyringar hjá feløgum v.m.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020**: Samtykt at viðgera frítíðar- og ítróttarpolitikkin á eykafundi í apríl 2020.

**Ískoyti**
Umframt samlaða uppskotið til ein ítrótta- og frítíðarpolitikk eru fýra fylgiskjøl hjáløgd, sum grundarlag fyri umrøðu av evnum so sum stuðulsskipan o.a.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at senda uppskotið til hoyringar hjá feløgum v.m.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Frítíðar- og ítróttapolitikkurin er til hoyringar, og fyrireikingarnar til ítøkiligar arbeiðsætlanir samsvarandi endamálinum við politikkinum, kunnu so smátt fara í gongd. Í fyrsta umfari verður arbeitt við stuðulsskipanum. Endamálið er, at feløg og felagsskapir skulu hava góðar virkisumstøður við málrættaðum, gjøgnumskygdum stuðulsskipanum, ið stuðla undir endamálið við frítíðar- og ítróttapolitikkinum. Fyrsta málið, ið er sett, er at gera eitt tilmæli til eina endurskoðaða stuðulsskipan, ið tekur atlit til at stuðla børnum og ungum at vera virkin uttan mun til møguligar avbjóðingar og fíggjarligar umstøður, herundir skipanin við einum frítíðarkorti til børn og ung.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja, at ein bólkur verður settur at gera eina ítøkiliga arbeiðsætlan samsvarandi endamálinum um stuðulspolitikk í frítíðar- og ítróttapolitikkinum.

**Mentamálanevndin 13. mai 2020:** Samtykt at umsitingini kemur aftur í nevnd við einum uppskoti til endurskoðaða stuðulsskipan til ítróttar- og frítíðarfeløg, har frítíðarkortið kann verða ein partur av tí.

**Ískoyti**
Uppskotið til frítíðar- og ítróttapolitikk hjá Tórshavnar kommunu hevur verið til hoyringar í uml. 4 vikur, og fundir hava verið við ítróttaanlegg, kvøldskúlan og við eldraráðið. Ein longri telefonsamrøða hevur somuleiðis verið við Føroya Ungdómsráð (FUR). Freistin at lata hoyringarsvar var 2. juni og inn komu hoyringarsvar frá Hondbóltssamband Føroya, Hvirluni, KFUM skótum, ÍSF, Føroya Skótaráð og leiðaranum av Nes sóknar musikkskúla. Umframt teir hoyringarfundir vit hava havt við omanfyrinevndu. Samlað hoyringarsvar er hjálagt sum skjal. Tillagaða uppskotið til frítíðar- og ítróttarpolitikk er eisini hjálagt, umframt eitt uppskot til arbeiðsætlan fyri stuðulspolitikk.

Hoyringarumfarið reisir nakrir spurningar. Í høvuðsheitum kann man siga, at talan er um hesi evni:

- Altjóða kappingar, venjingarlegur og altjóða luttøka uttanlands: Umstøður og fígging.
- Tiltøk: Í 2029 er ætlanin at Føroyar skal vera vertur til Oyggjaleikirnar. Skulu Oyggjaleikir 2029 við í viðgerðina?

- Skótar og annað frítíðarvirksemi: Fær ov lítla rúmd í politikkinum, hvat skal til fyri eisini at røkja áhugamál hjá skótum o.ø.
- Brúkararáð: Eitt uppskot er at skipa lokalu feløgini í eitt ítróttarsamband, sum kann ráðgeva. Hetta sambandið kann vera við til at skipa tiltøk av ymsum slag. Heldur enn eitt brúkararáð at samskipa hallartímar, sum ítróttaanlegg longu ger.
- Ítróttur í kvøldskúlaskipanini: Skal tað vera ein møguleiki at bjóða feløgum at skipa sína venjing undir kvøldskúlanum? Hetta vildi gjørt at venjarar fingu løn eins og m.a. Havnar Hornorkestur, Havnakórið og Talv eru í kvøldskúlaskipanini.
- Býarplanlegging: Ávís bústaðarøki eru so mikið stór, at tað krevst ein nágreinað ætlan fyri, hvussu nógv verður útbygt í hvørjum øki. Hetta fyri at tryggja eina javna spjaðing av tilgongd til tey ymisku feløgini, so ávís feløg ikki vera ovurstór og troka onnur út. Skal kommunan tryggja grundarlagið hjá feløgum at virka og at varðveita limir við skilagóðari planlegging?

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða innkomnu hoyringarsvarini við fyriliti fyri teimum omanfyrinevndu reistu ivamálum og ætlanina fyri stuðulspolitikk. Síðani verða uppskotini tillagaði áðrenn tey endaliga verða samtykt.

**Mentamálanevndin 22. juni 2020:** Umrøtt.

**Ískoyti**:
Eftir umrøðuna seinast hevur umsitingin arbeitt víðari við at greina ymisk viðurskifti, ið vóru umrødd.

Herundir ávís lýsing av, hvat fyri rakstrarstuðul og løgustuðul, er veittur ítróttar- og frítíðarfeløgum farnu árini, umframt hugsað dømi um útrokningar fyri stuðul, í tann mun farið verður undir eina generella rakstrarstuðulsskipan.

Eisini eru ávísir upplýsingar savnaðir viðv. sosialum viðurskiftum, ið hevur týdning í mun til viðgerðina viðv. møguligum frítíðarkorti.

Ein avgerandi fyritreyt fyri at kunna fremja møguligar stuðulsskipanir er at tað verður sett fígging av til endamálið.

Sí hjálagt skjal.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið og nýggja uppritið.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Frítíðar- og ítróttapolitikkurin er klárur til endaliga støðutakan eftir at hava verið nakrar ferðir til politiska umrøðu, viðgjørdur í arbeiðsbólki í kommunalu fyrisitingini og verið til breiða almenna hoyring, bæði á hoyringarfundum og skrivliga við freist. Frítíðar- og ítróttapolitikkurin er eitt yvirskipað boð uppá, hvussu økið framyvir skal umsitast og mennast. Støða verður ikki beinleiðis tikin til m.a. endurskoðaðar stuðulsskipanir, til hetta verða ítøkiligar arbeiðsætlanir gjørdar samsvarandi endamálinum við frítíðar- og ítróttapolitikkinum. Politikkurin, ella partar av honum, verður endurskoðaður við nøkrum ára millumbili og er ásettur at vera galdandi frá 2020-2024.

Endaligt uppskot til frítíðar- og ítróttapolitikk er hjálagt.

Á fundinum í mentamálanevndini verður politikkurin latin tykkum sum prentaður faldari, sum er settur upp grafiskt.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja endaliga uppskotið til frítíðar- og ítróttapolitikk, galdandi 2020-2024.

Málið verður beint í býráðið.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Umrøtt og verður tikið upp aftur á næsta fundi.

**Mentamálanevndin 07. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti**:
Limirnir hava høvi at koma við viðmerkingum og uppskoti til rættingar, áðrenn uppskotið ætlandi fer til viðgerðar í býráðnum.

**Mentamálanevndin 16. desember 2020:** Eingin viðmerking.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt**.**

# 310/20 Trivnaðarnevndin: Umbøn frá eldraráðum um broyting av viðtøkunum, soleiðis at heimild verður fyri at útgjalda fundarpening e.l.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 26.09.2016 | 41/16 | 16/01243-4 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 28.11.2016 | 57/16 | 16/01243-4 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 06.12.2016 | 61/16 | 16/01243-4 |
| 4 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 408/16 | 16/01243-4 |
| 5 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 327/16 | 16/01243-4 |
| 6 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 310/20 | 16/01243-4 |

**Málslýsing:**
Eldraráðið hevur í telduposti dagfest 26. aug. 2016 sent umsókn um broyting í § 6, stk. 4 í viðtøkunum fyri Eldraráðið:

§ 6, stk. 4 er soljóðandi: Tað er sjálvboðið at vera limur í Eldraráðnum. Samsýning verður ikki latin, men limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum.

Eldraráðið heitir á Tórshavnar Býráð um at endurskoða, tillaga og dagføra viðtøkurnar fyri Eldraráðið soleiðis, at tað verður gjørligt at veita ráðslimunum eina ella aðra samsýning fyri tað eykaarbeiði, tað er at sita í Eldraráðnum í eitt 4-ára skeið.

Sambært Eldraráðnum er vanligt, at ráðs- og nevndarlimir fáa eina ella aðra samsýning fyri sítt nevndararbeiði. Í tí liggur ein viðurkenning av og virðing fyri tí arbeiði, ráðs- og nevndarlimir gera. Sagt verður víðari, at limirnir í teimum báðum føroysku eldraráðunum munnu vera millum tey einastu, ið ikki verða samsýntir á nakran hátt.

Valbærisaldurin er 60 ár, og metir ráðið, at tað kann vera torført at fáa fólk í arbeiðsførum aldri at lata seg velja í ráðið.

Eldraráðið vísir til viðtøkurnar fyri eldraráðið í Keypmannahavn § 7, stk. sum grundarlag fyri ynsktu broytingini soleiðis, at ráðslimirnir kunnu fáa samsýning.

Har stendur m.a., at "Borgerrepræsentationen yder diæter, erstatning for dokumenteret arbejdsfortjeneste og udgiftsgodtgørelse efter reglerne i § 16 a i lov om kommunernes styrelse til Ældrerådets medlemmer. Ældrerådets
medlemmer kan modtage diæter for deltagelse i ældrerådsmøder, i forretningsudvalgsmøder og i Ældrerådets fagudvalgsmøder. Borgerrepræsentationin fastsætter årligt med vedtagelsen af komunens budget det beløb, som maksimalt må udbetales til diæter m.v. i henhold til § 16 a i lov om kommunernes styrelse."

Omanfyri nevnda § 16 a í donsku kommunustjórnarlógini er soljóðandi: Der ydes et fast vederlag til kommunalbestyrelsens medlemmer. Økonomi- og indenrigsministeren fastsætter nærmere regler om vedarlaget. Vederlaget omfatter medlemmernes a) deltagels i møder i kommunalbestyrelsen og dennes udvalg samt underudvalg,..."

Danska lógin um rættartrygd (Retssikkerhedsloven) § 31, stk 3 er soljóðandi: "Kommunalbestyrelsen yder diæter, erstatning for dokumenteret tabt arbejdsfortjeneste og udgiftsgodtgørelse efter reglerne i § 16 a i lov om kommunernes styrelse til ædrerådets medlemmer."

Danska Velfærdsministeriet hevur í 2008 svarað fyrispurningi viðvíkjandi tulking av reglunum um diæter (allýsing: endurgjald latið sum skattafrí samsýning, ið skal dekka útreiðslur til kost, logi v.m., um ein er

burtur frá arbeiði ella ferðast longri enn 4 tímar) í mun til limir í eldraráði vísandi til, at ráðið verður fatað sum “underudvalg” sambært omanfyri nevndu § 16 a.

Eitt nú vísandi til donsku lógina um rættartrygd omanfyri er niðurstøðan, at “I de tilfælde, hvor kommunalbestyrelsen har godkendt vedtægter for ældrerådet, hvoraf det fremgår, at ældrerådet organiseres i specifikke underudvalg, arbejdsgrupper mv., skal ældrerådsmedlemmerne have diæter mv. i forbindelse med møder i disse.
Ældrerådsmedlemmer er ikke berettigede til at modtage diæter for frivillig deltagelse i konferencer, kurser m.v.
Det afgørende for, om ældrerådsmedlemmers arbejde i underudvalg, deltagelse i konferencer o.a. berettiger til diæter, er således, hvorvidt aktiviteterne indgår som en del af den arbejdsfordeling for ældrerådets virke, som er pålagt og godkendt af kommunalbestyrelsen.”

Hetta er í samsvari við verandi viðtøkur fyri eldraráðið hjá Tórshavnar kommunu. Tað er tí skeiv fatan, at limir í donskum eldraráðum fáa fundarpengar ella aðra samsýning útyvir skjalprógvaðar útreiðslur.

Eldraráðið hevur fund tvær ferðir um mánaðin, 5 limir eru í eldraráðnum. Er fundarvirksemi 10 mánaðir um árið, eru 20 fundir. Um eldraráðið skal vera fevnt av reglunum um fundarsamsýning (kr. 540 fyri fundir undir 3 tímar), so kemur hetta við støði í 20 fundum um árið at kosta kr. 54.000 samlað fyri allar limirnar, hetta svarar til 27% av játtanini til ráðið uppá kr. 200.000. Tað kunnu vera fleiri fundir og luttøkur á ráðstevnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til ikki at broyta viðtøkurnar í § 6, stk. 4.

**Trivnaðarnevndin 26. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Harumframt samtykt at taka viðtøkurnar upp til endurskoðan.

**Ískoyti:**
Forkvinnan ynskir málið á skrá.

**Trivnaðarnevndin 28. november 2016:** Samtykt at gera uppskot til viðtøkubroyting í § 6 við tí endamáli, at eldraráðslimunum verður veitt fundarsamsýning.

**Ískoyti:**
Við støði í omanfyri standandi samtykt er uppskot, at eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar, t.e. kr. 552. Um árið er talan um kr. 6.624 fyri hvønn eldraráðslimin. Fyri allar fimm eldrarráðslimirnar verður samlaði kostnaðurin fyri 12 mðr. kr. 33.120. Tað er konta 1315 ráð og nevndir, sum ber kostnaðin av virksemi eldraráðsins.

Ásetingarnar í § 6, stk. 4 í viðtøkunum fyri eldraráðið kunnu tí broytast til soljóðandi:

“Til limirnar í Eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar. Limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum”.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at taka undir við uppskotinum til viðtøkubroyting.

**Trivnaðarnevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

Broyting av viðtøkunum fyri Eldraráðið
Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus, Turið Horn og Bogi Andreasen, býráðslimir
hava í telduposti dagf. 27. nov. 2020 biðið um at fáa málið fyri Býráðið. Málið snýr seg um broyting í § 4, stk. 2 og í § 6, stk. 4 í viðtøkunum fyri Eldraráðið.
Teldupostur frá Eldraráðnum frá 25. nov. 2020 við umbøn um broytingar eru viðlagdur.
§ 4 , stk. 2 er soljóðandi:

Varalimirnir kunnu eisini møta á fundunum hjá Eldraráðnum, men hava ikki atkvøðurætt.

**Við broytingini verður § 4, stk. 2 soljóðandi:**
§4, stk 2: Varalimir kunnu eftir áheitan møta á fundunum hjá Eldraráðnum, men hava ikki atkvøðurætt
§ 6, stk. 4 er soljóðandi:
Til limirnar í Eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar. Limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum

**Við broytingini verður § 6, stk. 4 soljóðandi:**
Til limirnar í Eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar. Limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum.
Til varalim verður veitt samsýning, tá hann møtir eftir áheitan.

**Viðmerkingar til broytingarnar:**
Til § 4, stk. 2 Orsøkin til, at Eldraráðið ynskir broytingarnar, er eitt ynski um betri arbeiðsgongd í Eldraráðnum.

Til § 6, stk. 4 Varalimur fær fundarboð, tá ið limur berst frá at møta, harumframt kann varalimur verða kallaður til fundar, tá tørvur er á hansara førleikum.
Tá varalimur møtir vegna forfall hjá nevndarlimi hevur hann atkvøðurætt.
Fyrstvaldi varalimur verður boðin til fundar, tá forfall er hjá nevndarlimi. Um fyrstvaldi berst frá at møta, verður næstvaldi varalimur boðin at møta o.s.fr.
Tá varalimur møtir vegna førleika, hevur hann ikki atkvøðurætt.
Uttan mun til um varalimur møtir vegna forfall ella vegna førleika, verður fundarsamsýning veitt fyri ein mánaðarligan fund.

| Verandi tekstur | Nýggjur tekstur | viðmerkingar |
|---|---|---|
| **§ 4 , stk. 2** er soljóðandi: Varalimirnir kunnu eisini møta á fundunum hjá Eldraráðnum, men hava ikki atkvøðurætt. | §4, stk 2: Varalimir kunnu eftir áheitan møta á fundunum hjá Eldraráðnum, men hava ikki atkvøðurætt | Orsøkin til, at Eldraráðið ynskir broytingarnar, er eitt ynski um betri arbeiðsgongd í Eldraráðnum.<br>Vanligt er, at varalimur møtir, tá fastur limur hevur forfall. |

| | | |
|---|---|---|
| **§ 6, stk. 4** er soljóðandi:<br>Til limirnar í Eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar. Limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum | Til limirnar í Eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar. Limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum.<br>Til varalim verður veitt samsýning, tá hann møtir eftir áheitan. | Varalimur fær fundarboð, tá ið limur berst frá at møta, harumframt kann varalimur verða kallaður til fundar, tá tørvur er á førleikum hjá viðkomandi varalimi.<br><br>Tá varalimur møtir vegna forfall hjá nevndarlimi hevur hann atkvøðurætt.<br><br>Fyrstvaldi varalimur verður boðin til fundar, tá forfall er hjá nevndarlimi. Um fyrstvaldi berst frá at møta, verður næstvaldi varalimur boðin at møta o.s.fr.<br><br>Tá varalimur møtir vegna førleika, hevur hann ikki atkvøðurætt.<br><br>Uttan mun til um varalimur møtir vegna forfall ella vegna førleika, verður fundarsamsýning veitt fyri ein mánaðarligan fund. |

**Tilmæli:**
Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus, Turið Horn og Bogi Andreasen, býráðslimir mæla Býráðnum til at taka undir við broytingum til § 4, stk. 2 og § 6, stk. 4.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 1 blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrin Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreaen, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus. Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Bergun Kass.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. desember 2020 | Blað nr.: 1327<br>Formansins merki: |

# 311/20 Bátahylur í Álakeri - gøta á brimgarð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.11.2020 | 230/20 | 20/04321-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 308/20 | 20/04321-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 278/20 | 20/04321-1 |
| 4 Vinnunevndin | 24.11.2020 | 85/20 | 20/04321-1 |
| 5 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 311/20 | 20/04321-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar Havn hevur í eina tíð arbeitt við at gera ein nýggjan bátahyl í Álakeri. Fyrr í ár varð samtykt at taka av tilboðnum frá p/f Tórhall Hansen og at gera sáttmála um arbeiðið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsitingin hevur, saman við Tórshavnar havn, arbeitt við skipan av økinum kring sjálvan bátahylin og í tí sambandinum er gøtan á brimgarðinum komin upp at venda.

Býarskipanarliga er tað ynskiligt, at gera økið áhugavert hjá borgarum at ferðast í, og í tí sambandinum hevur eitt ynski verið at gera brimgarðin atkomuligan hjá øllum borgarum, soleiðis at borgarin hevur møguleika at ganga sær ein túr út á sjógvin at njóta útsýnið, uppihalda sær og møguliga eisini nýta eitt fiskipláss fyri endan av brimgarðinum. Sí viðheftu støðumynd, skjal nr. 20/04321-2 og visualisering av økinum, skjal nr. 20/4321-5.

Hetta átakið verður somuleiðis mett sum eitt gott íkast til Landssjúkrahúsið, sum væntandi við sjúklingum og vitjandi kemur at hava gagn av at kunna ganga sær ein túr í umkringliggjandi økinum.

Arbeiðstøkuna, at gera brimgarðin, hevur p/f Tórhall Hansen fingið. Tórshavnar havn hevur síðani samskift við arbeiðstakaran um somuleiðis at átaka sær at gera gøtuna á brimgarðinum. Fyritøkan hevur latið eitt tilboð inn áljóðandi kr. 500.000 u/mvg. Hesin kostnaðurin inniber ikki kostnað fyri ljósseting, og tí verður mett, at arbeiðstøkan samlað verður áljóðandi kr. 600.000. Arbeiðið verður væntandi sett í gongd á vári 2021.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í økisparti B2 í Almennu byggisamtykini, sum ásetur at umráðisparturin verður lagdur til vinnuendamál, ið hava samband við skipaferðslu og fiskiskap og til virksemi, ið hava samband við hesi, t.e. skrivstovur, tænastuvirksemi, bilstøðlar og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Hugsandi er, at Álaker í framtíðini verður meiri býarkent, tó samansett við vinnuligum virksemi, og tí verður somuleiðis mett, at ynski at gera økið áhugavert at uppihalda sær í hóskar væl til ta visjónina.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/00083 Bátahylur í Álakeri

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-

**Umhvørvisárin**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
- 20/04321-2, 01_Støðumynd_23.10.2020
- 20/04321-5, Visualisering av bátahyli við gøtu

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | x | | x |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | x | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at játta sum eykajáttan kr. 600.000 av kt. 6210 til kt. 7476, L74010, Bátahylur í Álakeri, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
Somuleiðis verður mælt til, at málið fer í vinnunevndina til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 24. november 2020:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 312/20 Skógfriðing av øki fram við Hoydalsá ísv makaskifti við Búnaðarstovuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2020 | 126/20 | 20/01272-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 189/20 | 20/01272-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 150/20 | 20/01272-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.10.2020 | 213/20 | 20/01272-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 286/20 | 20/01272-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 237/20 | 20/01272-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.12.2020 | 237/20 | 20/01272-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 344/20 | 20/01272-1 |
| 9 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 312/20 | 20/01272-1 |

**Upprunin til málið:**
Ynskiligt er at víðka avtaluna um makaskifti millum Føroya Landsstýri og Tórshavnar kommunu ísv bygging av Glasir við øki framvið Hoydalsá, við skjali *20/01272-2 skógfriðing_makaskifti_Búnaðarstovan_23_01_2020*.
Fundur var millum Skógfriðingarnevndina og Tórshavnar kommunu 24. januar um hetta málið, har avtalað varð, at Tórshavnar kommuna skuldi venda aftur til Skógfriðingarnevndina við teimum ognum, ið Tórshavnar kommuna tekur undir við skulu skógfriðast ísv avtaluna um makaskifti.
ískoyti í málið um makaskifti, skal sendast sum umbøn til Føroya Landstýri, má samtykkjast politiskt og sendast ráðnum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsitingin tekur undir við, at økið rundanum Hoydalsá skal skógfriðast. Fyri almenningin er frílendið fram við Hoydalsá av stórum týdningi fyri uppihald og trivnað, og er upplagt at skógfriða økið. Umsitingin ger eisini vart við, at tá talan er um skógfriðing so tætt uppat verandi bygging, vil reglan um at hoyra Skógfriðingarnevndina, um bygt verður nærri enn 300 metrar frá skógfriðaðum øki, geva óneyðuga umsiting fyri Skógfriðingarnevndina. Avtalast má við Skógfriðingarnevndina hvussu hetta kann umsitast í praksis, og varð eisini semja um hetta, tá málið varð umrøtt á fundinum við Skógfriðingarnevndina í januar 2020.

Umsitingin tekur undir við, at økið verður skógfriðað sambært viðlagda korti skjal 20/01272-3 makaskifti_búnaðarstovan_juni 2020, og at frílendisætlan verður gjørd, sum skipar økið, sum liggur innanfyri friðingarlinjuna fyri Hoydalsá.

**Lógir, ásetingar o.a.**
72/2015:Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðarlundir (Fyrisitingarheimild til Umhvørvisstovuna) Galdandi lóg

Uppskot um lóg um Náttúrumargfeldi

**Upplýsingar frá umsitingini**

Skógfriðing av øki er bindandi í mun til røkt, og krevur árliga játtan til hald av økinum. Hetta kann avtalast nærri við Skógrøkt landsins.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*14/01476 Frílendisætlan fyri Hoydalsá,*
*17/01142 Skógfriðing, samstarv millum Tórshavnar kommunu og Skógfriðingarnevndina*
*18/00982 Skógfriðing*
*19/02816 Kampingøkið sambært ferðavinnupolitikkinum*
*20/00778 Innkomuvegurin samstarv við LV*
*Ymisk mál um urtagarðsstykkir*

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Mælt verður til, at kannað verður um til ber at skógfriða hetta økið, við áseting um, at friðingarlinjan fyri Hoydalsá er mark.
Hetta skal skiljast soleiðis, at sæð verður burtur frá ásetingini um at bygging 300 m frá skógfriðaða økinum skal til hoyring hjá Skógfriðingarnevndini, men at bygging uttanfyri friðingarlinjuna verður viðgjørd eftir reglum í galdandi byggisamtyktum.

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
skjal 20/01272-3 makaskifti_búnaðarstovan_juni 2020

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Hald av skógfriðaðum øki er í løtuni uml. 2,50 kr./m$^2$/ár. Tó kann nærri avtalast millum Tórshavnar kommunu og Skógrøkt landsins um hetta.
Harumframt kostnaðir fyri hegn, gøtuskipan og træplanting o.a. meting er ikki gjørd fyri hendan partin. Hetta raðfestir kommunan.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at spyrja Búnaðarstovuna, um tað ber til at víðka verandi avtalu sambært skjali 20/01272-3 og hvørjar treytir og bindingar eru og verða settar í tí sambandi, og leggja málið aftur fyri nevnd til endaliga støðutakan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2020:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður ímóti.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum, fyri hana luttók Gunvør Balle.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Ein meiriluti, Annka Olsen, Gunnvør Balle og Turið Horn, tekur undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við at skógfriða økið vísandi til at økið frammanundan liggur sum D1 økið og mælir til at økið verður varðveitt sum D1 økið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Sigrun Wardum, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddi: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Upprunaliga avtalan frá 2012 um makaskifti í sambandi við bygging av Glasir var, at Tórshavnar kommuna læt 31.492 $m^2$, og afturfyri fekk 32.087 $m^2$ frá Búnaðarstovuni. Búnaðarstovan ynskir at víðka avtaluna, til eisini at umfata ovara part av Hoydølum og urtagarðsøkini á Ternuryggi, tilsamans 149.362 $m^2$, við teirri treyt, at økið verður skógfriðað.
Talan er sostatt um, at kommunan í avtaluni letur 31.492 $m^2$ og fær 149.362 $m^2$.
Lutfallið er 1:4,74

Tórshavnar kommuna hevur í sambandi við at ynski er at víðka avtaluna um makaskifti, við økinum smb. *skjal 20/01272-13 makaskifti Búnaðarstovan yvirlit*, verið á fundi við umboð fyri Búnaðarstovuna, Yvirfriðingarnevndina og Skógfriðingarnevndina, fyri at viðgera hvørjar treytir verða galdandi fyri byggiøki, ið liggja á uppatliggjandi matriklum. Vanligt er, at ætlanir í frástøðu innanfyri 300 m frá skógfriðaðum øki skulu til hoyringar hjá Skógfriðingarnevndini.
Á fundinum 25. september varð lagt fram, at Tórshavnar kommuna ynskir at bygging, ið liggur í byggisamtyktarøki, ið er útlagt til bygging og liggur uppat skógfriðaðum øki, fylgir ásetingum fyri byggisamtyktina og ásettu friðingarlinjuni við Hoydalsá.
Hetta skal skiljast soleiðis, at ynski er, at sæð verður burtur frá ásetingini um at bygging 300 m frá skógfriðaða økinum skal til hoyring hjá Skógfriðingarnevndini, og at bygging uttanfyri friðingarlinjuna verður viðgjørd eftir reglum í galdandi byggisamtyktum.
Náttúrfriðingarnevndin og Skógfriðingarnevndin ynskja eisini einfaldari mannagongd á økinum.

**Niðurstøðan frá fundinum:**
Yvirfriðingarnevdin boðaði frá, at um byggisamtyktir hava verið til hoyring hjá Náttúrufriðingarnevndini og eru góðkendar, skulu umsóknir um byggiloyvi, ið fylgja ásetingum í byggisamtyktini ikki til hoyringar hjá náttúrufriðingarmyndugleikanum.
Skógfriðingarnevndin boðaði frá, at fyri skógfriðaða økið, ið verður partur av makaskiftisavtaluni, skal ein umsitingarætlan gerast í samstarvi millum Tórshavnar kommunu, Búnaðarstovuna og Skógfriðingarnevndina.
Umsitingarætlanin ásetur eisini treytirnar, sum liggja til grund fyri at bygging innan 300 m frá skógfriðaða økinum ikki skulu til hoyring hjá Skógfriðingarnevndini.

**Mannagongd:**
Næsta stig er at fáa býráðsins góðkenning at fara undir at gera umsitingarætlan sum partarnir semjast um. Eftir hetta kann víðkaða makaskiftisavtalan avgreiðast endaliga.

**Skjøl:**
*skjal 20/01272-13 makaskifti Búnaðarstovan yvirlit*
*skjal 20/01272-6 makaskifti_búnaðarstovan_juni2020*

**Tilmæli:**

Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at samtykkja, at avtalan um makaskifti millum Tórshavnar kommunu og Búnaðarstovuna verður víðkað sambært skjali 20/01272-13, at økið verður skógfriðað smb. skjali 20/01272-6, og at Tórshavnar kommuna í samstarvi við Búnaðarstovuna og Skógfriðingarnevndina fer undir at gera eina umsitingarætlan fyri skógfriðaða økið, ið ásetir treytir fyri økið, og byggisamtyktarøki, ið eru innanfyri 300 m frá skógfriðaða økinum. Tá semja er um umsitingarætlanina, verður hon løgd fyri til politiska støðutakan, og verður endaliga makaskiftið tá endaliga avgreitt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. oktober 2020:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, mæla til at samtykkja at avtalan um makaskifti millum Tórshavnar kommunu og Búnaðarstovuna verður víðkað sambært skjali 20/01272-13 og at umsitingarætlanin fyri økið verður gjørd, áðrenn endaliga støðutakan.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum, fyri hana luttók Gunvør Balle.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt. Markin Katrin Frýdal fór av fundinum vegna ógegni og í hennara sess kom Jógvan Arge.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við Skógfriðingarnevndini og Búnaðarstovuni gjørt umsitingarætlan fyri skógfriðaða økið, sum er partur av víðkaðu avtaluni um makaskifti millum Tórshavnar kommunu og Búnaðarstovuna. Endamálið við ætlanini er:

- at varðveita landslags-, náttúru- og frílendisvirðir í økinum
- at staðfesta økið sum frílendisøki, og at tryggja framhald av ætlaða dáminum í økinum
- at langtíðartryggja frílendisvirðini og atgongd hjá almenninginum.

Sí journal nr. 20/01272-20 Umsitingarætlan Ternuryggur26112020.

Kolonihavaøkið skal umsitast í samsvari við ásetingarnar í serstøku byggisamtyktini. Serstaka byggisamtyktin avmarkar virkisøkið fyri náttúrufriðingarlógina og skógfriðingarlógina í mun til almennu byggisamtyktina.

Tórshavnar kommuna er byggimyndugleiki á økinum sambært serstøku byggisamtyktini og umsitur Tórshavnar kommuna hereftir leigu av býlisgørðunum (kolonihavunum).

Tórshavnar kommuna og Skógfriðingarnevndin skulu í felag tryggja, at økið verður brúkt sambært endamálinum.

Skógfriðingin verður í hesum føri brúkt sum ein økisfriðing, sum skal tryggja frílendisvirðini í økinum og framhald av upprunaliga ætlaða virkseminum í økinum. Útreiðslur í hesum sambandi verða ikki í sama mun sum til rakstur av viðarlundum, men verða avmarkaðar til viðlíkahald av gøtum og møguligum fríøkjum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja umsitingarætlanina, sum Búnaðarstovan, Skógfriðingarnevndin og Tórshavnar kommuna í felag hava gjørt um umsiting av býlisgarðarøki framvið Hoydalsá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum, fyri hana luttók Gunvør Balle.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle, Bergun Kass og Tróndur Sigurðsson taka undir við fyriliggjandi umsitingarætlan við teirri broyting, at serstøk umsitingarætlan verður gjørd fyri matr. nr. 1470a, 76 og 77, tá ið øll vegagerð í økinum í sambandi við innkomuvegnum er liðug. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini við 7 atkvøðum fyri, 1 ímóti og 5 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jóannes Guttesen, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddi Annfinn Brekkstein

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Mari Katrina Frýdal boðaði frá, at hon er ógegni í málinum og fór av fundinum. Í hennara stað møtti Jóannes Guttesen.

# 313/20 Útbjóðing av útstykking við Miðhorn í Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.10.2020 | 53/20 | 20/03654-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 182/20 | 20/03654-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 262/20 | 20/03654-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 230/20 | 20/03654-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 343/20 | 20/03654-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.12.2020 | 360/20 | 20/03654-1 |
| 7 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 313/20 | 20/03654-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 254/20 | 20/03654-1 |

**Upprunin til málið:**
Ásannandi at tørvur støðugt er á fleiri bústøðum í Tórshavnar kommunu, og at neyðugt er at útvega fleiri byggiøki, fer kommunan undir at bjóða økið við Miðhorn út í almenna sølu.
Kommunuætlanin vísir á, at tørvur er á ymiskum bústaðasløgum, og metir umsitingin at hetta økið kann skipast við blandaðari bústaðabygging.

Mál nr. *19/01753* um útstykking av økinum við Miðhorn varð viðgjørt og samtykt í fíggjarnevndini 22. januar 2020.

Samtykt var:

- at kanna eftir um NN Holding eru áhugaðir í at makaskifta til íbúðarbygging, sambært avtalu undir Kongavarða.
- at økið, sum er eftir, eftir møguligt makaskifti, verður lýst til sølu í almennum útboði, til bústaðarbygging, eftir treytum sum umsitingin setur.

Kommunala eftirlitið hevur ikki góðkent ætlanina um at makaskifta ognina til NN Holding, og verður tí mett, at økið undir Miðhorni eigur at verða boðið út til almenna sølu til skipan av blandaðari bygging, bæði sethúsa- og íbúðabygging, herundir eisini leigubústaðir, eftir treytum ið umsitingin setur.
Økið, ið boðið verður út er sambært vegleiðandi kortskjali: *Møgulig byggilinja og útstykking til bústaðir, journal nr. 20/03654 - 3.*

Økið við Miðhorn liggur millum tveir býlingar, ið lýsa hvør sín bústaðardám. Vestanfyri liggur Norðasta Horn við sethúsum og tvíhúsum og eystanfyri liggur Millum Horna við íbúðarhúsum og sethúsum.
Um hugt verður eftir lendinum, kundi ein byggilinja við íbúðarhúsum verið løgd sum framhald frá íbúðarhúsunum Millum Horna og vestureftir móti Norðasta Horni og sethúsaútstykking verðið sambinding millum býarpartarnar.
Sí skjal 20*/03654 – 3 møgulig byggilinja og útstykkingar til bústaðir*

Keypari av ognini, skal prosjektera útstykkingina, soleiðis at samlaða byggingin er skipað í eini heild í mun til lendið og felagsøki. Økið skal skipast við atliti at atkomuviðurskiftum fyri øll, bæði í byggingini sjálvari og í mun til atkomu- og ferðsluviðurskiftum í økinum.

Tilboðsgevarar skulu hava neyðugar fakligar førleikar til at lýsa og loysa samlaðu ætlanina í síni heild.

**Lýsing av málinum – samandráttur**:
At byggja bústað á økinum við Miðhorn, hevur tað við sær, at Norðasta Horn fær betri samband við býin. Talan er um eitt avmarkað øki á matr. nr. 1160a, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, sí kortskjalið.

Kortskjalið er bert vegleiðandi, og skal eitt hóskandi øki sundurbýtast frá matr. 1160a til endamálið. Á økinum eru fýra leigumál um traðarbrúk, sum eru uppsøgd at fara úr gildi 30. November 2020.

Í sambandi við útbjóðingina av økinum, fáa grannar høvi at koma við viðmerkingum, so teirra ynski í størst møguligan mun verða tikin við í ætlanina.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Vegaatkoma verður frá Landsvegi ella frá privatum vegi, millum Horna.
Økið liggur í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum í høvuðsheitum verður nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.
Almenna byggisamtyktin skal tí broytast fyri økið, um farið verður undir útstykkingina, soleiðis at økið verður fevnt av ásetingunum fyri A1 øki, og alt eftir nágreiniligu útstykkingarætlanini, verður helst neyðugt at gera serstaka byggisamtykt. Tað vil siga, at byggisamtyktin skal broytast fyri økið.
Hugsast kann, at partur av økinum verður í A1 øki og partur verður í A3 øki, og at serstøk byggisamtykt skal gerast fyri part av økinum.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Málið verður avgreitt við allar avvarðandi myndugleikar og leigarar. T.d. liggur økið upp at landsvegi, sum krevur eina hoyring hjá Landsverki. Harafturat skal ein matrikulering fara fram, sum krevur eitt samskifti við Umhvørvisstovuna.

**Skjøl:**
*Møgulig byggilinja og útstykking til bústaðir, journal nr. 20/03654 - 3.*

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, býverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:
- at umsitingin fær heimild at bjóða økið við Miðhorn út í almenna sølu.
- útbjóðingin skal skipast í tvær verkætlanir:
  1. Sethúsaøki
  2. Íbúðarbygging til leigu
- Útbjóðingin verður skipað eftir sama leisti, ið áður er brúkt, sambært útbjóðingartreytum, ið umsitingin setir.

Umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 06. oktober 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Bergun Kass og Tróndur Sigurðsson, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, tekur ikki undir við málinum og mælir til, at spurningurin um yvirtøku av landsvegnum verður avgreiddur, áðrenn økið verður boðið út sambært omanfyristandandi treytum.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, ongari ímóti og seks blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Tá freistin at lata tilboð inn 4. des 2020 kl. 15 var farin, vóru ávikavist 8 tilboð innkomin – 4 tilboð uppá íbúðarøkið og 4 tilboð upp á set-/raðhúsaøkið. Harumframt góvu tveir tilboðsgevarar alternativt tilboð inn upp á bæði økini.

Boðgevararnir fingu síðani møguleika at lata inn hægri boð, og skuldu hesi verða kommununi í hendi í seinasta lagi 8. desember 2020 kl. 15.

Tá seinna freistin at lata tilboð inn 08. des 2020 kl. 15 var farin, vóru ávikavist 4 tilboð innkomin – 2 tilboð uppá íbúðarøkið og 2 tilboð upp á set-/raðhúsaøkið, umframt at tveir tilboðsgevarar góvu alternativt samlað tilboð inn upp á bæði økini.

Av tí at útbjóðingarskrivini ikki biðja um samlað tilboð fyri bæði økini, so verður mett, at alternativu tilboðini ikki kunnu takast við í viðgerðina av tilboðunum, og verða tey tí strikaði.

Tilboðini fyri 1. og 2. rundu eru lýst í viðhefta skjali, Tilboðsupphæddir Miðhorn, journal nr. 20/03654-33.

Hægsta tilboðið var tilboðið frá Felag undir stovnan v/Gordon Rajani. Felagið lat eitt samlað tilboð inn áljóðandi kr. 5.105.400,00, og er tilboðið sum omanfyri nevnt ikki tikið við í viðgerðina. Tó verður í tilboðnum boðin fermetra kostnaður á kr. 402 kr/fermetur, sum samlað gevur omanfyri nevndu tilboðsupphædd. Verður upphæddin býtt á ávikavist íbúðaøkið á 5.700 fermetrar og set-/raðhúsaøkið á 7.000 fermetrar, eru boðini ávikavist kr. 2.291.400,00 fyri íbúðaøkið og 2.814.000,00 fyri set-/raðhúsaøkið. Tilboðið hevði harumframt hesi fyrivarni:

> **Fyrivarni:** Vit hava uml. 4.827m2 av lendi til avlops undir Kongavarða. Hetta lendi ynskja vit at lata innaftur til Tórshavnar Kommunu fyri ein prís á 870 kr/m2 sum er hóskandi og sum tí skal mótroknast. Millumgjald verður sostatt: 822.510,-
>
> Fyrivarni verður eisini tikið fyri, at man blívur samdur um, hvussu vegurin verður gjørdur. Tí ynskiligt er at tillaga vegaloysnina.

Umsitingin metir, at hesi fyrivarni frá felagnum víkja ov nógv frá kravinum um fígging, til at tilboðið kann góðtakast. Viðmerkjast kann, at verkætlanin undir Kongavarða og málið um sølu at lendi við Miðhorn ikki kunnu knýtast saman á tann hátt, ið gjørt verður í fyrivarninum til tilboðið.

Fortreytin fyri tilboðnum er, at Tórshavnar kommuna keypir uml. 4.800 m² av lendi undir Kongavarða frá felagnum fyri 870 kr./m², og at peningurin frá hesi sølu gongur inn í boðið upp á lendið við Miðhorn.

Víst skal verða á, at Tórshavnar kommuna ikki hevur samtykt at keypa aftur uml. 4.800 m² av lendi frá felagnum undir Kongavarða fyri 870 kr./m², og tí fyriliggur eingin avtala um hetta.

Av tí at tilboðsgevarin treytar sítt boð av einum øðrum handli, sum eingin avtala fyriliggur um, fer umsitingin at mæla frá at taka av tilboðnum, og mælt verður tískil til at vraka tilboðið frá felagnum.

Næst hægsta tilboðið á kr 1.635.900,00 fyri íbúðaøkið var frá Articon. Hetta tilboðið hevur ein fermetrakostnað áljóðandi 287,00 kr fyri teir 5.700 fermetrarnar. Tilboðið er væl lýst við einum sokallaðum skipanaruppskotið og er uttan nøkur fyrivarni.

Næst hægsta tilboðið á kr. 2.550.000,00 fyri set-/raðhúsaøkið var frá Felag undir stovnan v/ Janus Petersen. Hetta tilboðið hevur ein fermetrakostnað áljóðandi 364,28 kr fyri teir 7000 fermetrarnar. Tilboðið hevði harumframt hesi fyrivarni:

> Boðið er givið við teirri fortreyt, at ein annar keypir stykkið til íbúðarbygging, og at kostnaðurin til skipan av økinum, og at gera vegin og fríøkið, verður býttur líka millum keyparan av íbúðarverkætlanini og keyparan av sethúsa-/raðhúsaverkætlanini.
>
> Viðmerkjast skal, at boðið er givið við atliti til ta óvissu, sum liggur í, at myndugleikatreytir v.m. í pkt. 3.2 í útbjóðingartilfarinum ikki er útgreinað nærri. Harvið er ein ávís óvissa hjá tilboðsgevara í mun til kostnaðarútrokningar og váðan við verkætlanini.
>
> Tað er ein fortreyt, at ein leistur verður gjørdur til at handfara eina møguliga støðu, har semjast ikki fæst við keyparan av íbúðarstykkinum og/ella kommununa, um skipan og útbygging av økinum.

Umsitingin metur ikki, at hesi fyrivarni eru ov víttgangangandi í mun til treytirnar í útboðstilfarinum.

Tó hevur umsitingin mett um tilboðið í mun til aðrar sambærligar sølur av lendi seinastu árini, og lendi, ið er til sølu í privatum handli í løtuni. Hesar sølur vísa greitt, at byggilendi til sethús verður selt fyri ein munandi hægri kostnað enn tann, sum er boðin fyri lendið undir Miðhorn, sí j.nr. 20/03654-32.

Av tí at tilboðsupphæddirnar fyri set-/raðhúsaøkið ikki er at meta ájavnar við onnur líknandi økir, sum antin standa til sølu ella nýliga eru seld í kommununi, so metir umsitingin, at útbjóðingin fyri set-/raðhúsaøkið eigur at verða strikað vísandi til, at ein søla fyri tann prís, ið er boðin, ikki er fíggjarliga skynsom.

Skotið verður í staðin upp, at kommunan sjálv stendur fyri einari kommunalari sethúsa/raðhúsaútstykking í økinum, og á henda hátt tryggjar borgarum í kommununi nøkur grundøkir, sum verða útlutað eftir kommunala leistinum í sambandi við útlutan.

Viðvíkjandi økinum til íbúðarbygging verður tó mett, at innkomna boðið er nøktandi, vísandi til tær avmarkingar, ið eru lagdar á økið, herundir serliga at talan skal vera um leigubústaðir .

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til:

- At annulera alternativu tilboðini.

- At annulera tilboðini upp á set-/raðhúsa økið, grundað á at sambærlig øki í kommununi verða seld fyri væl hægri kostnað enn innkomnu tilboðini eru ájóðandi, og grundað á, at mett verður skilabetri, at kommunan fer undir at skipa set-/raðhúsa útstykkingina.
- At taka av tilboðnum hjá Articon upp á íbúðarøkið, hetta grundað á, at kostnaðurin verður mettur at vera á nøktandi støði fyri hetta lendið í mun til tær avmarkingar, ið ætlanin er at leggja á økið í sambandi við søluna.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at økið til set-/raðhús verður boðið út aftur til sølu við treytum um, at byggjast skulu leigubústaðir á hesum øki. Málið beint í býráðið.

Heðin Mortensen atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í fíggjarnevndina, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Turid Horn, Bogi Andreasenn og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um uppskot frá Heðini Mortensen um at beina málið aftur í fíggjarnevndina, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Anniku Olsen:

Mælt verður til at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini við teirri broyting, at viðvíkjandi lendinum til set-/raðhús verður - vísandi til samtyktina í máli 18/01973 og ætlanina at makaskifta lendi á Kongavarða við lendi við Miðhorn, mælt býráðnum til enn einaferð at troyta møguleikan at fáa loyvi til upprunaligu ætlanina um at makaskifta og, um hetta ikki ber á mál, at bjóða lendið við Miðhorn, ið var ætlaður til set-/raðhús, út í fríari sølu við treytum um, at leigubústaðir skulu byggjast á ognini.

Broytingaruppskotið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Turid Horn, Bogi Andreasenn og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Býráðslimirnir Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein gera galdandi, at teir ikki eru kunnaðir um teir nýggju upplýsingarnar, sum fyriliggja í málinum og sum grunda avgerðina hjá meirilutanum og føra tískil fram, at málið ikki er nóg væl lýst og átti at verið beint aftur í nevnd at viðgera.

# 314/20 Gøtan kring Havnina og fiskastykkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 175/17 | 17/02247-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 246/17 | 17/02247-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 56/17 | 17/02247-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.11.2017 | 54/17 | 17/02247-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 306/17 | 17/02247-1 |
| 6 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 308/17 | 17/02247-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2018 | 177/18 | 17/02247-1 |
| 8 Tekniska nevnd | 02.10.2018 | 56/18 | 17/02247-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 74/18 | 17/02247-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 251/18 | 17/02247-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 374/18 | 17/02247-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 358/18 | 17/02247-1 |
| 13 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 320/18 | 17/02247-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 17/19 | 17/02247-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 153/19 | 17/02247-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 242/19 | 17/02247-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 278/19 | 17/02247-1 |
| 18 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 250/19 | 17/02247-1 |
| 19 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 13/20 | 17/02247-1 |
| 20 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 21/20 | 17/02247-1 |
| 21 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 15/20 | 17/02247-1 |
| 22 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 98/20 | 17/02247-1 |
| 23 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 130/20 | 17/02247-1 |
| 24 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 101/20 | 17/02247-1 |
| 25 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 250/20 | 17/02247-1 |
| 26 Fíggjarnevndin | 17.12.2020 | 359/20 | 17/02247-1 |
| 27 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 314/20 | 17/02247-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Býarskipanardeildin hevur arbeitt við eini ringrás kring Havnina. Ringrásin er eitt áleið 35 km langt gøtu- og vegasamband, sum liggur í landslagnum kring býin. Hugskotið er at leiða borgaran og ferðafólk út í náttúruna umframt at skapa søguligar og mentanarligar upplivingar á leiðini.

Ringrásin er eitt samanhangandi strekki, sum fevnir um seks styttri og longri leiðir við hvør sínum serliga eyðkenni - frá miðbýnum og niðan í fjallalendið. Ringrásin bjóðar tí náttúrupplivingar við rørslu og útsýni umframt upplivingar fram við bygdum øki, har surrandi býarlívið skilur seg týðiliga frá tí opna landslagnum. Landslagið er sermerkt við jørð, vatn og vindi, ið avgjørt setur sín dám á leiðina.

Ringrásin tillagar seg landslagið, og fylgir so vítt møguligt verandi vegum og gøtum, sum tilsamans telja 25 km av leiðini.

Gøtan millum bý og hav
Sum ein liður í heildarætlanini av ringrásini er uppskot at gera gøtu fram við strondini Yviri við Strond. Hugsanin er at skapa eitt samband frá Skansanum og niðan til Boðanes, har fólkið kann flyta seg burtur frá einum vegastrekki við nógvari ferðslu og tættari

at náttúruni. Harafturat kann kommunan verja landslagið við at leiða fólk, hvar tey skulu ganga, hetta eisini í mun til vaksandi ferðafólkatalið.

Væl vitandi um, at hav og vindur setur sín dám á strondina, vil leiðin ikki altíð vera atkomulig, tá sjógvur skolar inn yvir. Arbeiðast skal við eini ítøkiligari ætlan, ið nemur við tilfarsval í mun til vatnføri, og hvussu sniðgivið verður við virðing fyri náttúruni.

Fiskastykkið
*Yviri við Strond er einasta fiskastykkið, sum eftir er í Havn. Hetta eigur at verða varðveitt og atkomuligt fyri almenningin.*

Leiðir leggja seg eftir, hvar menniskjan hevur havt ávirkan á landslagið. Hetta kemur m.a. til sjóndar í søguligum og mentanarligum slóðum. Eitt dømi um hetta er fiskastykkið Yviri við Strond, ið liggur á leiðini frá Skansanum til Boðanes. Økið varð nýtt til fiskaturking, eisini nevnt fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu.

"Helst eru tey farin at turka fisk á stykkinum yviri við Strond í seinnu helvt av 1920-árunum, ella kanska fyrst í 1930-árunum. Sostatt var virksemið hjá fyritøkuni stutt har yviri.
*Í 1934 søkti Johannes í Stórustovu um loyvi at byggja eitt pakkhús "ved Torgard anlagte Fisketørreplads har jeg tænkt mig opført midlertidig Fiskehus..." Byggiloyvið varð latið honum (Th. Bygningskommision, j. no. 32/1934) V.ø.o. hava tey turkað fisk á hellu og tí steinsetta lendinum á leigutrøðni hjá Johannesi, áðrenn húsið varð bygt. Ein abbasonur Johannes í Stórustovu, Johannes Jacobsen, f. 1935, vanliga nevndur Hannis í Stórustovu, veit at siga, at húsini, sum standa í dag, har feløgini Føroya Ellisakfør og Føroyskir Radioamatørar halda til, eru tey somu húsini, sum vórðu bygd til endamálið á sinni, men eru tó umvæld seinni..."*

Sí søguliga lýsing av fiskastykkinum í skjalinum "Fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu". Verandi støða á fiskastykkinum í dag, er hin sama, sum lýst verður í skjalinum, og stendur soleiðis skrivað:

*"...Uttanfyri síggjast enn sjónligu sporini eftir gamla "Bukkvald", og longur uppi er tjaldingarplássið, har fremmandir gestir halda til um summarið. Framvið fjøruna og suður móti Tórgarðstanga, har fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu er, síggjast stórir tyrvdir dungar av alskyns tilfari, asfalt, betong og yvirskotsgróti. Hetta er til lítlan sóma fyri umhvørvið harúti. Fjøran er sum øllum kunnugt friðað, og nú átti tíðin verið búgvin at rudda økið. Undir hesum dungum eru uttan iva eisini leivdir av steinsetta fiskastykkinum.
Á fiskastykkinum liggur antennuútbúnaður, og har hevur tað ligið leingi. Niðriundir húsinum, oman móti fjøruni, stendur onnur útgerð og rustar. Hetta átti avvarðandi kommunalu myndugleikin, sum eigur og umsitur ognina, at síggja til at fáa beint burtur..."*

*"...Sum greitt frá omanfyri átti lendið við Tórgarðstanga at verið ruddað. Tað steinsetta lendið er í støðum vorðið meira ójavnt. Tað er farið av tíðarinnar tonn. Hømilia og illgras skora seg upp millum steinarnar, brotnar fløskur liggja og sløðast..."*

Økið fevnir um 11 matriklar, ið eru ogn hjá Tórshavnar kommunu, Føroya Landsstýri og privatum eigarum.

Fyri at fara undir verkætlanina, gøtu og fiskastykkið, er neyðugt at gera avtalur við avvarðandi eigarar og leigarar og at fáa loyvi frá friðingarmyndugleikunum. Leigusáttmáli er við Føroyskir Radioamatørar og Føroya Ellisakfør.

Á sumri 2017 var verkætlanin um "Tórsstien" løgd fram, sum starvsnæmingar gjørdu á býarskipanardeildini. Uppskotið er gott grundarlag at arbeiða út frá, og skal ein ítøkilig ætlan gerast, sum í høvuðsheitum fevnir um at rudda økið, gera gøtu og uppskot til skipan av fiskastykkinum og øðrum hóskandi mentanarsøguligum minnum og útsýnisstøðum á strekkinum Yviri við Strond. Mælt verður somuleiðis til at ein ítøkilig ætlan verður gjørd í stigum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið fram við strandarlinjuni Yviri við Strond liggur í umráðispartinum D1, umframt at ein partur av økinum liggur í B6 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentanarlig endamál og tílíkt. Um at skipa gøtur í B6 skal loyvi fáast frá eigarunum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Málið um varðveitan av nevnda fiskastykki varð reist í 1992. Økið varð skrásett og ein ítøkilig ætlan varð gjørd um at hampa økið og harnæst at varðveita fiskastykkið. Harafturat varð mett frá einum frílendissjónarmiði, at økið av Skansanum - ella Eystfalsskeri og niðan á Boðanes – átti at fatast sum ein heild, og tí er fiskastykkið yviri á Tórgarði áhugavert og hevur sjálvsagdan søguligan týdning. Málið var fyri í mentamálanevndini í 1995, men har kom tað ikki longur.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Økið er friðað sambært lóg um náttúrufriðing.

**Umhvørvisárin**
Mett verður ikki, at gøtan fer at hava serligt árin á umhvørvið.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Krøv frá eigarum og brúkarum av lendinum og ætlanarkostnaður.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Ymisk viðurskifti framvið strond skulu gerast í samráð við mentamáladeildina.

Húsaumsitingin metir bygningin ikki vera í góðum standi, og mælir til, at bygningurin verður tikin niður.

Býarverkfrøðingurin tekur undir við ætlanini treytað av, at nýggj staðseting verður funnin til Reinhaldið til at umskipan av sópingarmaskinunum. Og atlit skulu takast til kloakkviðurskifti á staðnum.

**Skjøl:**
Fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu, journal nr. 17/02247-2
*Tórsstien,* journal nr. 17/02247-3.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at byrja at gera ítøkiliga verkætlan og at fara í samráðingar við avvarðandi myndugleikar og eigarar umframt at játta kr. 1 mió. av íløgunum fyri 2018 til verkætlanina og at beina málið í mentamálanevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina, teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at arbeiða víðari við ætlanini.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Tikið verður undir við byggi- og býarskipananevndini.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við ætlanini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. november 2017:** Samtykt at taka undir við ætlanini.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, mentamálanevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti – kunning um verkætlanina:**
Fundur hevur verið við Ólav Frederiksen, formann hjá Føroyskum Radioamatørum,
um at fara í holt við at rudda fiskastykkið og at bjóða økið út til uttanhýsis ráðgeva at koma við uppskoti til, hvussu økið kann gerast til eitt uppihaldsstað, har ljós er varpað á søguna á økinum.
Sambært Ólav hevur felagið onga stórvegis útgerð á fiskastykkinum, og verkætlanin fer ikki at ávirka virksemið hjá felagnum. Ólavur viðmerkir tó, at tað hevði verið tryggast, um onkur forðing varð gjørd millum fiskastykkið og restina av matriklinum, soleiðis at vitjandi ikki fara inn á økið, har allir káplarnir liggja. Sí Fundarfrásøgn Fiskastykki, journal nr. 17-02247-25.

Umsitingin hevur móttikið skipanaruppskot til, hvussu fiskastykkið kann koma at síggja út og uppskot uppá hvussu verkætlanin kann býtast upp í átøk og byggistig frá ráðgeva EYA v/Eyðun Eliasen. EYA hevur tillagað uppskotið eftir kunning frá Ólavi sí Fiskastykkið við Strond_Skipanaruppskot, journal nr. 17-02247-26.

**Samandráttur av skipanaruppskotinum**
Uppskotið fevnir um økið frá norðanfyri vegnum móti campingøkinum og vegnum út á Bukkvald og suðurum lítlu "víkina" við matrikulmarkið (sí s. 12 í uppskotinum). Í skipanaruppskotinum verður mælt til at byggja uppá og fríðka um verandi øki við at:

- leggja tilfar afturat verandi rúgvu av mold, grasi o.l. fyri at gagnnýta økir við lívd, útsýnislinjum og sólargangi.
- reinsa og á summum støðum umvæla steinsetingina á Fiskastykkinum.

Í uppskotinum verður dentur lagdur á at geva vitjandi á fiskastykkinum best møguligu lívd. Uppskot er tí um at gera tvey innvik í skulpturellum skapi, sum vitandi kunnu uppihalda seg í. Innvikini verða skorin inn í steinlaðingina og helluna á Fiskastykkinum. Fyri at fólk skulu trívast á einum útiøki sum hesum, er týdningarmikið at økið ikki er ov vítt. Tí er dentur lagdur á at gera "verjugarðar" móti vestri, norðri og eystri á ovara partinum av fiskastykkinum. Eftir at økið er ruddað og nærri skrásett, verður støða tikin til, hvussu langt suðureftir tað broytta fiskastykkið skal fara. Skráarnir á økinum verða klæddir við timburbrettum, so hallið ikki verður ov stórt. Hetta ger tað eisini møguligt at skapa eina farleið, sum kann knýtast at ætlaðu 'Gøtuni kring Havnina'.
Uppskotið fevnir eisini um at gera parkeringsøkið har sum Reinhaldið heldur til í dag og at nýta asfaltrúgvuna móti sjónum til at geva lívd.

Harafturat verður eitt ítøkiligt átak skotið upp, ið snýr seg um at umskapa bygningin á ognini til endamál, sum hava tilknýti til fiskastykkið ella líknandi evni. Talan kann vera um eitt savn við framsýningum um fiskavinnu og –yrki og/ella eina matstovu, sum borðreiðir við saltfiskavørum. Hugskotið er sera áhugavert, men umsitingin metir, at tað verður torført og sera dýrt fyri Tórshavnar kommunu at flyta føroyskar radioamatørar, ið leiga matrikulin, á annað øki. Leigusáttmálin millum Føroyskir Radioamatørar og Tórshavnar kommunu er galdandi til 2029. Sambært Radioamatørunum eru káplar blivnir lagdir á lendið gjøgnum eitt langt áramál, og eru sera nógvir arbeiðstímar lagdir í hetta arbeiði. Káplarnir liggja sum eitt eiturkoppanet á einum stórum parti av økinum, og tað er nærum ómøguligt at flyta ella taka káplarnar uppaftur.

Uppskotið fevnir um 8 byggistig (sí s. 17 í uppskotinum). Umsitingin mælir til, at farið verður ígongd við at bjóða byggistig 1, 3, 4 og 8 út til ávikavist ráðgeva og tilboðsgeva at menna. Sí byggistig niðanfyri.

1. Skráseta økið neyvari fyri møguligar leivdir, lutir o.a.
3. Rudda alt økið. Fyrst leyst tilfar og órudd og síðan mold og óegnað gróttilfar o.a.
4. Gera og góðkenna endaligu verkætlanina og fáa loyvi frá friðingarmyndugleikum.
8. Bukkvald-verkætlanin gerast so hon eisini gerst ein natúrligur partur av økinum.

Umsitingin fer í næstum at finna nýggja staðseting til Reinhaldið.

**Skjøl:**

Fundarfrásøgn Fiskastykki, Journal nr.17-02247-25
Fiskastykkið við Strond_Skipanaruppskot, Journal nr. 17-02247-26

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin umrøður uppskotið uppá verkætlanina og beinir málið í teknisku nevnd til kunningar, umframt at umsitingin fer undir at seta ymisku átøkini í verk.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 02. oktober 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti – nýggj staðseting til Reinhaldið**
Saman við teknisku deild hevur býarskipanardeildin gjørt uppskot um nýggja staðseting til umlastuplássið hjá reinhaldinum í Gundadali.

Smáu feiu-bilarnir eru ikki egnaðir at koyra langar teinar, og arbeiðsfólk við trillubøru skulu sleppa av við ruskið uttan at skula ganga ov langt, tí er týdningarmikið at nýggja staðsetingin er nærhendis miðbýnum. Hugskotið er at savna øll umlastuplássini hjá reinhaldinum í Gundadali. Hetta merkir, at umlastuplássini á Skálatrøð og á Bukkvald verða flutt, og at hesi øki tí eisini verða tøk til framtíðar verkætlanir.

Uppskot upp á staðseting í Gundadali eru gomlu vaskiplássini hjá bilstøðini Bil, sum Tórshavnar kommuna er eigari av. Neyðugt verður at tillaga plássini til bingjur og gera vaskipláss við oljuútskiljara. Ein gamal oljuútskiljari er á plássinum, men um hesin kann brúkast má eftirkannast. Um tangin ikki kann brúkast, kann oljutangin á Bukkvald blíva tikin upp og staðsettur í Gundadali. Fólk frá Tórshavnar kommunu er frammanundan í Gundadali og rudda aftaná landsdystir og sunnudagsdystir. Tí er upplagt, at sameina hetta virksemið við umlastuplássið hjá Reinhaldinum og skipa alt hetta í Gundadali.

Fyri at plássið skal verða til so lítlan ampa fyri grannar, virksemi og vitjandi á økinum sum gjørligt, er neyðugt at gera ein uml. 2 m høgan garð uttan um plássið. Plássið liggur beint uppat einum grønum kliva av runnavøkstri, og tí vildi tað verið upplagt at plantað runnar uppat garðinum, soleiðis at plássið verður betri sameina við verandi øki. Sum sæst á Kort 1 - uppskot um staðseting.pdf journal nr. 17/02247-30, rennur Havnará vestan fyri plássið og mælt verður til at plássið verður flutt 2,5 m eystureftir burtur frá ánni og 0,5 m frá vegnum. Fyri at sleppa undan at hava inn- og útkoyring frá Gundadalsvegnum, verður mælt til at eitt automatiskt portur verður sett á eystaru síðu av plássinum, soleiðis at feiu-bilarnir kunnu koyra inn millum bingjurnar til tøming og vaskiplássið og at lastbilur kann koyra inn fyri at heinta bingjurnar. Samanlagt verður plássið uml. 250 fermetrar.

Kostnaðurin fyri at fyrireika verandi pláss á Bukkvald var uml. kr. 350.000. Av hesum plássi kann oljuútskiljari og skúrur brúkast aftur í Gundadali og harafturat kemur so garðurin.

**Skjøl:**

17/02247-30 Kort 1 - uppskot um staðseting.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekurin mæla til at samtykkja nýggja staðseting av umlastistøð til reinhaldið í Gundadali, at játta 350.000 kr. av L62032 Gøta kring Havnina og Fiskastykkið til flytan av verandi umlastistøð Yviri við Strond niðan í Gundadal, at beina málið í mentamálanevndina til kunningar og síðani í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fyri at koma víðari við ringrásini/gøtuni kring Havnina og kunna byrja uppá strekkið Yviri við Strond, er neyðugt at fara í samráðingar við traðareigararnar (matrikuleigarar), umframt leigararnar av kommunalu stykkjunum.

Størsti partur av matriklunum Yviri við Strond er privatogn, tí verður viðmælt, at hvør einstaki eigari verður innkallaður til ein kunnandi fund við tí fyri eyga at finna eina loysn, ið báðir partar kunnu semjast um.

Væntast kann, at samráðingartíðin verður nakað drúgv. Væntast kann somuleiðis, at ikki allir matrikuleigarar eru eins jaligir fyri tankanum, um at fáa eina gøtu ígjøgnum teirra lendi, og kunnu tí spenna føtur fyri ætlanini ella krevja endurgjald fyri miss av lendi.

**Samandráttur av uppskotið frá SNA:**
Fyri jól lat umsitingin SNA uppgávuna at gera uppskot til staðseting av gøtuni frá Skansanum yvir til Boðanes, umframt staðsetingina skuldi uppskotið fevna um snið av gøtuni.

Uppskotið frá SNA fevnir um strekkið Yviri við Strond, og verður gøtan á hesum strekkinum kallað Strandargøtan. Gøtan strekkir seg góðar 2,5 km frá Skansanum og til Boðanes.

Uppskotið leggur dent á, at Strandargøtan leggur seg eftir landslagnum og er staðsett á markinum millum fjøruna og bøin. Hetta fyri at geva tí vitjandi møguleika at uppliva náttúruna, bøin, fjøruna og brúsandi havið.

Gøtan í sær sjálvum vísir á, at tað menniskjaliga er tilstaðar í økinum, millum land og hav. Hetta sæst aftur í støddarlutfallinum á gøtuni, har mát sum favnur, alin, føtur og tummar verða nýtt gjøgnum alla gøtuna. Hetta styrkir tankan um at gøtan er ein menniskjansskapur bulur, ið er skolaður uppá land, samstundis sum at gomlu máteindirnar verða varðveittar.

Tilfarsvalið verður rátt og einkult, sjálv gøtan kemur at liggja sum ein betong strukturur við eini stálrammu/veggi, men har verða økir, ið verða meir rúmlig og viðgjørd úr øðrum tilfari, so sum timbur, innstoyptir flísar í ymiskum litum og ljósi.

Ynski er, at gøtan minst møguligt er til ampa fyri lendið, tí kemur betongflísin at hava føtur, ið kunnu javnast eftir lendinum, haraftrat verða ljós innleggingar gjørdar, so gøtan verður upplýst.

Á strekkinum verður tann vitjandi kunnaður um áhugaverd støð á strekkinum, har tað er upp lagt at steðga á, og verða hesi steðgiplássini gjørd við bonkum til lívd, kagstøðum, brúgvum o.ø.
Dentur er lagdur á at uppliva skifti í landslagnum, sum at fara frá fjøru til hellu, vøkstur o.a. hetta sæst aftur í sjálvari gøtuni við at ymiskt tilfar verður nýtt sum bindiliður á gøtuni.

Sambandið oman til Strandargøtuna er raðfest við at leggja smáar gøtur úr løgasteinum ígjøgnum summar traðir.

**Fiskastykkið**
Ráðgevarafyritøkan EYA arbeiðir við fiskastykkinum, og í løtuni eru tey í samráðingum við Tjóðsavnið, har uppruna uppskotið verður tillagað. Meir kunning um verkætlanina Fiskastykkið kemur seinni.

**Átøk:**
Neyðugt er at fara í samráðingar við matrikuleigararnar fyri at finna eina loysn, ið hóvar øllum pørtum. Síðani skal Strandargøtan projekterast og setast í verk.

**Skjøl:**
- *Strandargøtan síður A3 print, journal nr. 17/02247-37*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at byrja samráðingar við traðareigararnar og einstøku leigararnar av kommunalu traðunum, fyri síðani at koma aftur í nevndina við einum ítøkiligum úrskurði.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
<u>Skráseting av djóra og plantulívi:</u>
Umsitingin hevur havt fundir við Tjóðsavnið um verkætlanina, og eru komin ásamt um at gera eina skráseting av djóra- og plantulívi á økinum, har gøtan er ætlað. Skráseting av djóralívi verður í eitt ár, og plantuskrásetingin á vári og summari.
Við hesum kann metast um møgulig umhvørvisárin av gøtuni sum frálíður.
Báðar kanningarnar eru farnar í gongd og er avtalað við Tjóðsavnið, at hava ein støðufund í vetur um gongdina, og innkomin úrslit av skrásetingini.

<u>Gøtan kring Havnina:</u>
Umsitingin hevur á vári í 2019 verið í samráð við traðareigararnar og einstøku leigararnar av kommunalu traðunum, og greitt teimum frá ætlanunum, ið Tórshavnar kommuna hevur í økinum. Samráðingarnar hava

gingið væl og samanumtikið hevur undirtøkan verið positiv. Viðmerkingar av ymiskum slagi hava verið, og eru tær tiknar við í víðari viðgerðina av málinum.
Uttanhýsis ráðgevi hevur gjørt uppskot til loysn av elementum, sum skulu byggjast framvið sjóvarmálanum sum gøta.

Royndarverkætlan:
Ætlanin er gera element at byggja gøtuna upp við. Loysnin við elementum ger tað, at lendisviðurskiftini í fjøruni verða órógvað sum minst. Tilfarið av elementunum verður ymiskt, alt eftir hvussu økið er.
Í fyrsta umfari er ætlanin at gera eitt strekki við 3 ymiskum royndarelementum á matr.nr. 651l og 651b, so elementini kunnu roynast í ein vetur, og loysnin kann eftirmetast, áðrenn farið verður víðari.
Matr.nr. 651l og 651b, er ogn hjá Tórshavnar kommunu og verða nýtt til parkering. Royndarelementini verða lætt atkomilig, og koma ikki at órógva verandi virksemi á økinum.

Arbeiðstakarar eru ikki áhugaðir at geva tilboð uppá royndarelementini, men mett verður, at royndarelementini kunnu framleiðast og monterast á staðnum fyri 0,6 mió. kr.

## Skjøl:
*17/02247-37 Strandargøtan síður A3 print*
*17-02247-76 K100_Betongelement_strandagøta*
*17-02247-76 gøta skitsa*
*17-02247-76 gøta perspektiv*

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
- at seta fyribils ætlanina við gøtuelementum í verk,
- at játta 0,6 mió. kr. av konto 6275, L62032, Gøta kring Havnina og fiskastykkið,
- at heimila umsitingini at seta royndarverkætlanina í verk
  og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at arbeiðið ikki er boðið út.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Atkvøtt var um tilmæli hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2020 eru játtaðar 5.000. tkr á konto 6275 fríðkan av kommununi.
Royndarelement til gøtuna kring Havnina eru prosjekterað, boðin út og verða framleidd og sett upp í næstum. Fyrsta stig við rudding av Fiskastykkinum er liðugt, og skal næsta stig setast í verk. Næsta stig er skurður í lendi, umvæling av lagingunum og atkomuviðurskifti til Fiskastykkið, sum verða sett í verk í samstarvi við ráðgeva og Tjóðsavnið.

Liðugtprosjektering av konstruktiva partinum av útsýnispallinum á Bukkvald skal setast í verk, og arbeiðið hareftir bjóðast út.

**Bindingar í lendi**
Løgfrøðilig ráðgeving ísv lendiseigarar og leigarar verður tikið uppaftur í sambandi við framhald av gøtuni. Leigusáttmálin við Føroyskir Radioamatørar og Føroya Ellisakfør er galdandi inntil 2029. Býarskipanardeildin hevur samskift við Radioamatørarnar um hetta, og er semja um, at virksemi hjá teimum eigur at verða flutt, tá ið Fiskastykkið og Gøtan kring Havnina verður tikin í nýtslu sum alment brúksøki. Ynskiligt er tí, at nýggj staðseting verður funnin, so teir kunnu byrja at fyrireika seg til at flyta av økinum skjótast til ber.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta 2.500 tkr. til framhald av ætlanini um gøtuna kring Havnina, Fiskastykkið og Bukkvald av løgukarminum konto 6275, fríðkan av kommununi, á projektkonto L62032, Gøtan Kring Havnina, Fiskastykkið, og at geva býarskipanardeildini heimild at seta arbeiðið í verk.
Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:**
Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipananevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundinum í byggi- og býarskipanarnevndini 23. apríl 2020 varð uppskot til samband millum Sandagerði og Runding lagt fram. Uppskotið var kandidatuppgáva hjá nýútbúnum landslagsarkitekti.

Uppskotið er væl í tráð við ætlanina um ringin kring Havnina, men má tillagast ætlanina við H-Bygninginum hjá Landinum og ætlanina í Álakeri hjá Tórshavnar kommunu sí 19/00083-6 bátahylur í Álakeri – Byggiprogram.

Rætt hevði verið, at fingið landlagsarkitektin at gjørt eitt uppskot uppá hetta sambandið dagført í mun til hesar ætlanirnar, og at greina bindingarnar sum eru uppat sambandinum, fyri at hetta kann loysast í eini heild.

**Skjal:**
19/00083-6 bátahylur í Álakeri – Byggiprogram
17/02247-3 Tórsstien_2017_0

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta 100.000,- kr. av L62032, Gøtan Kring Havnina Fiskastykkið, til at gera tillagað skipanaruppskot til loysn av sambandinum í økinum, og at greina bindingarnar, sum eru uppat økinum, fyri at hetta kann loysast í eini heild og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at umvæla Fiskastykkið er skipað í 3 byggistig.
Byggistig 1 snýr seg m.a. um innvik og gøtu frá vegnum inn til innvikið, og miðling av fiskastykkinum.
Byggistig 2 og 3 eru umskipað nakað í mun til upprunaliga ætlað, soleiðis at gøtan gjøgnum økið er samlað í byggistigi 2, og lendisarbeiðið er samlað í byggistigi 3.
Byggistig 1 er í gongd, gongur væl, og fylgir ætlanini.
Mett verður at tað er skilagott fyri samlaðu ætlanina at fáa gjørt gøtuskipanina gjøgnum økið lidna saman við byggistigi 1.
Fyri at halda áfram við byggistigi 2 og 3, er neyðugt við meirjáttan.

**Skjøl:** 19/03740-39 Fiskastykkið Yviri við Strond – yvirlit og 1. byggistig

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:
- sáttmáli verður gjørdur við arbeiðstakara uppá byggistig 2 og 3
- kr. 500.000 verða fluttar av kontu 6275 L00001 Løgukarmur fyri árið á kontu 6275, L62032 Gøtan kring Havnina og Fiskastykkið
- kr. 900.000, ið 26. nov. 2020 vórðu játtaðar til keyp á trøð í Hoydølum, verða fluttar á L62032 Gøtan kring Havnina og Fiskastykkið, eftirsum trøðin er seld til annan
- kr. 700.000 verða fluttar av kontu 6210 Fríðkan og viðlíkahald á kontu 6275, L62032 Gøtan kring Havnina og Fiskastykkið
- málið verður beint í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at:

- sáttmáli verður gjørdur við arbeiðstakara uppá byggistig 2 og 3
- kr. 500.000 verða fluttar av kontu 6275, L00001 Løgukarmur fyri árið á kontu 6275, L62032 Gøtan kring Havnina og Fiskastykkið.
- kr. 400.000 verða fluttar av konto 6275, L62019 Lendisgøtur á konto 6275, L62032, Gøta kring Havnina og Fiskastykkið.
- kr. 367.000 verða fluttar av konto 6275, L62023 Fílendið við Hoydalsá konto 6275, L62032, Gøta kring Havnina og Fiskastykkið.
- kr. 993.000 verða fluttar av konto 6275, L62033 Havnadalur - fríøkið, L62032, Gøta kring Havnina og Fiskastykkið.
- kr. 370.000 verða fluttar av konto 6275, L62036 Fríðkan av kommununi – Træplanting á konto 6275, L62032, Gøta kring Havnina og Fiskastykkið.
- kr. 450.000 verða fluttar av konto 6275, L62040 Havnin sum súkklubýur á konto 6275, L62032, Gøta kring Havnina og Fiskastykkið.
- kr. 700.000 verða fluttar av konto 6275, L62041 Almenn wc í Tórshavnar kommunu á konto 6275, L62032, Gøta kring Havnina og Fiskastykkið.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2020:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 315/20 Gamla brúgvin um Sandá úti í Havnardali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.02.2018 | 5/18 | 18/00173-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2018 | 31/18 | 18/00173-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 45/18 | 18/00173-1 |
| 4 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 44/18 | 18/00173-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 34/19 | 18/00173-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.07.2019 | 133/19 | 18/00173-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 67/20 | 18/00173-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 99/20 | 18/00173-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 131/20 | 18/00173-1 |
| 10 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 103/20 | 18/00173-1 |
| 11 Býráðsfundur | 11.06.2020 | 122/20 | 18/00173-1 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 246/20 | 18/00173-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 17.12.2020 | 361/20 | 18/00173-1 |
| 14 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 315/20 | 18/00173-1 |

**Upprunin til málið:**.
Landsverk hevur, í sambandi við at nýggjur landsvegur varð gjørdur úr Havn til Gomulurætt, heitt á Tórshavnar kommunu um at taka yvir aftur vegateinin, sum gongur um Sandá, frá traðunum til íbinding í landsvegin har (sí hjáløgdu tekning). Málið er eisini vorið aktuelt í sambandi marknaumskipan millum hagarnar, sum hava mark har.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tá landsvegur varð gjørdur av nýggjum úr Havn til Gomlurætt, vórðu nakrir vegateinar, sum komu at liggja uttan fyri henda nýggja vegin. Gamli vegurin úr Havn til Velbastaðar og Kirkjubøar er frá fyrst í átjandu øld.

Tá ein landsvegur verður avloystur av nýggjum landsvegi, fellur gamli vegurin aftur til fyrrverandi eigaran, um hesin vil tað, og eftir møguliga samráðing. Við tað at hesin vegurin var kommunalur, innan hann gjørdist landsvegur í 1964, kann hann tí fella aftur til kommununa. Tað eru nøkur viðurskifti ið tala fyri, at kommunan yvirtekur vegateinin, sum er lýstur á hjáløgdu tekning:

- fyrst og fremst er tað gamla brúgvin frá umleið 1925 og sum Villiam Tórsheim (keisarin nevndur) lagaði og sum tí hevur søguligt virði fyri kommununa. Ynskir kommunan at varðveita og møguliga endurskapa partar av brúnni, er tað av stórum týdningi at eigaraviðurskiftini eru greið.
- Vegurin har er samstundis vegatkoma til traðirnar niðan fyri Velbastaðvegin við Norðasta Horn, í vestara enda. Tí kann hesin vegurin frameftir trygga vegatkomu til partar av hesum øki í mun til møguliga framtíðar búseting her.
- Ein møgulig framtíðar gøtuskipan millum Havnina og Velbastað/Kirkjubø kann inndraga hendan vegateinin.

Tey viðurskifti sum møguliga tala ímóti at yvirtaka henda landsvegin eru:

- Nakað av fíggjarligum bindingum fylgja við, at kommunan yvirtekur vegastubban og gerst vegamyndugleiki. Serliga við at seta í stand, reka og viðlíkahalda gomlu grót-brúnna. Okkurt smávegis má roknast við asfaltering, tó ferðslan her er sera avmarkað.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir við seinni broytingum

**Umhvørvisárin**
Brúgvin hevur siðsøguligt virði fyri kommununa, og hevur virðir sum bygningsverk, sum varði yvir handverk sum ikki er vanligt í dag.

**Skjøl:** Havnardalur kort j. nr. 18/00173-2
Brúgvin um Sandá gomul klipp j.nr. 18/00173-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | x | x | x | |
| **Umhvørvis avleiðingar** | x | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingur mælir til, at umsitingin fær heimild til at gera neyðugar avtalur um at yvirtaka og staðfesta eigaraviðurskifti av vegi og brúgv.

**Tekniska nevnd 06. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, umvegis fíggjarnevndina, í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heitir á umsitingina um at gera eina kostnaðarmeting av at seta brúnna í uppruna stand.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið prosjekttilfar og kostnaðarmeting uppá afturgerð av gomlu brúnni frá uttanhýsis ráðgeva. Kostnaðarmetingin frá uttanhýsis ráðgeva uppá handverkaraútreiðslur er áljóðandi 1.550.696 kr. u/mvg, men má arbeiðið bjóðast út, fyri at kenna kostnaðin nærri. Harafturat kemur ókent, ráðgeving, eftirlit, leiðsla o.s.fr.

**Eigaraviðurskifti:**
Samskifti hevur verið millum Landsverk, Umhvørvisstovuna og Tórshavnar kommunu um eigaraviðurskiftini. Brúgvin er samband millum markatalsbygd 38 Velbastaður og 55 Tórshavn. Brúgvin er partur av gamla landsvegnum, ið er frábýttur í litra í markatali 55, men liggur sum partur av matr nr 4a “Syðri Spakiseyður” í markatali 38.

Landsverk kannar saman við Umhvørvisstovuni hvussu marknaskipan kann gerast, og kunnar Tórshavnar kommunu, væntandi í næstum, tá tað málið er greiðari.

**Tilmæli:**

Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Eigaraviðurskiftini eru nú komin upp á pláss. Útbjóðingartilfar er gjørt og arbeiðið er nú klárt at bjóða út.

Arbeiðið umfatar, at seta brúnna aftur í uppruna stand herundir:
- Taka burtur asfalt, betongplátu, autoverju og rekkverk
- Reinsa brúnna og reinsa/hampa moldskráar báðu megin brúnna
- Seta upp nýggjar gelendarar fram við brúnni, av tí gamla slagnum
- Umvæla múrverkið, serliga fugur og leggja nýtt asfalt á

Arbeiðið er mett at kosta kr. 1.65 mió. við 6,25% MVG.

Brúgvin verður 100 ára gomul í 2025 og ætlanin er at hon skal verða partur av gøtuskipanini í kommununi.

Útbjóðingartilfarið er j.nr. 18/00173-14

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at umsitingin innheintar 2 undirhondsboð at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið varð boðið út sum undirhondsboð til J&K Petersen og Konsax.
Bert eitt tilboð kom inn 6. nov.2019.
J&K Petersen kr. 2.779.702,- u/mvg.

Metingin hjá ráðgevum varð 1,55 mió. kr.
Hendan upphæddin er langt omanfyri metingina, og verður ikki mett ráðiligt at fara undir hetta arbeiðið.0
Brúgvin er við endan av blindum vegi, so endamálið við at seta hana í stand er í høvuðsheitum av mentanarligum týdningi.
Tó má kannast, um loyvi fæst at gera rekkverkið sum tað gamla var, eftirsum gamla rekkverkið ikki fylgir dagsins krøvum í mun til trygd. Sí skjal *18-00173-6 Gamla brúgvin um Sandá myndir og klipp*

**Skjøl:** *18/00173-6 Gamla brúgvin um Sandá myndir og klipp*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla frá at taka av innkomna tilboðnum, vísandi til at tilboðið er nógv hægri enn kostnaðarmetingin. Eisini verður mælt til, at nevndin tekur støða til, um farast skal undir bara at gera nýtt rekkverk um brúnna, so tað í størst møguligan mun er sum tað upprunaliga rekkverkið var.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at heimila umsitingini at tillaga tilboðið og/ella at finna eina bíligari loysn, til at skifta bilverjuna út við ein stoypijarns gelendara, og gera kanningar, um asfaltlag kann takast av, so brúgvin kemur aftur at líkjast uppruna útsjónd.
Málið verður síðani lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina og mentamálanevndina til støðutakan og útvegan av fígging.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur umrøtt hvussu farast kann víðari fram í málinum.
Semja er um, at til ber ikki bara at taka autoverjuna burtur, og seta gelendara í staðin.
Omaná gomlu brúnni er stoypt ein armerað betongpláta, sum helst er stoypt fyri at javna last frá ferðslu javnt á brúnna, men er eisini ein breiðkan av brúnni, har gamli gelendarin var.

Mett er, at tað rættasta er at biðja arbeiðstakara við serligum hegni at umvæla slíkar laðingar, um at fara undir at umvæla brúnna uppá tímaløn.
Í fyrsta umfari verður mælt til at játta 500.000 kr. til endamálið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta 250.000 kr. av konto 6275, L00001 løgukarmur fyri árið, til nýggja verkætlan «gamla brúgvin um Sandá úti í Havnardali, endurskapan» og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at heita á fíggjarnevndina um at útvega írestandi 250.000 kr.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta írestandi peningin til umvælingararbeiðið av konto 1313.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð at játta kr. 250.000 av 6275, L00001 løgukarmur fyri árið og kr. 250.000 av konto 1313 til umvælingararbeiðið.

Málið beint víðari til aðru viðgerð í býráðnum.

**Býráðsfundur 11. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umvæling av brúnni byrjaði í august 2020, og játtanin til at byrja umvælingararbeiðið, ið varð samtykt 11. juni 2020, er nú brúkt. Fyri at halda fram við arbeiðinum, er tørvur á at játta pening á verkætlanina. Umsitingin hevur, saman við arbeiðstakaranum, tillagað tilboðið soleiðis, at arbeiðið kann gerast liðugt. Partur av arbeiðinum verður tó byggiharraveiting.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At sáttmáli verður gjørdur við arbeiðstakara, og arbeiðið verður framt sambært omanfyri standandi.
- At kr. 2.500.000 verða fluttar av konto 6275, L00001, Løgukarmur fyri árið, á konto 6275, L62042, Gamla brúgvin um Sandá úti í Havnardali.

At málið verður beint í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 316/20 Umsókn um keyp ella nýtslurætt til jarðarstykki, sum liggur eystanfyri matr.nr. 1076l, Stiðjagøta 5, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.12.2020 | 242/20 | 20/04090-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 339/20 | 20/04090-3 |
| 3 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 316/20 | 20/04090-3 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn send inn til kommununa um keyp av lendi uml. 240 fermetrar.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsókn er komin frá eigaranum av matr. nr. 1076l, um keyp ella nýtslurætt til jarðarstykkið, sum er uml. 240 fermetrar til víddar, og sum liggur eystan fyri matrikulin hjá umsøkjaranum. Sí hjálagda kortið, sum vísir økið, umsøkjarin ynskir at keypa.

Umsøkjarin upplýsir í umsóknini, at ætlanin er at koyra oman við bygninginum sunnanfyri og at hava so mikið av plássi eystanfyri, at tað ber til at parkera eystan fyri bygningin.

Upplýsast kann, at býráðið í 17. mars 2016 samtykti, at selja eigaranum av grannaognini omanfyri, (matr. nr. 1070a, mál nr. 2013-0141), eitt øki upp til 300 fermetrar, og verður økið, sum umsøkjarin nú søkir um at keypa, eitt framhald av hesum “geira“ og kemur at fylgja somu linju og somu fjarstøðu til vegin. Sí hjálagda kortið.

Umhvørvisstovan noktaði tá í 2016 at fremja sundurbýti til samanleggingar av matr. nr. 1070a og 1076m, vísandi til at ein partur av økinum lá sum D1 í byggisamtyktini.
Í sambandi við at almenna byggisamtyktin er endurskoðað og samtykt av býráðnum 29. oktober 2020, verður økið, sum grannaognin hevur keypt, umframt økið sum umsøkjarin ynskir at keypa, nú útlagt til vinnuøki - B3. Sostatt verða tey krøv, sum Umhvørvisstovan setir fyri at góðtaka sundurbýtismálini, tí lúkað.

Kommunan hevur ikki nakra ætlan við økinum, sum umsøkjarin ynskir at keypa. Mælt verður tó til at grøni geirin, ið er eftir og sum skilur vegin frá vinnuøkinum, verður varðveittur umframt plantaður, so lendi kring vinnuøkið verður fríðkað.

**Lógir, ásetingar o.a.**
- Almenna byggisamtyktin: broyting samtykt í býráðnum í 2020, sum útleggur økið, sum umsóknin fevnir um, til B3. Broytingin er send til Vinnu- og umhvørvismálaráðið til góðkenningar.
- Kunngerð nr.122, frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn, er galdandi um søla skal gerast av økinum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**
-

**Umhvørvisárin.**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

Stjórnarskrivstovan vísir á, at møgulig søla skal gerast til marknaðarprís, og hevur umbiðið virðismeting av lendinum umsóknin fevnir um. Nevnda virðismetingin verður grundarlag undir prísinum fyri møguligari sølu av lendinum.
Stjórnarskrivstovan vísir eisini á, at tað er ikki neyðugt við almennum útboð av sølu.
Víst verður til kunngerð nr. 122 frá 22.des. 2000 um alment útboð av kommunalari ogn:
§2 *Fastogn nýtist ikki at verða boðin út, um talan er um:*

1. *Sølu til landsmyndugleikar, kommunu ella kommunalan felagsskap, sbr.§57 í kommunustýrislógini*
2. *Sølu til felag, stovn v.m., sum kommunan lógliga kann veita stuðul til*
3. *Sølu av økjum, sum eru minni enn 300m2 til víddar og sum tað ikki sjálvstøðugt verður bygt á ella*
4. *Kommunala útstykkingar o.l., har tillutan og prísáseting fara fram eftir ásettu reglum*

**Skjøl.**
*Kort - økið, umsøkjarin ynskir at keypa*, journal nr. 20/04090-4
*Kort – geirin, sum skal varðveitast*, journal nr. 20/04090-5

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til

- at ganga umsóknini á møti, og selja umsøkjaranum uml. 240 fermetrar av matr. nr. 1070a, at leggja saman við matr. nr. 1076l, fyri marknaðarprís sambært virðismeting og kunngerð nr. 122. Hetta treytað av at neyðuga broytingin í almennu byggisamtyktini verður góðkend av Vinnu- og umhvørvismáláráðnum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 317/20 Fyrispurningur um keyp av matr.nr. 1083a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.12.2020 | 241/20 | 20/04192-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 340/20 | 20/04192-2 |
| 3 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 317/20 | 20/04192-2 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn send inn til kommununa um keyp av matr. nr. 1083a

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsøkjari ynskir at keypa matr. nr. 1083a, ið kommunan eigur, sum ein grannaogn til matr. nr. 1087c, sum umsøkjarin eigur. Sí hjáløgdu kort, sum vísa nevndu matriklar.

1083a verður nýtt sum innkoyring frá Við Sandá til vinnuvirksemi á 1087a. Í dag verður matr. nr.1083a, sum umsøkjarin ynskir at keypa, nýtt til parkering, men eru hesi viðurskifti óskipað. Umsøkjarin upplýsir, at um kommunan loyvir sølu av 1083a, fer hann/hon at stoypa ein múr móti vegnum Við Sandá, økja um parkeringsvirðurskiftini umframt fríðka um økið. Við keypinum fær umsøkjarin sostatt møguleikan fyri at fáa skipaði viðurskifti til kundamóttøku og framtíðartryggja atkomumøguleikar til vinnuvirksemi á 1087c.

Almenna byggisamtyktin ásetir matr.1083a sum B3 øki, sum loyvir bygging til smá vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi. Umsóknin um keyp av matr.1083a samsvarar við ásetingarnar í almennu byggisamtyktini, sum sostatt loyvir sølu til umsøkjara.

1083a er 193 fermetrar til støddar. Sambært kunngerð nr. 122 um alment útboð av kommunalari fastogn, §2, er ikki neyðugt at bjóða søluna alment út. Tó skal sølan verða til marknaðarprís (sí viðmerking frá Stjórnarskrivstovuni).

Kommunan hevur ikki nakra ætlan við matr. nr. 1083a, sum umsøkjarin ynskir at keypa. Harumframt verður mett, at ætlanin hjá umsøkjara at betra um parkeringsviðurskiftini umframt fríðka á økinum, kann gagna økinum sum heild. Tí verður mælt til at ganga umsóknini á møti.

**Lógir, ásetingar o.a.**
- Almenna byggisamtyktin skipar økið, sum umsóknin fevnir um, sum B3 vinnuøki.
- Kunngerð nr. 122, frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn, er galdandi um søla skal gerast av økinum.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Stjórnarskrivstovan vísir á, at møgulig søla skal gerast til marknaðarprís, og at virðismeting skal umbiðjast. Tað er ikki neyðugt við almennum útboð av sølu.
Víst verður til kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn:
§2 *Fastogn nýtist ikki at verða boðin út, um talan er um:*

5. *Sølu til landsmyndugleikar, kommunu ella kommunalan felagsskap, sbr.§57 í kommunustýrislógini*

6. *Søli til felag, stovn v.m., sum kommunan lógliga kann veita stuðul til*
7. *Sølu av økjum, sum eru minni enn 300m2 til víddar og sum tað ikki sjálvstøðugt verður bygt á ella*
8. *Kommunala útstykkingar o.l., har tillutan og prísáseting fara fram eftir ásettu reglum*

**Skjøl**
*Almenna byggisamtyktin viðv. matr.nr.1083a*, journal nr. 20/04192-4
*Kort, matr.nr.1083a*, journal.nr.20/04192-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til
- At ganga umsóknini á møti, og selja umsøkjaranum matr. 1083a fyri marknaðarprís sambært virðismeting og kunngerð nr. 122
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>17. desember 2020 | Blað nr.: 1360 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# 318/20 Spælipláss í kommununi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 341/20 | 20/04607-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 253/20 | 20/04607-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.12.2020 | 358/20 | 20/04607-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 318/20 | 20/04607-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tilfar kemur.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Tikið av skrá.

**Upprunin til málið:**
Býráðið hevur avgjørt at játta 2 mió. kr. av eykajáttanini fyri oktober til spælipláss í kommununi.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Ì sambandi við at heildarætlan fyri Gundadal hevur verið í umbúnað, sí mál nr. 18/03453 Skipan av Gundadali, hevur tað verið lagt upp til, at tvey økir verða løgd av til rørslu og spæl, umframt torgið frammanfyri/sunnanfyri Tórsvøll.

- Annað spælipláss verður lýst sum eitt eitt náttúruspælipláss og er staðsett í økinum norðanfyri ovara vøll. Sí j.nr. 20/04607-3 Náttúrukent spælipláss norðanfyri ovara vøll.
- Somuleiðis verður økið millum Tórsvøll og Høllina á Hálsi lagt av til stórar rørslur, parkour, free running v.m. Sí j.nr. 20/04607-4, Stórar rørslur ml. Tórsvøll og høllina á Hálsi.

Myndirnar lýsa í stórum trekkum hvat ætlanin er at fremja á hesum økjum til gagn fyri allar borgarar í kommununi, staðsett í Gundadali, sum hvønn dag savnar hópin av borgarum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Heildarætlanin fyri Gundadal er enn ikki endaliga samtykt, men er ætlanin at gera smáu tillagingarnar í ætlanini fyrst í 2021 fyri síðani at leggja ætlanina fyri avvarðandi nevndir og býráð.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03453 Skipan av Gundadali
20/04581 Tórsvøllur Torg

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at eykajáttanin áljóðandi 2 mió. kr. verður bókað á konto 6275, á nýggja verkætlan "Spælipláss og onnur átøk í Gundadali", og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 319/20 Áheitan um yvirtøku av vegi matr. nr. 1094r, Tórshavn (2006-3342)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 01.12.2020 | 65/20 | 20/02186-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 338/20 | 20/02186-2 |
| 3 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 319/20 | 20/02186-2 |

**Upprunin til málið:**
Gomul umsókn frá 2006, at Tórshavnar kommuna yvirtekur vegin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Áheitan kom 1. november 2006 frá Sp/f Átak, eigari av matr. nr. 1094r, Tórshavn um at kommunan yvirtekur vegin. Matr. nr. 1094r, Tórshavn, er ein partur av vegnum undir Gráasteini áleið 633 m². Felagið Sp/f Átak fór í likvidatión tann 15. februar 2008 og hevur málið av einari ella aðrari grund ligið stilt síðani tá. Í sambandi við møguliga framtíðarætlanir fyri økið er neyðugt, at kommunan eigur vegin. Búgvið Sp/f Átak skal latast upp aftur í skiftirættinum. Hetta fyri at tey formellu krøvini eru uppá pláss, so at Tórshavnar kommuna kann yvirtaka vegin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur verið á staðnum og góðtekur, at vegurin verður yvirtikin í núverandi standi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Skjøl frá tinglýsing/skiftirættinum j.nr. 20/02186-3
Kort av vegnum j. nr. 20/02186-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Fíggjarligu útreiðslurnar, gjald til skiftiréttin í sambandi við at opna búgvið aftur og til sakføraran, sum stendur fyri búgvinum. Mett útreiðsla áleið 15 – 20.000 kr.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kommunan yvirtekur vegin matr. nr. 1094r, Tórshavn. Útreiðslurnar av at opna búgvið aftur í skiftirættinum verður fíggjað av rakstrinum av konto nr. 8110 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 01. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 320/20 Verkætlan til framhald av útstykkingini Klingrutjørn - Klingurstjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 5/17 | 17/00971-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.09.2017 | 186/17 | 17/00971-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 219/17 | 17/00971-3 |
| 4 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 216/17 | 17/00971-3 |
| 5 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 77/17 | 17/00971-3 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2017 | 236/17 | 17/00971-3 |
| 7 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 303/17 | 17/00971-3 |
| 8 Fíggjarnevndin | 12.12.2017 | 316/17 | 17/00971-3 |
| 9 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 302/17 | 17/00971-3 |
| 10 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 345/20 | 17/00971-3 |
| 11 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 320/20 | 17/00971-3 |

**Málslýsing:**
Kunnað verður um status í málinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Eftirspurningurin eftir grundstykkjum hevur víst seg at vera størri enn tey 48 grundøkini, sum verandi útstykking, sum nýliga er liðug Undir Kongavarða, kann nøkta.

Ráðgevi kommununar LBF P/f hevur tí, eftir áheitan, útvega útstykkingarprosjekt til 45 grundøki afturat, sum er framhald av nevndu útstykking omanfyri verandi bygging Undir Kongavarða.

Við støði í eindarkostnaðum í tilboðnum frá Articon P/f uppá undanfarnu útstykking, hevur LBF p/f kostnaðarmett framhald av útstykkingini við nevndu 45 grundøkjum til kr. 18.267.105,-.

Í eftirfylgjandi samskifti, sum umsitingin hevur havt við Articon P/f, er ynski sett fram um at einstakir eindarkostnaðir verða príssettir nakað hægri, m.a. spreinging av hellu, sum nú er nærri húsum og tí má gerast við veikari løðingum og at eindarkostnaðir annars verða prístalsreguleraðir við 4,35%.

Um Articon verður gingið á møti í ynskjum teirra um meirkostnaðir, verður mett at umleið 2,3 mió. koma afturat kostnaðarmetingini hjá LBF.

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, við støði í kostnaðarmetingini frá LBF P/f, har nevndi meirkostnaðir sum Articon ynskir á 2,3 mió. er íroknaður, spreingi- og arbeiðstøkutrygging, prosjektering, byggileiðsla, fakeftilit, fyrisiting, óvæntað og MVG v.m. er íroknað.

Við grundarlag í omanfyrinevnda metir umsitingin, at útstykkingararbeiðið kann gerast fyri kr. 25.377.267,-, tá allar útreiðslur eru íroknaðar (sí j. nr. 17/00971-10), har væntað verður, at helvtin av upphæddini fellur til gjaldingar í 2017.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og virkandi býararktekturin mæla til, at lata tað standa Articon P/f í boði at halda fram við útstykkingararbeiðinum og heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við P/F Articon um útstykkingararbeiðið, við nevndu kostnaðarmeting hjá umsitingini sum grundarlag, innanfyri samlaðan fíggjarkarm á kr. 25.377.267,- og at játtaðar verða nevndu kr. 25.377.267,- til arbeiðið.
Mælt verður til at helvtin av játtaðu upphæddini kr. 12,7 mió. verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2017 og 2018 og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2018 og 2019.
Eisini verur mælt til at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. september 2017:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, vísir á, at arbeiðið at halda fram við útstykkingini er ikki boðið út.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Ráðgevi kommununnar, LBF P/f, hevur tillagað og dagført útstykkingarprosjektið soleiðis, at nøgdarjavnvágin millum avgrivið (sprongt) og uppfylt tilfar gerst neyvari og tí eisini kostnaðarminni.

Articon hevur, við støði í tillagaða og dagførda útstykkingarprosjektinum og við útgangsstøði í prísvøkstri á 4,45% á eindarprísum/tilboði frá undanfarnu útstykking, har veitingar samsvara, latið kommununi ítøkiligt tilboð, dagfest 9. oktober 2017, uppá kr. 19.943.449,- u/mvg fyri gerð av útstykkingararbeiðinum.

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, við støði í nevnda tilboði frá Articon, tá íroknað eru gøtuljós, spreingi- og arbeiðstøkutrygging, prosjektering, byggileiðsla, fakeftirlit, fyrisiting, óvæntað og MVG v.m.

Harafturat skal leggjast upp fyri einum vendiplássi á kr. 500.000 u/mvg sum ikki er greitt í tilboðnum.

Við grundarlag í omanfyrinevnda metir umsitingin, at útstykkingararbeiðið kann gerast fyri kr. 26.944.041,-, tá allar útreiðslur eru íroknaðar (sí j. nr. 17/00971-21), har væntað verður, at helvtin av upphæddini fellur til gjaldingar í 2017.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og virkandi býararktekturin mæla til, at tikið verður av tilboðnum frá Articon P/f og heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við P/F Articon um útstykkingararbeiðið, við støði í tilboðið teirra, innanfyri samlaðan fíggjarkarm á kr. 26.944.041,- og at játtaðar verða nevndu kr. 26.944.041,- til arbeiðið.

Mælt verður til at helvtin av játtaðu upphæddini kr. 13,4 mió. verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2018 og 2019 og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2018 og 2019.

Eisini verður mælt til, at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at bjóða arbeiðið út alment við undargóðkenning.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2017:** Samtykt at bjóða arbeiðið út alment við undargóðkenning.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at mæla býráðnum til taka av tilboðnum frá Articon P/f áljóðandi kr. 18.943.449,00 umframt mvg. og at játtaðar verða kr. 25.400.000,- til útstykkingararbeiðið.

Mælt verður til, at helvtin av játtaðu upphæddini verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2018 og 2019, og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2018 og 2019.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Avhending av verkætlanini var undirskrivað 17.07.2019 ( J.nr. 17/00971-38 ) og var eitt 1-árs sýn 10.07.2020 ( J.nr. 17/00971-39 )

Endaligur byggiroknskapur fyriliggur samlaður kostnaður kr. 22.421.543,- ( J.nr. 17(00971-42 ) og verður endaligur útstykkingarkostnaður kr. 28.116.536,- ( j.nr. 17/00971-41 )

Samlað vídd á grundstykkjunum er 18.096 fermetrar, og verður endaligi fermeturprísurin út frá nevndu fortreytum kr. 1.554,-

Keypararnir hava rindað 1.705,- kr/m2 ella 151 kr/m2 meir enn endaligið útstykkingarkostnaðurin.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at loka verkætlanina, og at afturrinda keyparunum 151 kr/m2.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 321/20 Uttanhýsis kanning av framtíðar tørvi á brennistøð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.06.2020 | 147/20 | 20/00758-1 |
| 2 Býráðsfundur | 11.06.2020 | 125/20 | 20/00758-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 156/20 | 20/00758-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 321/20 | 20/00758-1 |

**Upprunin til málið:**
Víst verður til mál 18/01200 Kanning um økt samstarv millum Kommunalu Brennistøðina og IRF og mál 20/00345 Uttanhýsis kanning av samanlegging av KB og IRF.

Á býráðsfundi 30. januar 2020 samtykti býráðið einmælt soljóðandi uppskot:

"At seta arbeiðsbólk at lýsa fíggjarligu fyrimunir og vansar fyri Tórshavnar kommunu at gera eina felags brennistøð ella framhaldandi skulu hava tvær brennistøðir. Kannast skal eisini hvørjir orku- og umhvørvisligir fyrimunir og vansar eru við einari ella tveimum brennistøðum.

Arbeiðsbólkurin skal vera mannaður av uttanhýsis serkønum innan fíggjarviðurskifti, verkfrøði og orku/umhvørvi. Arbeiðsbólkurin skal gera eina búskaparliga frágreiðing og greining av, hvussu framtíðin sær út í Tórshavnar kommunu við atliti at brenning, burturbeining og framtíðar skiljing av ruski, tá vit skulu verða meira burðardygg á tí grønu leiðini. Somuleiðis verður at kanna hvat tað kostar at byggja nýggjan ovn afturat verandi ovni á Sandvíkarhjalla.

Arbeiðsbólkurin skal gera eina tørvsmetning av, hvat ið krevst av plássi, stødd á brennistøð og hvørjir matr. á Hjalla eru tøkir til møguligt økt virksemi á økinum eitt nú høll til at skilja, brennistøð o.a.

Politiskur fylgibólkur umboðandi allar flokkar í Býráðnum verður settur til tess at fylgja arbeiðinum."

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Borgarstjórin mælir til at játta kr. 800.000 til kanningina at fíggja av konto 2512 Integratión kr. 677.000 og kr. 123.000 av konto 6611 Aðrar útreiðslur umhvørvistiltøk.

**Fíggjarnevndin 11. juni 2020:** Samtykt at játta kr. 800.000 til kanningina at fíggja soleiðis:
Av konto 2512 Integratión kr. 577.000,
Av konto 6611 Aðrar útreiðslur umhvørvistiltøk kr. 123.000
Av konto 7110 Renovatión kr. 100.000
Og beina málið í býráðið, sum eykajáttan til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 11. juni 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Víst verður til frágreiðing frá SMJ.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Atkvøtt varð um uppskotið frá Anniku Olsen um at beina málið aftur í náttúru- og umhvørvisnevndina, ið varð einmælt samtykt.

# 322/20 Umsókn um byggiloyvi til bygning á matr. nr. 161b, 185c og 156, Tórshavn. undir Bryggubakka og Rektaragøta

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 166/17 | 17/01760-5 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 197/17 | 17/01760-5 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2018 | 134/18 | 17/01760-5 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 85/20 | 17/01760-5 |
| 5 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 38/20 | 17/01760-5 |
| 6 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 225/20 | 17/01760-5 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 247/20 | 17/01760-5 |
| 8 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 322/20 | 17/01760-5 |
| 9 Tekniska nevnd | | | 17/01760-5 |
| 10 Fíggjarnevndin | | | 17/01760-5 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
SNA Arkitektar søkja vegna eigaran, um byggiloyvi at gera hotellíbúðir á omanfyri nevndu ognum.

Á niðastu hæddini verður útvent virksemi og parkeringskjallari og á teimum ovaru hæddum 13 hotelíbúðir.

Talan er 4 samanbygdar lonir við saðiltekjum, sum eru sneiddar 90° í mun mun til verandi bygging í røðini.

Umsøkjarin vísir á, at til ber at minka um skuggaárinini á sethúsaøki eystanfyri, við sneiðingini og vil tað tæna sethúsaøkinum eystanfyri.

Hæddin á bygninginum er ásett í mun til hægsta punkt á vegnum við tað norðasta matrikulmarkið.

Ein geiri við einari trappu verður millum bryggjuna og Rektaragøtu sum kemur at knýta reyni og bryggjuna saman.

Inngongdir til íbúðirnar verða bæði frá Rektaragøtu og trappuni.

Sí annars frágreiðing í umsóknartilfarinum

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í 2. Grundumráði í almennu byggisamtyktini og í eindini D1 í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

<u>Í almennu byggisamtyktini er ásett í kap. 4, §3:</u>

*2. grundumráði verður alt, sum tað er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, smáhandverk, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*

<u>Í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina er ásett fyri eindina D2:</u>

2. gr. Nýtsla økisins, eindirnar D: Vinnulívsendamál:

a. Eindirnar D1 og D2 skulu við teimum undantøkum, ið niðanfyri eru nevnd, einans verða nýttar til vinnulívsendamál og byggingin skal vera kannað skrivstovu-, umsitingar-, og handilsvirksemi, serstakliga tílíkum, ið hevur við havnina og fiskivinnu at gera. Eisini kann býráðið loyva at byggingin verður nýtt til goymslur og pakkhús. Uttandura goymslur kunnu bert verða gjørdar við serloyvi frá býráðnum.
b. Í ovastu húsahædd er loyvt at innrætta íbúðir.
c. Á ognunum kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við roki, royki, deymi, gangi ella ristingum ella sum við útsjónd síni, ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann vera teimum, sum uttanum búgva, til ampa.
d. Í D1 økinum skal niðasta hædd í bygninginum hava útvent virksemi, t.d. kafé, matstova, handil v.m.

5. gr. Stødd og staðseting húsanna o.a., Eindirnar D
a. Byggingin skal verða løgd í tey á fylgiskjalið IV strikumerktu byggiøkini og skulu bygningarnar innan byggiøkini verða samanbygdir. Byggiøkini skulu, er tað gjørligt, byggjast fult.
b. Í eindini D1 skal hæddin á bygninginum, roknað frá hægsta jørðildi móti vegnum a-b til yvirgrindina (har húsasíðan og tak koma saman, skjøldrar ikki íroknaðir) ikki vera minni enn 3 m og ikki meira enn 4 m.
c. Í eindini D2 skal hæddin á bygninginum, roknað frá bryggjuni til yvirgrindina ikki vera meira enn 9 m.
d. Í eindini D1 skulu yvirgrindir og mønur vera javnfjarar við vegin a-b. Í báðum endunum D skal reisingin vera millum 30° og 45° reyst. Loyvt er at seta kvistar um so er at teir samsvara við vegleiðandi skurðir, sum sýndir eru á fylgiskjalið IV.
e. Ikki er loyvt á ognunum at byggja bilskúrar, úthús og onnur tílík smáhús.
f. Leiðingaløg skulu sum meginregla verða løgd í samsvari við vegleiðandi skipanina, sum sýnd er á fylgiskjalið III, ið er til skjals hjá býarverkfrøðingarskrivstovuni.

6. gr. Útsjónd húsanna
a. ......Allar lýsingar, eisini í eindunum D skulu vera góðkendar av serstaka byggiráðnum.
e. Í eindunum D1 og D2 skulu til framsíður, skjøldrar og tekjur ikki nýtast litir og tilfar, ið eftir meting serstaka byggiráðsins kann lýta økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Viðv. mønuni:
Ásetingin er púra greið við hvønn veg mønin eigur at venda. Tað sum tó kann tala fyri at mønan verður sneidd 90 stig, er, at skuggaárini á bústaðarøki eystanfyri verður minni og bygningurin tykist opnari.

Viðv. parkeringsplássum:
Tað er ikki ynskiligt, at økja um ferðsluna eftir bryggjuni í Vágsbotni, heldur tvørtur ímóti. Útvenda virksemið í økinum er ætlað fólki og ikki bilum. Talið av parkeringsplássum í krevst sambært bygningskunngerðini 2017, rúmast ikki á ognini og í og tískil mugu nøkur parkeringspláss finnast aðrastaðni. Fyribils verður víst til Skálatrøð og annars almenn parkeringspláss í økinum. Á niðastu hæddini vera tó nøkur parkeringspláss.

Viðv. byggiøkinum:
At bygt verður út um byggiøki er natúrligt í mun til grannabygningarnar og verandi bryggju.
Byggiøkini eru teknaði fyrst í 70-árunum og eru, at síggja til, tillagað táverandi sjólinju. Í dag er bryggjan útbygd og plássið er betur millum bygningar og bryggjukant enn áður.

Viðv. hæddini:
Tá talan er um fleiri matriklar er vanligt, at hæddin verður ásett í mun til hægsta punkt á vegnum (Rektaragøtu) út fyri hvønn einstakan matrikul.
Verða matriklarnir 168b, 168a, 161b, 185c og 156 harafturímóti lagdir saman, er støðan ein onnur og hæddin verður í tráð við beinleiðis orðingina í byggisamtyktini.

Um verkætlanin skal bera á mál, má kommunan játta at selja uml. 45 $m^2$ burturav matr. nr. 201.

Serstaka byggiráðið kemur við sínum tilmæli mánadagin 11. september, og verður tað lisið upp á fundinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

1. Mønurnar venda skeivan veg
2. Byggingin fer út um byggiøki í fylgiskjalið IV
3. Hæddin er ásett í mun til norðasta hornið á matr. nr. 168a
4. Nøgd av parkeringsplássum er ikki nøktandi í mun til ásetingarnar í kap. 2 í Bygningskunngerðini 2017.

**Umhvørvisárin**
Viðgjørt eftir umhvørvisflokking 1

**Fíggjarlig viðurskifti**

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Vísandi til ásetingina um at møn skal liggja javnfar við vegin, vil býarskipanardeildin vísa á, at talan er um eina býarskipanarliga linju, ið er løgd út eftir økinum frá innasta til uttasta bygning. Ásetingin leggur upp til, at bygningarnir eru partur av einum framhaldandi strekki og heild - við at tekjurnar hava sama rætning, har uppskotið víkir frá við at bróta hetta mynstrið og heildarmyndina.

Harafturat verður víst á, at framsíðurnar á Rektaragøtu minna kanska ov nógv um bústaðarbyggingina í býlingunum Inni á Gøtu og Millum Gilja í Hoyvík, har ynskiligt er, at størri samanhangur er millum uppskotið og bygningarnar í nærumhvørvinum. Á fundi við arkitektarnar var hetta tikið upp, og vildu teir arbeiða víðari við hesum.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**

**Skjøl**
17/01760-4 “Rektaragøta/undir Bryggjubakka – Lýsing av verkætlan”
17/01760-1 “0826_001” – Flatmyndir
17/01760-2 Kortmynd – lutur av matr. nr. 201

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti, treytað av at kommunan vil selja part av matr. nr. 201 til umsøkjaran og annars við teimum treytum, ið umsitingin setur.
Eisini verður mælt til, at málið viðvíkjandi møguligum parkeringskjallara undir vegnum verður at viðgera serskilt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Málið umrøtt og verður tikið uppaftur á komandi fundi, tá umsitingin hevur havt fund við Reynanevndina.

**Iskoyti:**
Á fundi í Posthúskjallaranum tann 19.10.2017, varð verkætlanin løgd fram fyri nærmastu grannum, sum er íbúgvar úti á Reyni, eystanfyri ætlaðu bygging.

Grannarnir eru greiðir yvir, at talan er um eitt byggiøki og at tað bert er ein spurningur um tíð, áðrenn bygt verður á staðnum.

Teir meta, at fyriliggjandi ætlan í útsjónd og funktión er snøgg og tiltalandi og ynskja at mønurnar venda vinkulrætt heldur enn javnfjart við Rektaragøtu.

Tá tað er sagt, vísa teir á, at bygningurin er lutfalsliga alt ov høgur og stórur í vavi í mun til umliggjandi øki sum heild.

Eisini vísa teir á, at grøna økið og nærmastu sethúsini koma at liggja í óneyðuga nógvum skugga orsakað av hæddini.

Teir meta, at tulkingin av hæddarásetingini er púra burturvið og als ikki í tráð við intentiónina í serstøku byggisamtyktini, sum teir meta heldur leggur seg upp at hæddunum á bygningunum innast í Vágsbotni (Poul Hansen, Lutzen v.m.).

Grannarnir heita staðiliga á kommununa um at umhugsa verkætlanina sera gjølla, áðrenn endalig avgerð verður tikin.

**Skjøl (5 visualiseringar)**
17/01760-14 Frá Vestaru bryggju
17/01760-14 Aftan frá norðuri
17/01760-14 Aftan frá suðuri
17/01760-14 Tinganes úr erva
17/01760-14 Frá SNA á Landavegur 9

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017**: Samtykt at ganga umsóknini á møti, treytað av at kommunan vil selja part av matr. nr. 201 til umsøkjaran, at snið og útsjónd verður gjørd í samráð við býararkitektin, at parkeringsviðurskiftini verða loyst og annars við treytum sum umsitingin setur.

Eisini samtykt, at málið verður lagt fyri nevndina aftur, tá omanfyri nevnda er loyst og at málið viðvíkjandi møguligum parkeringskjallara undir vegnum verður at viðgera serskilt.

Helena D. á Neystabø luttók ikki i viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til grannahoyringar hjá nærmastu grannunum eystanfyri ætlaðu bygging. Freistin at koma við viðmerkingum var úti tann 23. mai 2018, og hevur kommunan móttikið felags hoyringsskriv frá øllum teimum hoyrdu grannunum, seks í tali. Viðmerkingar teirra verða nú viðgjørdar og niðurstøðan hjá umsitingini verður klár til fundin 30. mai 2018.

**Nýggj skjøl**
17/01760-19 Dagførdar síðumyndir – «Tjaldur – Sheet – 03 – Síðumyndir»
17/01760-25 Fyribils hoyringssvar
17/01760-25 Fyribils hoyringssvar (003)
17/01760-20 Grannahoyringsskriv, sent grannum 03.05.2018
17/01760-24 Supplerandi upplýsingar sendir grannum 18.05.2018
17/01760-26 Viðgerð av hoyringssvarunum

**Tilmæli:**
Vísandi til at viðgerðin av viðmerkingunum frá grannanum ikki er liðug, kemur tilmæli á fundinum.

**Tilmæli:**
Vísandi til at býráðssamtykt frá 14. desember 2017 um sølu av parti av matr. nr. 201 og at umsitingin arbeiðir við eini heildarætlan fyri miðbýin, sum eisini umfatar parkerings- og ferðsluviðurskiftini, mæla virkandi tekniski stjórin og virkandi leiðarin á byggideildini til at ganga umsóknini á møti, treytað av at snið og útsjónd framhaldandi verður gjørd í samráð við býararkitektin og umsitingina, at arbeiðið at loysa parkeringsviðurskiftini heldur áfram og annars við teimum treytum sum umsitingin setir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Umframt tað, sum omanfyri er samtykt, umfatar verkætlanin eisini, at partur av niðastu hæddini kemur at liggja úti undir vegnum Rektaragøta., uttanfyri matrikulmark. Vegurin er kommunal ogn. Hesin parturin av verkætlanini er ikki viðgjørdur av byggi- og býarskipanarnevndini áður.

Talan er um uml. 213 fermetrar sum er eystari partur av kjallarahæddini.

Kommunan hevur áður givið loyvi til líknandi útbygging á matr. nr. 180c, Bryggjubakki 8, har loyvi varð givið til útbygging í tveimum hæddum inn undir vegin Bryggjubakki.

Ein slík útbygging kemur í byggitíðarskeiðinum at viðføra, at Rektaragøta verður stongd fyri ferðslu og tískil má onnur loysn finnast í mun til atkomu til Reyngøtu og tær ognir, ið har liggja.
Av tí at grannar eystanfyri verða beinleiðis ávirkaðir av verkætlanini, má kommunan tryggja sær, at hesir grannar geva sítt samtykki og at arbeiðið verður framt í samráð við teir, sí fylgiskjal 17/01760-42 - Bygging inn undir Rektaragøtu – Støðumynd og flatmynd.

Um tað ber til at finna nøktandi fyribils ferðslu- og atkomuloysnir í økinum, umframt at neyðug atlit verða tikin í mun til nærmastu grannarnar, metir umsitingin ikki, at nakað er til hindurs fyri at ætlanin kann lata seg gera.

Tað fyriliggur í løtuni eingin neyv tíðarætlan fyri byggingina og skal ein slík fyriliggja, áðrenn arbeiðið byrjar.

Eisini er neyðugt at kommunan ger leigusáttmála við eigaran um nýtslu av undirlendinum undir vegnum litra l og er neyðugt at fáa neyvari lýsing av víddini á hesum øki í tí sambandi.

Tekniska deild viðger í løtuni uppskot um ferðsluloysn, sum byggiharrin hevur latið kommununi, okkara mál nr. 20/01126

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
<u>Mál nr. 14/00242</u>
Umsókn um góðkenning av dispositiónsuppskoti, Poul Hansen, heilsøla í Vágsbotni

Í hesum máli var samtykt at loyva útbygging í tveimum hæddum inn undir vegin á Bryggjubakka.

**Skjøl:**
17/01760-42 Bygging inn undir Rektaragøtu – Støðumynd og flatmynd
17/01760-38 Myndugleikaprosjekt – «HUB_K01_F2_N01»
17/01760-38 Umsókn – «K01_C04.1_UMSÓKN hotel Tórshavnar Kommuna»
17/01760-25 Fyribils hoyringssvar
17/01760-25 Fyribils hoyringssvar (003)
17/01760-20 Grannahoyringsskriv, sent grannum 03.05.2018
17/01760-26 Viðgerð av hoyringssvarunum
17/01760-8 Viðmerkingar frá serstaka byggiráðnum

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at loyva útbygging inn undir vegin Rektaragøta treytað av:
- at ein nøktandi fyribils ferðslu- og atkomuloysn til ognirnar í Reyngøtu verður funnin.

- at arbeiðið, sum hevur beinleiðis ávirkan á nærmastu privatu ognirnar, verður framt í samráð við hesar eigarar.
- at allar kommunalar leiðingar í Rektaragøtu verða gjørdar aftur uttan kostnað fyri kommununa.

Og annars við teimum treytum, sum umsitingin setir og at beina málið í teknisku nevnd og fíggjarnevndina til støðutakan viðvíkjandi leigu av undirlendi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Bjørghild Djurhuus, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur higartil verið jaliga sinnað í mun til bygging inn undir vegin Rektaragøta og málið er viðgjørt í Byggi- og býarskipanarnevndini og Fíggjarnevndini, har tað er samtykt, at loyva byggingini við hesum treytum:

1. at ein nøktandi fyribils ferðslu- og atkomuloysn til ognirnar í Reyngøtu verður funnin.
2. at arbeiðið, sum hevur beinleiðis ávirkan á nærmastu privatu ognirnar, verður framt í samráð við hesar eigarar.
3. at allar kommunalar leiðingar í Rektaragøtu verða gjørdar aftur uttan kostnað fyri kommununa.

Og annars við teimum treytum, sum umsitingin setir.

<u>Ad 1</u>
Sløkkiliðið hevur verið á staðnum og kanna um tað er gjørligt, at sleppa ígjøgnum Gongina og haðani niðan á Reyni við sløkkibilum teirra. Niðurstøðan var, at tað er gjørligt treytað av, at absolutt einki stendur í vegin. Væntast kann tískil at oljubilar og onnur akfør eisini sleppa framat, men at talan er um eina heldur ivasama loysn.

<u>Ad 2</u>
Selmar Nielsen Arkitektar, SNA, hava sett seg í samband við nærmasta granna matr. nr. 169. Grannin eru tó ikki jaliga sinnaður í mun til ætlanina og metir, at verkætlanin ikki kann fremjast uttan at ogn hansara verður beinleiðis ávirka.

SNA hava síðan minkað byggingina soleiðis, at frástøðan til nærmastu grannaognir verður 1 m.

30. oktober 2020 var umsitingin á einum fundi við tveir grannar, matr. nr. 169 og matr. nr. 146.

Teirra støða er greið og meta teir tað vera órealistiskt, at arbeiðið á vegaøkinum kann fremjast uttan at ognir teirra verður skaddar so ella so, óansæð um frástøðan verður økt ella ikki. Tey eru ikki áhugaði í endurgjaldi, at garðar verða endurbygdir ella hvat tað mátti verið, ið byggiharrin bjóðar.

Ad 3
At byggiharrin ber kostnaðin av møguligum umleggingum av leiðingum v.m. verður sett sum ein treyt í byggiloyvinum.

Fundur og skriv frá granna
Grannin á matr. nr. 169, hevur sent kommununi eitt skriv, dagfest 19. oktober 2019, okkara mál nr. 20/04019-1, har víst verður á, at kommunan ikki hevur heimild til at geva loyvi til hotellíbúðir í økinum. Harumframt verður víst á ymisk onnur viðurskiftir s.s. áseting av hædd, bygging inn undir Rektaragøtu, ljósárin, sýnisbágar, parkerings- og ferðsluviðurskiftir og nýtsluna. Eisini ynskir grannin at koma á fund við umsitingina at umrøða hesi viðurskiftir.

Á fundi tann 30. oktober 2020, har tveir grannar luttóku, vístu grannarnir enn einaferð á tey viðurskiftir, sum í høvuðsheitum eru umrødd og viðgjørd áður í sambandi við grannahoyringina í 2018, m.a. á amparnar, ið tey meta at nýtslan og byggingin fara at hava á umliggjandi øki, serliga hotellvirksemi og økt ferðsla umvegis Rektaragøtu.
Eisini vístu tey á, at tey framhaldandi meta bygningin verða ov høgan í mun til ásetingarnar og at neiligu skuggaárinini verða alt ov stór.

Grannin, matr. nr. 169, vildi á fundinum gera vart við, at hann, umframt at røkja egin áhugamál, eisini røkir áhugamálini hjá íbúgvunum úti á Reyni og og økinum sum heild. Eisini legði hann dent á, at verkætlanin er eitt sera stórt inntriv í økið og kemur at hava sera stóra ávirkan á tey, ið har búgva.

Fundur við byggiharra
24. november 2020 var fundur millum byggiharra og umsiting. Byggiharrin var kunnaður um, at umsitingin metir at inntrivið í Rektaragøtu verður ov stórt vísandi til amparnar fyri nærmastu grannar og økið sum heild.
Umsitingin vísti eisini á, tað ikki ber til at steðga allari ferðsluni eftir Rektaragøtu í arbeiðstíðarskeiðinum men kann viðmæla, at bygt verður uml. 2,5 m inn undir gøtuna soleiðis at eitt ferðsluspor kann verða opið undir allari byggingini.
Gangandi ferðsla kann so leiðast eftir gøtuni eystanfyri.

Samanumtøka
Ætlanin um at byggja inn undir Rektaragøtu stavar í høvuðsheitum frá einum ynski um at innrætta parkeringspláss í kjallarahæddini. Byggiharrin vísir á, at hetta hevur eitt stórt virði fyri verkætlanina.

Umsitingin hevur frá fyrsta degi sagt, at ynski hjá Tórshavnar kommunu er at avmarka ferðsluna út eftir bryggjuni í Vágsbotni og í økinum sum heild, í so stóran mun sum gjørligt og at parkeringskjallarin tískil kann gerast óneyðugur. Hetta er tó ein vági, ið byggiharrin er fúsur at taka.

Sum áður nevnt, hevur umsitingin higartil verið jaliga sinnað í mun til ætlaðu bygging inn undir Rektaragøtu, men eftir at hava umhugsað málið av nýggjum, verður tað einans mett ráðiligt at loyva bygging á uml. 2,5 m inn undir vegin soleiðis, at ferðslan eftir Rektaragøtu kann skipast við einum spori í arbeiðstíðarskeiðinum og at neyðsynjarakfør framhaldandi kunnu nýta hesa farleið. Hetta vil eisini verða viðvirkandi til at avmarkað møguligar ampar í byggitíðarskeiðinum.

Viðv. øðrum viðmerkingum, ið grannarnir hava til byggingina sum heild, metir umsitingin framvegis, at nýtslan er í tráð við ásetingarnar og at hæddin skal mátast frá hægsta jørðildi á vegnum Bryggjubakki/Rektaragøta soleiðis sum ásett í serstøku byggisamtyktini fyri økið og at frávik og onnur viðurskiftir annars, eru lýst og viðgjørd áður.

Byggiharrin hevur framleitt eitt skuggadiagram, og sambært skuggadiagramminum, vil bygningurin viðføra neiligan skuggavirknað á økið eystanfyri, eins og verandi bygging í økinum ger tað. Serliga ger hetta seg galdandi í vetrarhálvuni. Byggingin heldur seg innanfyri hæddarásetingarnar og frávikið viðv. mønu er viðvirkandi til at bøta um ljósviðurskiftini á staðnum.

Umsitingin hevur eftirkannað hæddarupplýsingarnar í myndugleikaprosjektinum og staðfestast kann, at upplýsingarnir eru eftirfarandi.
Ætlaða byggingin heldur seg innanfyri hæddarásetingarnar og viðmerkjast skal, at eindin D1 í serstøku byggisamtyktin loyvir lutfalsliga høga bygging.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
J.nr. 14/00242 P/F Poul Hansen Heilsøla søkja um brúksrætt til økið fram við bygningunum, á matr nr. 180c, 180d, og180e (Bryggjubakki 4, 6 og 8), ið er vegastrekkið niðan móti Havnar kirkju

**Nýggj fylgiskjøl:**
J. nr. 17/01760-53 Skuggadiagram
J. nr. 20/04019-1 Áheitan um fund – skriv frá granna á matr. nr. 169, Tórshavn

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at loyvi verður givið til at byggja uml. 2,5 m undir vegin litra I, treytað av:

- at koyrandi ferðsla verður skipað við einum spori, sum er í minsta lagi 3,0 m breitt, meðan arbeitt verður.
- at eitt fullfíggjað prosjekt og tíðarætlan verður send kommununi til góðkenningar áðrenn arbeiðið byrjar.
- at byggharrin ber allan kostnað av arbeiðinum, eisini møguligar útreiðslur sum standast av verkætlanini.
- at beina málið í teknisku nevnd í sambandi við vegin og ferðsluviðurskiftini.
- at beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina í sambandi við nýtslurætt til øki og leiguavtalu.

Og annars við treytum sum umsitingin setur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Tikið av skrá**.**

# 323/20 Umsókn um keyp av øki til samanlegging við matr. nr. 1115b, undir Gráasteini 64, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.12.2020 | 239/20 | 19/04234-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 342/20 | 19/04234-5 |
| 3 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 323/20 | 19/04234-5 |

**Upprunin til málið:**
Eigarin av matr. nr. 1115b, undir Gráasteini, Tórshavn, søkir um at keypa ein part av litra dn, uml. 60 m$^2$, sum liggja millum matr. nr. 1115b og vegin, sí skjal *1115b.jpg.* Í umsóknini verður skrivað, at markið søguliga er sett, av tí at ætlandi skuldi vegurin liggja nærri húsinum, men er hendan ætlanin síðani broytt.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Markið millum matr. nr. 1115b og vegin, liggur ikki á linju við mørkini hjá grannamatriklum. Mett verður at tað hóskar seg at selja økið, sum søkt verður um, soleiðis at matrikulmørkini liggja á linju.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Økið, sum søkt verður um at keypa, er partur av vega litra, og hevur tekniska deild hesar viðmerkingar:
- Vegurin verður allarhelst ikki breiðkaður.
- Næstan allar hinar ognirnar fram við vegnum undir Gráasteini liggja longur frammi, og verður tað tí mett ráðiligt, at selja økið.
- Tó skal hædd takast fyri horna avskurði við radius á 6 m, sí skitsuna á skjali *Horna avskurður.*
- Um neyðugt verður at flyta kommunalar leiðingar, skal umsøkjarin gjalda fyri hetta.

**Skjøl**
- *1115.jpg*, journal nr. 19/04234-3
- *Horna avskurður*, journal nr. 19/04234-6

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Kommunan fær væntandi eina avmarkaða upphædd fyri sølu av lendinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at selja økið sambært skjalinum *Horna avskurður*, treytað av at umsøkjarin ber kostnaðin fyri møguligar flytingar av kommunalum leiðingum, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 324/20 Umsókn um broyting av byggisamtykt og prinsipielt byggiloyvi til KOKS

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2020 | 27/20 | 20/00199-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.02.2020 | 40/20 | 20/00199-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 68/20 | 20/00199-3 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 75/20 | 20/00199-3 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.11.2020 | 225/20 | 20/00199-3 |
| 6 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 07.12.2020 | 14/20 | 20/00199-3 |
| 7 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 284/20 | 20/00199-3 |
| 8 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 324/20 | 20/00199-3 |

**Upprunin til málið:**
Gist og Vist gera vart við at fyribils virksemi Frammi við Gjónna við Leynavatn ikki er nøktandi og at arbeitt hevur verið við at finna eina varandi framtíðartryggjaða loysn, sum kann verða karmur um virksemi komandi árini.

Ósbjørn Jacobsen Arkitektar hava vegna Gist og Vist søkt um broyting av byggisamtykt og prinsipielt byggiloyvi til Koks við Fossdalsgjógv á Velbastað.

**Skjøl**:
20/00199-2 G&V_KOKS_Skitsuuppskot_A3 mappa_30062019

Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Á fundinum hin 5. februar 2020 var umsøkjarin saman við arkitektinum og sakføraranum og greiddu nevndini frá teirra ætlan.

Festarin hevur eftirfylgjandi biðið um at sleppa inn á fund, fyri at lýsa síni sjónarmið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. februar 2020:** Festarin varð á fundinum og legði fram.

**Ískoyti:**
Umsøkjari søkir um at sleppa at byggja ein býling til matstovuvirksemi hjá Koks við Fossdalsgjógv á Velbastað.
Matstovan er serlig og hevur útmerkað seg í heimshøpi. Matstovan hevur 2 michelin stjørnur, júst fingið eina grøna afturat, og hevur ætlanir um at fáa 3. michelin stjørnuna.
Ætlanin er serstøk og er ikki umfatað av byggisamtyktarásetingini fyri økið.
Tískil skal byggisamtyktin broytast, um umsóknin verður gingin á møti.
Sí skjal nr. 20/00199-2 G&V_KOKS_Skitsuuppskot

**Verandi virksemi:**

Talan er um festara á Lýðarhaga í fimta ættarlið.
Fossdalur er lívsgrundarlagið fyri virksemið sum vinnurekandi bóndi.
Taðingin er ikki foreinilig við matstovu og hotelvirksemi.
Festið er størsti mjólkaframleiðandi bóndi í landinum. 6. Hvør mjólkarpakki er frá hesum festinum. Sí skjal 20/00199-11 framløga fyri byggi- og býarskipanarnevndini 24.02.2020

**Viðmerkingar frá myndugleikum:**
Viðmerkingar frá Búnaðarstovuni til umsóknir um bygging í Fossdali
Víst verður til skriv um tvær byggiumsóknir við Fossdalsgjógv, onnur at byggja køst og hin at byggja matstovu.

*Niðurstøða:*
Búnaðarstovan mælir út frá verandi upplýsingum í málinum frá at umskipa lendið undir Syðradalsvegnum norðan fyri Fossdalsgjógv til aðra nýtslu enn landbúnað.
Sí skjal 20/00388-4 búnaðarstovan mælir til, at alt økið verður verandi landbúnaðarøki og mælir frá at umskipa tað til aðra nýtslu.

**Onnur mál, ið hava týdning fyri málið:**
Journal nr. 20/00349 Umsókn um byggiloyvi til køst í Fossdali, Velbastaður. Køsturin er partur av heildarætlanini í sambandi við biogasanleggið, sum er bygt á Hjalla.
Búnaðarstovan mælir til, at alt økið verður verandi landbúnaðarøki, og at umsóknin um at byggja køst verður gingin á møti, um allir aðrir viðkomandi myndugleikar geva neyðugu loyvini til tess.

**Lendið:**
Lendið er sera bratt, og eigur at verða kannað nærri um økið er trygt at hava matvøruvikrsemi og ferðandi.
Økið er sera harðført, og kann spurningur verða settur við, um rætt er at byggja í økinum.

**Samanumtøka:**
Økið, biðið verður um, liggur í 4. grundumráði, sum m.a. hevur hesa áseting:

1. 4. grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.
2. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.

Verandi byggisamtykt rúmar sostatt ikki virkseminum, ið søkt verður um.

Tað tykist sum at ætlaða matstovuvirksemi og verandi virksemi ikki hóska saman í tí líki málið fyriliggur, spurningurin er um ætlanin kann tillagast fyri at bæði kunnu virka á økinum..
Støða eigur at verða tikin til, um arbeiðast skal fyri at loyva matstovuvirkseminum og hvussu, um so er.

**Skjøl:**
Journal nr. 20/00199-1 umsókn um broyting av byggisamtykt og prinsipielt byggiloyvi til KOKS
Journal nr. 20/00199-2 G&V_KOKS_Skitsuuppskot
Journal nr. 20/00388-4 Búnaðarstovan mælir til, at alt økið verður verandi landbúnaðarøki og mælir frá at umskipa tað til aðra nýtslu.
Journal nr. 20/00199-9 Notat frá teknisku fyrisiting
Journal nr. 20/00199-11 framløga fyri byggi- og býarskipanarnevndini 24.02.2020

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at byggi- og býarskipanarnevndin tekur støðu til, um farast skal undir at broyta byggisamtyktina, treytað at onnur viðurskifti eru komin uppá pláss fyrst, m.a. friðingarmyndugleikar, útvegan av lendi o.s.fr. soleiðis at matstovuvirksemið, sum søkt verður um, kann rúmast á økinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Nevndin er sinnað at fara undir eina tilgongd at broyta byggisamtyktina fyri økið við Fossdalsgjógv norðan fyri Velbastað, soleiðis at Gist og Vist kann byggja matstovu v.m. til KOKS á staðnum, treytað av at umsøkjarin fær eina skrivliga avtalu við eigaran av lendinum, áðrenn farið verður undir at broyta byggisamtyktina.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini hin 23. apríl 2020 varð samtykt at fara undir eina tilgongd at broyta byggisamtyktina fyri økið við Fossdalsgjógv, soleiðis at Gist og Vist kann byggja matstovu v.m. til KOKS, treytað av at umsøkjarin fekk eina skrivliga avtalu við eigaran av lendinum.

9. september 2020 móttók umsøkjari tilsøgn frá Búnaðarstovuni um, at Búnaðarstovan er sinnað at avhenda økið, um so er, at byggi- og planmyndugleikin, Tórshavnar kommuna, broytir byggisamtyktina fyri økið, soleiðis at økið kann brúkast til annað endamál enn landbúnað, sí skjal *Tilsøgn frá Búnaðarstovuni*. Búnaðarstovan vísir á, at tá umsókn um keyp av lendi verður móttikin, verður hon send til hoyringar hjá festara, sum eisini hevur møguleika at kæra eina avgerð hjá Búnaðarstovuni um sølu til landbúnaðarstevnu.

Í trá við nevndarsamtyktina 23. apríl 2020, hevur umsitingin gjørt uppskot til serstaka byggisamtykt, ið skipar part av matr. nr. 49, Velbastað til matstovu, gisting v.m.

Í umsóknini skrivar umsøkjarin, at staðið hevur alstóran týdning, og verður ein av hornasteinunum undir framhaldandi menningini av KOKS, sum annars hevur prógvað sínar dygdir seinastu 8 árini. Visjónin handan verkætlanina tekur støði í tveimum høvuðstræðrum: Máltíðin og náttúran, og er ætlanin at flætta hesar báðar træðrir saman til eitt enn sterkari sameint upplivilsi, enn tað á nakran hátt er gjørligt at røkka hvør sær. Viðvíkjandi bygging, er ætlanin at taka støðið og íblástur frá eini siðbundnari tilgongd til bygging og viðgerð av landslagi. Íblásturin til skipanina av býlingunum kemur frá teimum gomlu føroysku gørðunum/býlingunum, við tættari og skiftandi bygging, sum er sett í landslagið við tí fyri eygað at skapa tí best hóskandi funktiónssamansetingina og eitt vart uttandura tún.

Yvirskipað er ætlanin at skipa økið soleiðis:
- Parkeringsøki og innilokað ruskgoymsla við landsvegin ovast.
- Einfaldur dyrkingarvegur til vøruflutning og flutning av gestum, tá tað krevst. Annars er ætlanin, at gestir ganga eftir gøtu oman gjøgnum lendið, frá parkeringsøkinum til matstovuna.
- Norðari Býlingur, sum í høvuðsheitum hýsir bygningum, sum hava beinleiðis samband við djórahald og matframleiðslu.
- Heimari Býlingur við sjálvari matstovuni og øllum dagligum stuðulsfunktiónum.
- Einføld bryggja við sjóvarmálan.
- Smátturnar til gisting liggja tvær og tvær ymsastaðni í økinum.
- Vælveru hentleikar, ið eru beinleiðis samantvunnir við náttúruni. T.d. heitar keldur í helluni í fjøruni, náttúrubað í Fossdalsá og fossinum og sjódypp við bryggjuna.

Allar bygdirnar í Tórshavnar kommunu liggja í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og eru skipaðar í serstøkum byggisamtyktum fyri hvørja einstøku bygd. Í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað/Kirkjubø eru ávís øki løgd til bygging, og er restin av ”kommununi” løgd til K-landbúnað. Serstaka byggisamtyktin er frá áðrenn kommunusamanleggingina, og er ikki vorðin endurskoða í síni heild síðani. Endamálið við K-landbúnaðarøki í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað/Kirkjubø er at sammeta við 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, men hevur tó ikki heilt somu møguleikar sum 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini hevur.

Ásetingarnar fyri K-landbúnaðarøki í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað eru m.a.:
*13. gr. pkt. 1. Øki K er tað, sum eftir er av kommununi, tá ið frammanundan nevndu øki eru tikin frá, og verður tað nýtt til landbúnað, grótbrot, fiskialistøðir o.a.*

Ásetingarnar fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru m.a.:
*§26, 1. 4. grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.*
*§26, 2, e. Harafturat kann onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, staðsetast í 4. grundumráði.*

Av tí at eitt av høvuðsendamálunum við verkætlanini hjá Gist & Vist er at skapa eina heildaruppliving, har matur og náttúra ganga upp í eina hægri eind, og at ítøkiliga økið hevur stóran týdning, verður mett, at verkætlanin skal skipast sambært ásetingunum í §26, 2, e í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Í næstum verður farið í holt við at endurskoða tær serstøku byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi, og í hesum sambandi verður alt, sum ikki er byggiøki í bygdunum, lagt undir ásetingarnar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Orsakað av broytingunum, sum liggja fyri framman, umframt at serstaka byggisamtyktin fyri Velbastað/Kirkjubø ikki hevur somu møguleikar, verður tað mett at vera best ráðiligt, at skipa serstøku byggisamtyktina fyri Fossdalsgjógv sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Málið verður sent Náttúrufriðingarnevndini og Landsverki til góðkenningar.

Fíggjarlig viðurskifti:
Økið liggur uttanfyri planlagda byggiøki í bygdini, og ber umsøkjari allan kostnaðin fyri at leggja neyðugar tekniskar veitingar til økið.

Sambært lóg um býarskipanir og byggisamtyktir § 14, í sambandi við ger ella broyting av eini byggisamtykt er m.a. ásett:

- Stk. 1. Tá ið eitt øki samsvarandi byggisamtykt er lagt av til almenn hús ella virki, ella er ætlað til vegir, torg ella annað sovorðið og ognarmaður tess eftir meti meringarnevndarinnar smbr. § 15 missir møguleikan at nýta teir fyrimunir, ið økið hevur á rímiligan og forsvarligan hátt sammett við, hvussu grannaøkini í roynd verða nýtt, kann ognarmaður krevja, at kommunan skal taka økið fyri endurgjald.

Av tí at tilsøgn er fingin frá Búnaðarstovuni, um at tey eru sinnaði at avhenda økið, um byggisamtyktin verður broytt, verður ikki mett, at kommunan kann verða kravd biðin um endurgjald, sambært omanfyristandandi áseting í lógini um býarskipanir og byggisamtyktir.

**Onnur mál, ið hava týdning fyri málið:**
Umsókn til køst í Fossdali, Velbastaður, journal nr. 20/00349:
Tórshavnar kommuna hevur móttikið umsókn frá festaranum um byggiloyvi til køst á økinum við Fossdalsgjógv – á sama øki, sum ætlanin er at hava omanfyristandandi virksemi. Umsóknin er í trá við verandi ásetingar fyri økið.

Í lógini um býarskipanir og byggisamtyktir stendur í § 8 um fyribils forboð:
- Tá ið eitt kommunustýri, ið hevur byggisamtykt í umbúnað, biður um tað, kann landsstýrismaðurin nokta fyri, at ein ogn, ið ætlandi kemur inn undir byggisamtykt, verður nýtt á slíkan hátt, ið hildin verður ósamsvarandi byggisamtyktini. Slíkt forboð má bara galda eitt ár og kann ikki, uttan býarskipanarnevndin samtykkir, verða sett meira enn hesa einu ferð.

Um uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Fossdalsgjógv verður samtykt, kann ein tílík áheitan verða send landsstýrismanninum, soleiðis at møguleiki er fyri at bíða við at geva byggiloyvi til køstin, inntil endalig avgerð er tikin um serstøku byggisamtyktina.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina fyri Fossdalsgjógv, treytað av loyvi frá avvarðandi myndugleikum og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina fyri Kirkjubø/Velbastað.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum, fyri hana luttók Gunvør Balle.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Tikið av skrá.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 07. desember 2020:**

Eyðfinnur í Búðini og Eyðbjørn Gaard mæla staðiliga frá at taka undir við tilmælinum. Orsøkin er, at atkoman gjøgnum Velbastað (Roykheyggi) er ikki nøktandi. Umhvørvisliga at gera seg inn á óspiltu náttúruna. Veðurviðurskiftini eru sera ring í Fossdali og í Fossdalsgjógv. Og harafrat kemur hetta at hava fíggjarligar avleiðingar fyri festaran.

Borgarstjórin tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 4 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jóannes Guttesen, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø.

Blankt atkvøddu: Turið Horn, Bjørghild Djurhuus, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Marin Katrina Frýdal boðaði frá, at hon er ógegni í málinum og fór av fundinum. Í hennara stað møtti Jóannes Guttesen.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. desember 2020 | Blað nr.: 1384 |
| | Formansins merki: |

# 325/20 Nýggj serstøk byggisamtykt á Glyvursnesi, matr. nr. 2a og 2c, Kirkjubøur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 175/20 | 20/01016-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 188/20 | 20/01016-1 |
| 3 Vinnunevndin | 14.12.2020 | 86/20 | 20/01016-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 281/20 | 20/01016-1 |
| 5 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 325/20 | 20/01016-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna er farin undir at endurskoða almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, og varð endurskoðanin løgd til almenna hoyring 25. juni 2020.

Í verandi almennu byggisamtykt eru rættiliga nógv ymisk øki, serliga vinnuøki. Hetta kann tykjast fløkjut og hevur eisini fleiri broytingar við sær, av tí at munirnir teirra millum eru avmarkaðir. Ynski er at fækka um hesi økini, soleiðis at ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini verða heldur breiðari, meðan man, um neyðugt, kann gera neyvari ásetingar fyri ymisk øki í serstakari byggisamtykt. Hetta við tí fyri eyga, at færri broytingar verða í tí almennu byggisamtyktini, meðan man í teimum serstøku byggisamtyktunum kann taka atlit til ítøkiligar verkætlanir, politikkir, ætlanir o.s.fr.

Økið, sum uppskotið til serstaka byggisamtykt á Glyvursnesi er galdandi fyri, liggur sum B11-vinnuøki í almennu byggisamtyktini. Í uppskotinum til endurskoðan av almennu byggisamtyktini verður mælt til, at verandi B11 øki verður koyrt úr almennu byggisamtyktini, og at økið verður broytt til 4. grundumráði. Tískil verður neyðugt við einari serstakari byggisamtykt fyri økið, ið inniheldur tær somu ásetingarnar, sum í verandi B11 øki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B11 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu – áðrenn endurskoðan:

*§ 18. Ásetingar fyri umráðispartarnar B11 í 3. grundumráði.*

*Umráðisparturin verður kannaður grótbrot og virksemi, ið hevur samband við hetta.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- 17/02748 – Endurskoðan av byggisamtyktum – almenna- og serstakar byggisamtyktir.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Serstøk byggisamtykt fyri Glyvursnes,* journal nr. 20/01016-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina á Glyvursnesi og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Á fundi í mentamálanevndini hin 9. september 2020 varð samtykt at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av norðara parti av grótbrotinum til ítróttaendamál. Tískil verður hesin parturin av grótbrotinum ikki við í serstøku byggisamtyktini fyri grótbrotið á Glyvursnesi, men fer allarhelst at verða partur av byggisamtyktini fyri eitt samlað ítróttarøki á Glyvursnesi.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina á Glyvursnesi sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt fyri Glyvursnes sep. 2020* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis vinnunevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur undir við at beina málið í vinnunevndina.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Tikið av skrá.

**Vinnunevndin 14. desember 2020:**
Ein meiriluti: Bogi Andreasen, Jákup Dam, Gunvør Balle og Helena Dam á Neystabø samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í Vinnunevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helenda Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 326/20 Útflyting av burturkasti 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2020 | 51/20 | 20/04449-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 346/20 | 20/04449-1 |
| 3 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 326/20 | 20/04449-1 |

**Upprunin til málið:**
Neyðugt er at útflyta rusk í sambandi við umvælingar 2021.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ætlanin varð at gera vanligt viðlíkahald og at skifta stýriskipan í apríl-mai 2020, tá varð ætlanin at steingja Brennistøðina í 2 vikur. Hetta bleiv av ongum, tí Korona gjørdi, at veitarar, sum skuldu gera arbeiðið, ikki kundu koma til Føroyar.

Arbeiðið bleiv tikið upp aftur í august-september, tá stýrisskipanin bleiv skift og múrarar vóru inni í ovninum. Teir kundu staðfesta, at av tí at arbeiðið varð útsett, varð ovnurin nógv verri farin og tí skulu nógv størri umvælingar gerast.

Ein støðulýsing, sum varð gjørd 14. oktober 2020 (hjáløgd), staðfestir eisini, at nógv størri umvælingar mugu gerast inni í ovninum enn ætlað, m.a. skal alt loftið skiftast.

Neyðugt verður at lata brennistøðina aftur í 4 vikur, frá 20. januar til 19. februar 2021.

Hetta ger, at neyðugt verður at útflyta uml. 1.000 tons av ruski í viku 5-6 í 2021.

Miðja verður eftir, at hava so lítið burturkast í siloini sum gjørligt, tá arbeiðið at umvæla ovnin byrjar, tað verður gjørt við at skilja turt burturkast frá.

Brennistøðin fær ikki loyvi frá umhvørvismyndugleikanum at goyma húsarhalds burturkast á økinum við Brennistøðina. Um tað skal goymast, so má tað verða innandura. Men um burturkast verður lagt á goymslu, hava vil ikki brenniorku til seinni at brenna tað, so tað er ikki ein møguleiki.

Vit koma at heita á IRF um at hjálpa okkum við at brenna húsarhaldsburturkast, men talan verður bert um smærri nøgdir av húsarhaldsburturkasti.

Alt arbeiðið at umvæla ovnin og at útflyta burturkast, er mett til 6,8 mió. kr. sambært hjálagdu uppgerð. Harav er kostnaðurin til at útflyta uml. 1.000 tons av burturkasti mettur til 2,6 mió. kr.

Fígging:
Samlaði kostnaðurin er mettur til 6,8 mió. kr. Um tær 3,0 mió. kr. sum ikki eru brúktar av eykajáttanini frá desember 2019 verður brúkt til at fíggja ein part av umvælingini, so verður talan um eina restfíggingin uppá uml. 3,8 mió. kr.

Tíðarætlan:
Arbeiðið skal ætlandi gerast frá 20. januar til 19. februar 2021

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
j.nr. 19/04419 Lýsing av støðuni á kommunalu brennistøðini

Í sambandi við omanfyri nevnda mál, fekk Brennistøðin eina eykajáttan uppá íalt 10,3 mió. kr., sum var til:

| Evni: | Játtan | Brúkt | Eftir |
|---|---|---|---|
| Umstøður til útflyting av ruski | 7,0 | 2,2 | 4,8 |
| Útflytan av ruski | 2,3 | 2,6 | -0,3 |
| Álit um Brennistøðina | 1,0 | 0 | 1,0 |

Tað vil siga, at av teimum 10,3 mió. kr., sum vóru játtaðar, eru íalt 5,5 mió. kr. eftir.

Viðmerkjast skal, at 1,6 mió. av hesum fall burtur í sambandi við framflyting frá 2019 til 2020 og játtanin til Brennistøðina minkaði við 0,9 mió. kr. í 2020, í sambandi við ætlanina at hækka nýtslugjøldini, sum kortini ikki bleiv politiskt samtykt.

Hetta merkir, at tað eru 3,0 mió. kr. tøkar.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Støðulýsing (tilstandsrapport)
Tíðarætlan
Kostnaðarmeting

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Samlaður kostnaðurin á umvælingararbeiðið er áleið 6,8 mió.
Ætlanin er at 3,0 mió. kr. verða fíggjaðar av eykajáttanini frá desember 2019 og at restin uml. 3,8 mió. kr. verður fíggjað yvir raksturin í 2021. Møguligur tørvur á meira fígging verður tikið upp til viðgerðar í 2021.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Dkk 6.800.000 | Dkk |
| Kostnaður í hesum árinum | Dkk 0 | Dkk |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Dato jan.-feb. 2021 | Dato |
| Avleiðingar á rakstur | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | Av | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|

| Upphædd íalt | Deild | Verkætlan | | Deild | Verkætlan | | verkætlan | Eykajáttan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dkk | | | | 7110 | | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Brennistøðini mæla til, at nevndin tekur undir við:

- at seta í gongd umvælingararbeiðið
- at útflyta uml. 1.000 tons av ruski í sambandi við umvælingina
- at tað sum er eftir av eykajáttanini frá 2019, uml. 3,0 mió. verður brúkt til at fíggja ein part av hesum.
- at restin, uml. 3,8 mió. kr., verður fíggjað yvir raksturin í 2021. Møgulig manglandi fígging herav verður tikið upp til viðgerðar í 2021.
- og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við Náttúru- og umhvørvisnevndini.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 327/20 Eykajáttan november 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 315/20 | 20/04370-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 289/20 | 20/04370-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 347/20 | 20/04370-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 327/20 | 20/04370-1 |

**Upprunin til málið**
Inntøkurnar í árinum hava verið hægri enn mett, og hevur hetta givið møguleika fyri at hækka inntøkur og útreiðslur í inniverandi fíggjarætlan fyri 2020.

Eykajáttan krevst, tá ið ein samtykt fíggjarætlan verður broytt, tað verið seg hækking ella lækking av inntøkum og/ella útreiðslum. Uppskot til fígging skal fylgja við eini eykajáttan. Eykajáttanir skulu vera samtyktar í býráðnum við aðru viðgerð innan 31. desember í fíggjarárinum.

**Lýsing av málinum, samandráttur**
Samlaðu meirinntøkurnar í árinum vóru í oktober 61,8 mió.kr. Av hesum eru 18,2 mió.kr. meirinntøkur frá felagsskatti og 18,8 mió.kr. eru reguleringin fyri 2019.
Samtykt er at játta tilsamans 28,8 mió.kr. av meirinntøkum. Mál nr. 20/03794.

Meirnýtsla hevur verið á einstøkum rakstrarstøðum, sum ikki hava fingið neyðuga játtan.
Mælt verður til, at játta pening til til hesi rakstrarstøð:

| **Rakstrarstøð sum tørva eykajáttan í 2020:** | |
|---|---|
| 2613 Børn sett heiman í fosturfamilju | 3.000 |
| 2617 Brúkaragjøld, serstovur | 2.300 |
| 2810 Fíggjarligt frípláss | 300 |
| 3213 Systkinaavsláttur | 4.800 |
| 3212 Tímar vegna serligan tørv | 3.000 |
| **Rakstrarstøð sum tørva eykajáttan í 2020** | **13.400** |

**2613 Børn sett heiman í fosturfamilju**
Talan er um lógarbundna játtan sambært barnaverndarlógina í sambandi við umsorganaryvirtøku av barni.

Við árslok 2019 hevði kontan eina meirnýtslu uppá kr. 972.000. Orsøkin var stór útreiðsluøking frá kr. 12,8 mió í 2018 til kr. 15,7 mió í 2019, sum játtanin ikki hevði tikið hædd fyri. Gongdin pr. oktober 2020 gevur ábending um, at útreiðslurnar verða umleið kr. 17,2 mió í ár, og samlaða meirnýtslan (2019 íroknað) verður uml. kr. 3,1 mió.

Orsøk til hesa hesa gongd er stór øking í talinum av børnum sett heiman í fosturfamilju. Í 2018 vóru í miðal 47 børn i skipanini, í 2019 var talið í miðal 50, og higartil í 2020 er talið komið uppá uml. 60 børn. Í uppskotinum til fíggjarætlan 2021 eru settar av kr. 16,5 mió.

**2617 Brúkaragjøld, serstovur**
Talan er um lógarbundna játtan sambært barnaverndarlógina í sambandi við umsorganaryvirtøku av barni.

Við árslok 2019 hevði kontan eina meirnýtslu uppá kr. 1, mió, harav meirnýtsla kr. 330.000 var frá árinum 2018. Eins og konta 2613 hevur henda konta havt stóra útreiðsluøking síðstu árini. Í 2018 vóru útreiðslurnar kr. 2,4 mió og í 2019 kr. 3,1 mió. Við støði í útreiðslunum pr. oktober 2020 verða útreiðslurnar fyri alt 2020 mettar til uml. kr. 4,4 mió. Lagt er ikki upp fyri hesum í játtanini til 2020, og mett verður tí samlað meirnýtsla uppá kr. 2,5 mió.

Eins og við kontu 2613 er vøkstur í talinum av børnum (eisini familjum) í skipanini orsøk. Í 2018 vóru í miðal 7 børn í skipanini, í 2019 var talið í miðal 10, og higartil í 2020 er talið komið uppá 15.

**2810 Fíggjarligt fríплáss**
Talan er um lógarbundna játtan sambært sambært dagstovnalógini.

Við árslok 2019 hevði kontan eina meirnýtslu uppá kr. 399.000. Játtanin í 2020 er kr. 4,2 mió. Væntaða nýtslan pr. november 2020 er kr. 4,25 mió, men vegna meirnýtsluna í fjør hevur kontan eina væntaða samlaða meirnýtslu uppá uml. kr. 450.000.

Barnatalið í dagstovnaaldri er vaksið nógv síðstu árini og foreldragjaldið er hækkað.

**3213 Systkinaavsláttur**
Talan er um avsláttarskipan, sum kommunan hevur sett í verk, har foreldur gjalda einans fyri yngsta barnið á stovni.

Kontan hevur havt meirnýtslu síðani 2017, tá við kr. 431.000. Í 2018 lækkaði meirnýtslan til kr. 334.000, hetta í sambandi við, at játtanin hækkaði við uml. kr. 1 mió til kr. 10 mió, men í 2019 vaks meirnýtslan við kr. 2,8 mió. Hóast játtanin í 2020 hækkaði til kr. 11,5 mió, so er gongdin pr. november 2020, at nýtslan verður uml. kr. 13,1 mió. Samlað meirnýtsla verður tá uml. kr. 4,7 mió.

Í 2017 var útreiðslan kr. 9,2 mio. Stóri vøksturin í barnatalinum hesi ár – í dagstovnaaldri nærum 200 børn, er høvuðsorsøk til hækkingina. Aftrat er hækka foreldragjald.

**3212 Tímar vegna serligan tørv**
Talan er um skipan við støði í dagstovnalógini § 5 um námsfrøðilig tilboð til børn við serligum tørvi.

Útreiðslugongdin í 2019 og 2020 er hægri enn árini frammanundan. Í 2018 var útreiðslan kr. 9,2 mió, meðan hon í 2019 var kr. 11,5 mió, og framroknað pr. oktober 2020 væntast útreiðslan at verða kr. 12,8 mió. Samlaða meirnýtslan í 2020 verður væntandi uml. kr. 3 mió.

Orsøk til hetta er lutvíst hækkaða barnatalið, men í størri mun vaksandi tørvur bæði á eyka tímum í vanligum stovum og vaksandi tørvur á serstovum, har nógv færri børn og nógv fleiri starvsfólk eru enn í vanligari stovu.

Umleið 125 børn fáa eyka tímar av hesi kontu á vanligari stovu, men haraftrat eru 24 børn á serstovu, sum krevja nógv fleiri tímar. Hesari broyting rúmar játtanin ikki, og í sambandi við fíggjarætlanina 2021 er tí eisini lagt upp til at skipa eina serstovunormering burturav umframt játtan til endamálið.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávísøkir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingarligar avleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvislgar avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli**:
Stjórnin og fíggjarleiðarin mæla til, at ein partur av avlopinum av meirinntøkum, 13,4 mió. kr. verður nýtt at fíggja omanfyri standandi.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:** Víst verður til samtyktina í máli 14/03408.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við býráðnum við teirri broyting, at 21,8 mió. kr. verða játtaðar til Skúlan á Fløtum, vísandi til mál 14/03408. Upphæddin verður játtað av meirinntøkum.

Málið beint í býráðið til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 328/20 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.02.2020 | 64/20 | 20/00203-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 48/20 | 20/00203-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 83/20 | 20/00203-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 106/20 | 20/00203-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 86/20 | 20/00203-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 138/20 | 20/00203-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 110/20 | 20/00203-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 181/20 | 20/00203-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 160/20 | 20/00203-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 235/20 | 20/00203-1 |
| 11 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 207/20 | 20/00203-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 268/20 | 20/00203-1 |
| 13 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 245/20 | 20/00203-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 25.11.2020 | 316/20 | 20/00203-1 |
| 15 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 290/20 | 20/00203-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 17.12.2020 | 363/20 | 20/00203-1 |
| 17 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 328/20 | 20/00203-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 27. februar 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar og mars at góðkenna.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 25. november 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Roknskapurin fyri november verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

# 329/20 Gigni : Framtíðar hølisviðurskifti í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 16.01.2020 | 2/20 | 19/01965-2 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 10.09.2020 | 28/20 | 19/01965-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 283/20 | 19/01965-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 26.10.2020 | 291/20 | 19/01965-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 281/20 | 19/01965-2 |
| 6 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 224/20 | 19/01965-2 |
| 7 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 329/20 | 19/01965-2 |

**Upprunin til málið:**
Tørvur á hóskandi hølum til smábarnavirksemið hjá Gigni

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunan hevur havt hølistørvin hjá Gigni viðvíkjandi smábarnavirkseminum í huga, tá høli eru tøk. Høli til Gigni vóru eisini partur av ætlanini at leiga og innrættta bygning á Hálsi til kommunulæknaviðtalur, men tann ætlanin datt niðurfyri.

Gigni hevur sent ynski teirra um hølir framyvir:

- Skrivstovupláss til 6 heilsufrøðingar við hvør sínum borði og pláss til arkiv
- Ves til starvsfólk
- Køk, sum skal nøkta tørvin til mammubólk og starvsfólk
- Nøktandi arbeiðsamboð, so sum amboð til undirvísing, teldur og skrivstovuútgerð

Høli til mammubólk:

- Rúm við borði til 12-15 persónar og gott gólvpláss til pinkubørn
- Skiftirúm
- Ves til vitjandi
- Pláss til sofu til m.a bróstageving
- Atgongd til køk

Høli til ambulant virksemi:

- Gigni ynskir at kunna bjóða mammum/familjum eitt stað, har tey kunnu venda sær til hvønn dag viðvíkjandi trupulleikum við bróstageving og øðrum trupulleikum í familjuni.

Leiðsla og heilsuføðingar undir sama taki:

- Ynskiligt er at fáa eitt somikið stórt høli at heilsufrøðingar, sum í dag eru knýttir at Kristnastovu, koma undir sama tak sum leiðslan á Gigni.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Lóg um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung.

Sambært tulking frá Heilsumálaráðnum hevur kommuna skyldu at veita Gigni høli til smábarnavirksemið umframt viðtalurnar í skúlunum. Henda skylda fevnir tó ikki høli til leiðsluna og sjálva fyrisitingini í Gigni.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Hølistørvurin, sum lýstur omanfyri, krevur rættiliga rúmligan bygning. Aftrat skal hugsast góð atkomuviðurskifti fyri foreldur og barnavognar.

Í máli 19/01969 er nevndur møguleikin, at kommunulæknaviðtalurnar í Frúutrøð, sum nú standa tómar, verða innrættaðar til smábarnavirksemið hjá Gigni. Teknað er ikki uppá henda møguleika, men kann ein tilgongd saman við Gigni meta um, hvørt hetta kann gerast nøktandi loysn.

Skal bygningurin nýtast til hetta endamálið, krevjast broytingar í innrætting umframt nýtt innbúgv og nýggj útgerð. Kostnaðarmeting fyriliggur ikki. Neyðugt verður at útvega fígging til umbyggingina v.m.

Loysn í Frúutrøð skal taka hædd fyri ætlanini um íbúðarbygging í økinum.

Skal hugsast um varandi loysn til Gigni í t.d. nýbygging, so kundi í framskygdari loysn verið hugsað um sambygging við kommunalu barnatannrøktina (sí mál 15/03750).

Barnatannrøktin hevur eisini í mong víst á tørvin at fáa nýggj og tíðarhóskandi høli til tannrøktartænastuna. Bæði viðvíkjandi tannrøktini og Gigni er talan um heilsutænastur sbrt lóg, og ein slíkur bygningur kundi tí blivið ein heilsudepil til børn og ung.

Tannlæknastovan hevur víst á tøkt byggilendi (matr.nr. 917, Hans Andriasar gøta) millum nýggja Musikkskúlan og Skúlan á Fløtum sum vælegnað staðseting til tannrøktina. Økið er í byggisamtyktini skipað sum ítróttaøkið og krevur tí at verða broytt, skal hetta realiserast. Í langtíðaríløguætlanini er bygging av tannlæknamiðstøð sett at fáa ávísa fígging árið 2025.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/01969 Tøkir skúlabygningar 2019-2020

Ætlaða íbúðarverkætlanin í Frúutrøð kann hava týdning fyri, um talan kann gerast um varandi hølisloysn til Gigni á hesum stað.

15/03750 nýggj tannlæknastova

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at kanna saman við Gigni, um hølini í Frúutrøð kunnu innrættast til smábarnavirksemið at leggja aftur fyri nevndina.

Mælt verður somuleiðis nevndini til at umrøða møguliga varandi loysn til Gigni í sambygging saman við barnatannrøktina sum lýst omanfyri.

**Trivnaðarnevndin 16. januar 2020:** Samtykt at umsitingin tekur upp samband við Gigni um hølisloysn á Frúutrøð.

**Ískoyti:**
Í skrivi dagfest 30. august 2020 ynskja nevndarlimirnir Bjørghild Djurhuus og Helena Dam á Neystabø málið á skrá, sí hjálagda skriv.

Fyrisitingin skal upplýsa, at málið er eisini til viðgerðar í mentamálanevndini, mál 19/01969 Tøkir skúlabygningar.

**Trivnaðarnevndin 10. september 2020:** Trivnaðarnevndin er samd um, at Gigni skal verða staðsett í øllum Gula skúla og heitir á fíggjarnevndina um at gera avtalu við Heilsutrygd um tað.

**Ískoyti:**
Í máli 19/01969 Tøkir skúlabygningar 2019-2020 samtykti mentamálanevndin 9. september 2020 "At fáa greinað um tað ber til at sameina virksemi hjá Gigni og Listgrafo í Gula skúla og fyritreytirnar fyri tí."

Umsitingin viðgerð málið og fer ráðgevi væntandi undir greiningar um mánaðarskiftið og er ætlanin at ein meting verður tøk í nov.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða samtyktina í trivnaðarnevndini.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Lýsti hølistørvurin hjá Gigni til smábarnavirksemið og til høvuðsskrivstovuna hjá Gigni er umleið 250 m².
Hetta svarar til uml. tríggjar fjórðingar av bygninginum.

Mett verður, at til ber at innrætta henda hølistørvin hjá Gigni í Gula skúla soleiðis, at hin parturin av bygninginum, uml. 100 m², harav nakað er í kjallaranum, kann brúkast til annað hóskandi endamál.

Gigni hevur frammaundan skipað virksemi í øllum fólkaskúlunum. Mett verður, at Gigni eisini í størri mun kann brúka skúlahøli til partar av almenna virkseminum.

Umsitingin er í tilgongd at gera uppskot um innrætting og kostnað av tí, har Gigni hevur størra partin av bygninginum sum omanfyri nevnt. Tann parturin av hesum, sum er ætlað høvuðsskrivstovuni, verður at skipa í leigusáttmála við Heilsutrygd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at Gigni verður staðsett í Gula skúla við uml. 250 m² ásett eftir neyvari ætlan um innrætting v.m.

**Mentamálanevndin 26. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Heðin Mortensen, tekur undir við trivnaðarnevndini.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, taka undir við samtyktini hjá trivnaðarnevndini 19. september 2020. Málið verður lagt fyri aftur fíggjarnevndina við atliti til at gera leigusáttmála.

Ein minniluti, Annika Olsen og Gunvør Balle, taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Annika Olsen og Gunvør Balle.

**Ískoyti:**
Bjørghild Djurhuus og Helena Dam á Neystabø, býráðslimir fyri Javnaðarflokkin ynskja málið á skrá.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Atkvøtt varð um uppskot frá Helenu Dam á Neystabø um at beina málið í trivnaðarnevndina, ið varð einmælt samtykt.

# 330/20 Ásetan av fundardøgum fyri býráðið 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 330/20 | 20/04204-1 |

**Málslýsing:**

Uppskot frá umsitingini til fundardagar 2021 kl. 17:00 í býráðssalinum.

28. januar
25. februar
25. mars
29. apríl
27. mai
23. juni
30. september
28. oktober
25. november
16. desember

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. desember 2020 | Blað nr.: 1401 |
| | Formansins merki: |

# 331/20 Áheitan um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 1175i, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 251/20 | 20/04650-3 |
| 2 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 331/20 | 20/04650-3 |

**Upprunin til málið:**
Eigarin av matr. nr. 1175i, Tórshavn søkir um at broyta byggisamtyktina fyri økið frá B4 vinnuøki til øki, har loyvt er at byggja íbúðir. Í umsóknini stendur, at ynskið er at byggja íbúðir til fólk, ið ynskja sær ein góðan bústað á ellisárum, sí skjal *Økið*.

Hetta er ikki í tráð við ásetingarnar fyri økið, og tískil er neyðugt at broyta byggisamtyktina, um tað skal lata seg gera. Umsøkjari ynskir, at ein tílík broyting viðførir at byggjast kann við einum høgum nýtslu- og byggistigi og í trimum hæddum. Tað kundi t.d. verið í einum A3 øki, við eini serstakari byggisamtykt, ið skipar økið til íbúðarbygging ella í einum A2 øki, sum er ætlað bústaðarbygging í fleiri hæddum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Matr. nr. 1175i liggur út móti Húsahaga. Ognin liggur norðanfyri Oyggjarvegin og eru eingir bústaðir staðsettir hesumegin Oyggjarvegin. Býarskipanarliga er tískil talan um eitt býarmark, ið verður flutt.

Í Kommunuætlanini 2020 er Húsahagi útnevndur sum býarvakstrarøki, sí skjal *Brot úr Kommunuætlanini 2020*, men hevur hetta økið eina lága raðfesting. Um Húsahaga sum býarvakstrarøki stendur í Kommunuætlanini:

"*Atkomuviðurskiftini í Húsahaga eru sera góð, tá til ber at koma inn á økið frá Oyggjarvegnum. Økið liggur lutfalsliga avbyrgt og langt burturi frá øðrum. Tí eru trivnaðarviðurskiftini ikki so góð her. Mett verður, at neyðuga íløgan í kloakk, um økið skal nýtast sum bústaðarøki, er órímiliga dýr. Tí kann hugsast, um økið her kann nýtast til vinnuøki, tá tað ikki krevur eins nógv av kloakering.*"

Nógv av tí, sum stendur um Húsahaga í Kommunuætlanini, er somuleiðis galdandi fyri matr. nr. 1175i – økið er avbyrgt og langt burturi frá øðrum, trivnaðarviðurskiftini eru ikki so góð og egnar økið seg betur til vinnuøki enn sum bústaðarøki.

Matr. nr. 1175i er vestasti partur av einum uml. 40.000 $m^2$ stórum vinnuøki við Oyggjarvegin, har m.a. Brandstøðin heldur til. Talan er um eitt B4 vinnuøki, ið loyvir vinnuvirkjum í umhvørvisflokki 2-4, og eru hesi tey lættastu av teimum tungu framleiðsluvirkjunum. Frástøðan til bústaðir er fyri henda flokk uml. 50-100 metrar.

Ein tílík broyting, sum søkt verður um, ávirkar ikki einans sjálvan matrikulin, men ávirkar eisini vinnuøkið, ið liggur eystanfyri, av tí at ein ávís frástøða verður kravd millum bústaðir, og vinnuvirki í umhvørvisflokki 2-4. Um bústaðir verða loyvdir á matr. nr. 1175i ávirkar hetta soleiðis ein part av vinnuøkinum við Oyggjarvegin, og kann hesin parturin ikki nýtast til tað, sum byggisamtyktin annars loyvir, sí grøna skraveraða økið á skjali *Byggisamtykt.*

Hóast tað er eftirspurningur eftir bústøðum í kommununi, so er somuleiðis eftirspurningurin eftir vinnuøkjum stórur. Tí verður tað ikki mett vera rætt at broyta eitt stykki í einum øki, ið frammanundan er planlagt til vinnu, til bústaðarøki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í B4 øki, og eru ásetingarnar fyri hetta m.a.:

- Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi.

- Virkini í hesum umráðisparti skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Um møguleiki skal vera at byggja íbúðir á økinum, má økið broytast til A2 øki ella A3 øki.

Ásetingarnar fyri A2 øki eru m.a.:
- Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál.
- Byggistigið má ikki fara upp um 0,25.
- Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8.
- Hús kunnu einans verða bygd við í mesta lagi 5 hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m mált til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

Ásetingarnar fyri A3 øki eru m.a.:
- Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virki, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
- Byggistig 0,3.
- Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús ella raðhús.
- Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.
- Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Í B4 økjum verða vinnuvirki í umhvørvisflokkunum 2 til 4 loyvd. Í vegleiðingini til flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu, stendur soleiðis um flokk 4:
*"Umfatar virki, ið geva ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi, men eru tey lættastu av teimum tungu framleiðsluvirkjunum. Kann staðsetast í einum ídnaðarøki. Virkir í hesum flokkinum eru serliga matvøruvirkir og t.d. minni virkir sum bilverkstaðir við sproytukabinu. Frástøðan til bústaðir, er fyri henda flokk uml. 50-100 metrar."*

Umhvørvisdálkingin, ið stendst av vindmyllulundunum í økinum – verandi og ætlaðu – ávirka ikki matr. nr. 1175i.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur verið til hoyring hjá teknisku deild og upplýsa tey, at kommunan er í samráð við Landsverk um yvirtøku av Oyggjarvegnum, niðan til Hotel Føroyar. Annars hava tey ongar viðmerkingar til umsóknina.

**Skjøl**
- *Brot úr Kommunuætlanini 2020,* journal nr. 20/04650-5.
- *Byggisamtykt,* journal nr. 20/04650-6.
- *Økið,* journal nr. 20/04650-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. desember 2020 | Blað nr.: 1403 | |
| | Formansins merki: | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at broyta almennu byggisamtyktina fyri matr. nr. 1175i, Tórshavn, grundað á:

- Økið er ein natúrligur partur av vinnuøkinum við Oyggjarvegin.
- Økið liggur avbyrgt og uttanfyri planlagt bústaðarøki.
- Broytingin er ikki í tráð við vegleiðingina um umhvørvisflokking í Tórshavnar kommunu, og hevði ein tílík broyting havt ávirkan á møguligu nýtsluna av grannaognum.
- Tørvur er á vinnuøkjum í kommununi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Marin Katrina Frýdal og Turið Horn taka undir við tilmælinum.

Bogi Andreasen og Annfinn Brekkstein mæla til at ganga umsøkjaranum á møti um at broyta byggisamtyktina.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Tikið av skrá.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |